# GERÐABÓK

**Dato:** 24. september 2020 **Kl**. 18:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 182/20 – 210/20**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen
Jógvan Arge (mál 202/20)

**LUTTÓKU EISINI:**
Bogi Jacobsen
Eyðfríð Jacobsen
Eyðna Justinussen
Jóan Petur Hentze

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 182/20 | 20/00205-1 | Mál beind í nevndir 2020 | 811 |
| 183/20 | 20/01685-3 | Generatorsett til landstreym - Tórshavnar Havn | 813 |
| 184/20 | 19/00085-12 | Matr.nr. 255dp, Kirkjubøur. Argir. Eigari ynskir at lata grundstykkið innaftur til kommununa. | 815 |
| 185/20 | 20/01519-2 | Møguligt keyp av grundstykkið burtur av matr.nr. 43a, Velbastaður. | 817 |
| 186/20 | 20/03128-3 | Matr.nr. 91t, Kollafjørur. Eigari heitir á kommununa um at taka grundstykkið innaftur. | 819 |
| 187/20 | 20/02815-2 | Uppskot um at upploysa 3 Grunnar sum Tórshavnar kommuna umsitur | 821 |
| 188/20 | 17/03196-1 | Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum | 822 |
| 189/20 | 17/03551-2 | Róðrarfelagið Knørrur : Umsókn um høli / grundstykki so felagið kann samla virksemið á einum stað | 831 |
| 190/20 | 19/00719-1 | Lopgrøv í Fimi | 835 |
| 191/20 | 20/02637-4 | Tilmæli av limum í Leiklistaráðið 2020 til 2023 | 839 |
| 192/20 | 20/01843-1 | Fyribils avtala um skúlabygningarnar á Frælsinum | 840 |
| 193/20 | 16/01715-2 | Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm. | 844 |
| 194/20 | 17/03061-1 | Útinna forskeypsrætt til ognina Kurla matr. nr. 1408b, Tórshavn | 852 |
| 195/20 | 20/03440-1 | Útgerð - Musikkskúlin | 856 |
| 196/20 | 19/00501-1 | Landavegur 3. Byggistig, frá Heygsvegnum til Marknagilsvegin | 858 |
| 197/20 | 19/02307-4 | Fyrispurningur um møguliga avtalu á matr. nr. 1245 um breiðkan av vegi og gongubreyt á vegamótinum Varðagøta / Brattabrekka | 863 |
| 198/20 | 14/02182-8 | Áheitan frá borgara um at gera vegastrekkið við Dalalíð liðugt (2011-2060) | 865 |
| 199/20 | 20/01731-2 | Broytan av svingi í Blómubrekku | 869 |
| 200/20 | 20/02256-1 | Vegur til biogassverkið | 871 |
| 201/20 | 19/04645-1 | Dagføring av vegnum Argjavegur/Argjaboðagøta | 873 |
| 202/20 | 19/03902-2 | Umsókn um broyting av byggisamtyktini matr. nr. 79a, Hoyvík | 877 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 203/20 | 20/01012-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt Yviri við Strond, matr. nr. 619, 620o, 651g, 651b, 651l, 651k og651i, Tórshavn | 880 |
| 204/20 | 20/01014-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt á Kirkjustræti, matr. nr. 135gv og 135gx, Hoyvík | 882 |
| 205/20 | 20/01015-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt á Sundi, matr. nr. 1c, 1f, 1e, 1c, 3a, 3b og 4c, Sund | 884 |
| 206/20 | 20/03416-1 | Fíggjarætlan 2021, Tórshavnar kommuna | 886 |
| 207/20 | 20/00203-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2020 | 891 |
| 208/20 | 20/03503-1 | Listprýði skúlin á Fløtum | 894 |
| 209/20 | 17/01361-1 | Listaverkstøð í Finsen | 898 |
| 210/20 | 20/03094-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Kaldbak og Kaldbaksbotn til býráðsvalið 10. november 2020 | 911 |

**Til viðgerðar**

## 182/20 Mál beind í nevndir 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 3/20 | 20/00205-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 25/20 | 20/00205-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 63/20 | 20/00205-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 87/20 | 20/00205-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 131/20 | 20/00205-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 182/20 | 20/00205-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

# 183/20 Generatorsett til landstreym - Tórshavnar Havn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 07.09.2020 | 67/20 | 20/01685-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 203/20 | 20/01685-3 |
| 3 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 183/20 | 20/01685-3 |

**Upprunin til málið:**
Ynski er um at minka um vansar av óljóði frá skipum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar Havn hevur í longri tíð arbeitt við at finna loysnir fyri at kunna veita skipum landstreym, eisini teimum skipum, ið hava tørv á nógvum landstreymi, t.d. uppisjóvarskip og frystifarmaskip.
Stórar avbjóðingar eru tó í sambandi við at fáa gjørt eina landstreymsskipan. Ein avbjóðing er, at tekniska útgerðin og íbindingargjald til SEV er kostnaðartungt. Ein onnur avbjóðing er, at ein "føst" landstreymsskipan, ið fær streym frá netinum hjá SEV, gerst rættiliga ósmidlig, soleiðis skilt, at íbindingarstøðini verða bert á ávísum stað/støðum.
Vansin er tí, at skip, ið liggja við aðrastaðni enn júst har, ið íbindingin er staðsett, ikki kunnu fáa gagn av slíkari skipan.
Tórshavnar Havn hevur tí, í samráð við nakrar veitarar, kannað eina aðra loysn við flytbarari landstreymsskipan, ið verður drivin við dieselmotori. Avgerandi hevur verið, at skipanin verður so ljóðleys sum gjørligt.
Tað eru fleiri fyrimunir við tílíkari skipan, t.d.

- Trupulleikin við larmi frá skipum verður loystur, treytað av, at skipini hava møguleika at knýta í skipanina
- Tað er ein væl bílígari loysn enn ein føst landstreymsskipan
- Skipanin er smidlig, tí hon kann setast júst har, ið skipið liggur, og hon kann flytast ímillum ymsu bryggjurnar, t.d. Kollafjørð, Oyrareingir, Sund og Tórshavn. Harvið verður møguligt hjá nógv fleiri skipum at knýta í skipanini (treytað av tey eru útgjørd til tess), og harvið at minka um larmvansar á ymsum støðum.

Tórshavnar Havn hevur fingið 8 ymisk tilboð frá 3 ymsum veitarum uppá eitt tílíkt "generatorsett" í bingju, sum verður rikið við diesel-olju. Tilboðini eru nærri lýst og útgreinaði í notati, j.nr. 20/01685-35.
Niðurstøðan í útgreiningini er, at tilboðið áljóðandi 1,499 mió. kr., frá einum samtaki millum Steingrund Akustik og ETV (El-talvuvirkið í Gøtu) uppá eina skipan frá NED Generators í Italia er tað besta tilboðið. Her er talan um eina 1000 KVA (800 kw) generator í eini 30 fót bingju við einum ljóðstøði á 55 dB(A) mált á 7 m frástøðu. Generatorurin kann veita streym við frekvensi á 50 Hz og 60 Hz, og spenning frá við 380 V og 440 V, sum samsvarar við elskipanirnar á allarflestu skipum, sum koma til Tórshavnar Havn.
Tó eru ymisk viðurskifti, ið skulu kannast og útgreinast nærri, áðrenn skipanin kann bíleggjast, m.a. við at síggja og hoyra eina tílíka skipan í veruligum rakstri. Hesin parturin verður eftir ætlan liðugur tíðliga í oktober. Tað kunnu tískil koma eyka kostnaðir aftrat tilboðsprísinum nevndur omanfyri.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

Skipanin kann minka um vansar við óljóði frá skipum, treytað av at skip knýta í skipanina.
Í mun til útlát við royki frá dieselmotorum, hevur skipanin hevur ikki nakra neiliga árin á umhvørvið, í mun til støðuna í dag. Hetta tí at í dag framleiða skip el við egnum diesel-motorum, og um eitt skip knýtur í hesa landstreymskipanina, verður el-framleiðslan flutt av skipinum og inn á á bryggjuna, og harvið verður oljunýtslan til el-framleiðsluna hin sama.
Um el nýtslan hjá skipinum hjá skipunum skuldi komið frá SEV, vildu sannlíkindini fyri, at el skuldu framleiðast við olju, verið umleið 82 % (uppá ársbasis í 2015), og tí kann eisini sigast, at tað í 2015 bert vóru 18 % sannlíkindi fyri, at landstreymur til skip frá SEV hevði verið grønur. Tískil er ein landstreymsskipan við diesel-motorum í flestu førum ikki verri fyri umhvørvið ein ein føst landstreymskipan, ið fær el frá SEV.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
20/01685-35 Notat – viðgerð av tilboðum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til, at Tórshavnar Havn útvegar eitt tílíkt generatorsett til at kunna veita landstreym til skip, ið eru útgjørd til at taka ímóti landstreymi.
Mælt verður til, at Tórshavnar Havn fær heimild til at samráðast og gera sáttmála um eitt generatorsett við veitaran við besta tilboðnum, og at játtaðar verða í alt 2,4 mió til verkætlanina, harav 1,4 mió verður játtaður av avsettum íløgum til landstreym í 2020 og 1,0 mió av íløgum fyri 2021.

**Vinnunevndin 07. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við Vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

# 184/20 Matr.nr. 255dp, Kirkjubøur. Argir. Eigari ynskir at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 208/20 | 19/00085-12 |
| 2 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 184/20 | 19/00085-12 |

**Upprunin til máliðKeyp:** Keypari ynskir at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**

Matr.nr. 255dp, Kirkjubøur/Argir. Vídd 402m2 + 1/45 part av matr.nr. 255ek. Samlað vídd 415m2 íroknað part av felagsøki.

Keyparin hevur goldið ávegisgjaldið kr. 343.557,50, og hevur eisini undirskrivað fyribils skeytið. Keypari hevur ikki goldið endaliga gjaldið og hevur heldur ikki skrivað undir endaligt skeytið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum:** Ongi.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Undirskrivað fyribils skeyti, kortskjal og umsókn frá keypara.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa stykkið aftur, og at luta tað útaftur sambært reglugerð.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

# 185/20 Møguligt keyp av grundstykkið burtur av matr.nr. 43a, Velbastaður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 160/20 | 20/01519-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 34/20 | 20/01519-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 154/20 | 20/01519-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 210/20 | 20/01519-2 |
| 5 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 185/20 | 20/01519-2 |

**Upprunin til málið:** Eigarin av grundstykkinum bjóðar kommununi grundstykkið til keyps.

Umleið 535m2, verða frámatrikuleraðir matr.nr. 43a, Velbastaður. Stykkið liggur beint hinumegin skúlan á Velbastað.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Parkeringsviðurskiftini við Skúlan á Velbastað eru sera trupul.

Verandi eigari av ognini matr. nr. 43a, hevur vent sær til kommununa. Hann bjóðar kommununi eitt grundstykki á uml. 535m2, til keyps fyri uml. 500.000,00
( Uml. 935 kr.m2 )

Longdin á grundstykkinum framvið vegnum verður uml. 20,25 metrar.

Um kommunan ognar sær lendið, ber til at gera parkeringsøkið á grundstykkinum.

Stykkið hevur staðið á sølulista hjá ognarmeklara, men er fyribils tikið av sølulista aftur, meðan frábýtismálið verður avgreitt.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin. Ongi.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. september 2020 | Blað nr.: 818 | |
| | Formansins merki: | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið í teknisku nevnd og í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at kommunan ognar sær økið til parkeringspláss til skúlan.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti. V**erkætlanin verður fíggjað av konto 8175, Vegir Íløgur, L00002, framfluttur karmur.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til, at keypa ognina, sum nú er frámatrikulerað og hevur fingið matr.nr. 43i, Velbastaður. Vídd 477m2, fyri í mesta lagi 500.000,00 svarandi til 1.050 kr.fermeturin.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Jákup Dam legði fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til at keypa uml. 535 fermetrar av matr. nr. 43a og 43i, Velbastaður, sambært upprunaliga tilmælinum til teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina og sambært kortskjali, j.nr. 20/01519/3.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Jákupi Dam, ið varð einmælt samtykt.

## 186/20 Matr.nr. 91t, Kollafjørur. Eigari heitir á kommununa um at taka grundstykkið innaftur.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 209/20 | 20/03128-3 |
| 2 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 186/20 | 20/03128-3 |

**Upprunin til málið**:
Eigari heitir á kommununa um, at taka grundstykkið matr.nr. 91t, Kollafjørður, innaftur.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Grundstykki, Bøgøta 47, Kollafjørður. Matr. nr. 91t. Vídd 516m2. Ógrivið.
Keypsprísur 242.525,16 Skeytið tinglýst 13.12.2018

Keyparin ynskir at lata grundstykkið innaftur.

Sambært skeytisásetingum framgongur at allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting falla til keypara og at Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin. Ongi.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl. Kort. Umbøn frá eigara.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávísøkir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa grundstykkið aftur fyri kr. 242.525,16

Seljarin rindar útreiðslur til tinglýsing av afturkeyps skeytinum kr. 3.425,25

Tá ið kommunan hevur ognað sær grundstykkið, verður grundstykkið lýst til sølu hjá ognarmeklara.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

# 187/20 Uppskot um at uppløysa 3 Grunnar sum Tórshavnar kommuna umsitur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 212/20 | 20/02815-2 |
| 2 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 187/20 | 20/02815-2 |

**Málslýsing:**
Grannskoðanin hjá Tórshavnar kommunu hevur í fleiri ár ført fram í grannskoðanarprotikollina, at:

"Mælt verður til, at greiða verður fingin á, hvat skal henda við óvirknum legatum"

Talan er um niðanfyrinevndu 3 grunnar (Legat):

- Konsul Joahannes Hansen og hustru Betsy Eling Adelaide Hansens legat
- Else Bergithe Petersens legat
- Det Restoffske legat

Felags fyri nevndu grunnar er, at bert renturnar av grunnafænum kann útlutast til legatararnar. Legatportiónirnar eru í førum kr. 50,00 um árið. Felags er, at tað er útlutan til "værdige trængende kvinder".

Hildið verður, at tíðin er farin frá hesum grunnum, bæði hvat viðvíkur rentum, tí grunnfæið er ikki rentuberandi og sostatt einki at útluta, umframt støddin av grunnfænum, og hvat viðvíkur rættindahavarum og loksins eisini viðvíkjandi fyrisiting av grunnunum.
Heimild er at fáa uppløyst slíkar grunnar við loyvi frá grunnamyndugleikanum Føroya Landsstýri tá ið "midler ikke står i rimeligt forhold til formålet" og tað ger tað ikki í hesum førum, sí upprit í j.nr. 20/02815, ið er lagt við sum skjal.

Mælt verður sostatt til, at fíggjarnevndin játtar at søkt verður Føroya Landsstýri um, at nevndu grunnar verða uppløystir. Tá grunnarnir eru uppløystir kann samlaða grunnfæið latast grunni við sosialum endamáli, soleiðis at endamálið hjá áðurnevndu grunnum á tann hátt verður uppfylt. Eitt dømi kundi verið byggigrunnurin hjá Kvinnuhúsinum í Tórshavn.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin av Stjórnarskrivstovuni mæla fíggjarnevndini til at loyva, at kommunan vendir sær til Føroya Landsstýri við umbøn um at uppløysa omanfyrinevndu grunnar og at samlaða grunnfæið fer til annað sosialt annað endamál, so sum byggigrunnin hjá Kvinnuhúsinum í Tórshavn.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

# 188/20 Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 20/17 | 17/03196-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 227/17 | 17/03196-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 240/17 | 17/03196-1 |
| 4 Eldranevndin | 21.08.2018 | 4/18 | 17/03196-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 232/18 | 17/03196-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2019 | 3/19 | 17/03196-1 |
| 7 Eldranevndin | 14.02.2019 | 20/19 | 17/03196-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 50/19 | 17/03196-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 35/19 | 17/03196-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 110/19 | 17/03196-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 165/19 | 17/03196-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 232/19 | 17/03196-1 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2020 | 35/20 | 17/03196-1 |
| 14 Eldranevndin | 06.02.2020 | 31/20 | 17/03196-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 181/20 | 17/03196-1 |
| 16 Eldranevndin | 10.09.2020 | 12/20 | 17/03196-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 213/20 | 17/03196-1 |
| 18 Eldranevndin | 15.09.2020 | 15/20 | 17/03196-1 |
| 19 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 188/20 | 17/03196-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýtt røktarheim umfrant atknýttar røktaríbúðum í høvuðsstaðarøkinum. Tilmælið verður nærri útgreinað niðanfyri.

Í lógini um heimatænastu, eldraøkt v.m. frá 2014 er í grein 13 ásett, at kommunur kunnu seta á stovn bústaðir til fólkapensjónistar eftir hesi lóg. Bústaðir kunnu sbrt. stk. 2 fevna um 1) røktarheim, 2) eldrasambýli, 3) eldraíbúðir, 4) umlættingarpláss og 5) samdøgursendurvenjingarpláss.

Viðmerkingarnar til lógina útgreina ikki hesar bústaðarloysnir nærri, ella hvussu tær skulu koma til vega. Ásetingin er ásannandi breiða politiska ynskið um, at bústaðarmarknaðurin eisini til eldri verður meira fjøltáttaður. Eftir stendur tó, at kommunur hava heimild og initiativ til at fáa til vega aðrar bústaðarloysnir enn røktarheim.

Tórshavnar kommuna hevur í dag 203 røktarbúpláss, harav eru 145 búpláss til røktarkrevjandi og 58 búpláss til fólk við demenssjúku. Harafturat eru 11 umlættingarpláss og 5 samdøgurs-rehabiliteringspláss.

Umleið 50 av teimum 145 búplássunum eru Ellisheim/sambýlispláss, sum eru roknað til lættari røktarkrevjandi umframt til onnur, sum eitt nú ikki kunnu búgva einsamøll.

Heilsu- og umsorganartænastan stendur fyri hesum búplássum, men hevur ikki onnur bústaðarsløg at bjóða.

Tá um hesi bústaðarsløg ræður, eins og í mun til onnur nýggj sløg, sum kommunan og heilsu- og umsorganartænastan í dag ikki kunnu bjóða, er týdningarmikið at hava greitt, hvat meint verður við, og til hvønn tørv hjá teimum eldru, ið loysnin er ætlað til. Hetta verður lýst nærri niðanfyri.

Búpláss:

- Búpláss til røktarkrevjandi á røktarheimi er ætlað eldri fólki, sum eru illa fyri, vanliga tí tey eru sjúk og tí hava tørv á at búgva á búplássi við røktarstarvsfólki um tey alt samdøgrið. Fast búpláss er síðsta loysnin, ið brúkt verður, sum fólk gerast verri fyri. Røktarheimini hýsa borgarum, sum krevja røkt og hjáveru alt samdøgrið.

- Ellisheimið og sambýlini hýsa borgarum, sum eru lættari røktarkrevjandi og/ella sum ikki kunnu búgva einsamøll. Tvs., at húsfólk á Ellisheiminum og sambýlinum eru betur fyri, tá tey flyta inn enn tey, sum flyta inn á røktarheim at búgva.

- Eisini demensbúpláss eru røktarbúpláss, har røktarstarvsfólk eru til staðar alt samdøgrið, men hesi búpláss eru á stovnum ella deildum, sum einans eru ætlað eldri fólki við demenssjúku. Fólk við demenssjúku hava aðrar avbjóðingar enn eldri fólk við øðrum røktarkrevjandi sjúkum, og tí tørvar teimum at sleppa á búpláss, sum serliga eru ætlað fólki við demenssjúku.

Íbúðir:
Við støði í lógarásetingini, sum nevnd er omanfyri, so eru eldraíbúðir eisini bústaðarloysn, ið kommunur kunnu stovna. Ymiskt kann leggjast í fatan av, hvat ein eldaríbúð er, tí talan er um felagsheiti fyri ymsar bústaðarloysnir.

Niðanfyri verður felagsheitið eldraíbúð brotið upp í tvær ymiskar bústaðarloysnir – røktaríbúð og eldravinarliga íbúðir. Hesar kunnu aftur býtast sundur alt eftir, hvørt talan eru leiguíbúð ella eigaraíbúð.

Felags fyri allar eldraíbúðir er tó, at tær skulu vera innrættaðar hóskandi við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og rúmligum baðirúmi, so tað er pláss fyri koyristóli og hjálparfólki. Íbúðirnar skulu ikki hava trappu til høvuðsinngond, og um íbúðin er ikki í veghædd, skal lyft vera til íbúðina.

Eitt annað, ið eisini er øðrvísi við eldraíbúðum í mun til búpláss á røktarheimi er, at í íbúðunum kunnu búgva hjún/sambúgvandi.

- Røktaríbúð vil vanliga vera næstsíðsti bústaðurin, áðrenn upptøku til fast røktarheimspláss. Hetta vilja vera borgarar, sum heimatænastan hevur veitt tænastur til, men har mett verður, at borgarin og evt. saman við makanum høvdu fingið betri umstøður við at flyta í røktaríbúð, har røktarstarvsfólk eisini er knýtt at alt samdøgrið. Málbólkurin vildi eisini verið borgarar, sum í dag vera visiteraðir til ellisheim/sambýli.

  Røktaríbúðir kunnu við tí størsta fyrimuni byggjast saman við einum røktarheimi, har borgarin fær ágóða av øllum felagsfasilitetunum eitt nú venjingarumstøðum og trivnaðartilboðum annars. Eru røktaríbúðir knýttar at røktarheimi, verða tað starvsfólk á røktarheiminum, sum veita ta heimatænastu, ið borgarin annars vildi fingið sum heimabúgvandi. Hetta lættir sostatt um hjá heimatænastuni, men krevur ávísa tillaging av røktarnormeringini á heiminum.

  Kommunan hevur heimild byggja og reka røktaríbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónina um hendi. Til ber tó eisini, at aðrir partar byggja og reka røktarleiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu hevur visitatiónsrætt til allar røktaríbúðirnar.

- Eldravinarliga íbúð er íbúð, sum er innrættað hóskandi sum omanfyri lýst við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og bað o.s.fr. Onnur krøv eru sum so ikki, og íbúðin kann eins væl nýtast av øðrum yngri borgarum.

  Eldravinarlig íbúð kann tí byggjast sum einstakar íbúðir í størri íbúðarbygningi ella sum eldraíbúðardepil, tvs. nógvar eldravinarligar íbúðir í sama kompleksi. Alt eftir, hvussu nógvar eldravinarligar íbúðir vildi verið í slíkum kompleksi, har tað eisini mest sannlíkt er ávíst tal av borgarum, sum hava tørv á heimatænatuni, kundi hølisumstøður til heimatænastu verið knýttar at staðnum.

Kommunan hevur heimild at byggja og reka eldravinarligar íbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónsrætt. Til ber tó eisini, at aðrir partar, t.d. Bústaðir ella íleggjarar, byggja og reka eldravinarliga leiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu eisini hevur visitatiónsrætt til nakrar ella allar teirra.

Har tað í mun til røktaríbúðir vilja verða borgarar, sum frammanundan fáa heimatænastu og aðrar tænastur frá heilsu- og umsorganartænastuni, ið verða visiterað til røktaríbúð, so nýtist ikki sama at verða galdandi fyri eldravinarligu íbúðirnar. Talið av pensjónistum økist í stórum, og nógv av hesum eru vegna góða heilsustøðu als ikki í skipanini hjá heilsu- og umsorganartænastuni.

Skal heilsu- og umsorganartænastan visiterað til eldravinarligar íbúðir, má gerast ein skipan, har ávís metingarkriteriu eru ásett, eisini fyri at ikki at hava fleiri bíðilistar til somu íbúðir (at fólk skriva seg upp bæði hjá kommununi og t.d. Bústøðum).

Út frá omanfyri standandi verður mett skilabest í mun til tey bútilboð, ið heilsu- og umsorganartænastan skal veita, at røktaríbúðir og røktarheim verða bygd í somu bygging ella beint upp at.

Røktaríbúðir er í føroyskum samanhangi nýtt konsept, ið skal mennast, eitt nú í mun til samstarv við aðrar áhugapartar – eitt nú Bústaðir, byggivinnuna, fíggjarstovnar v.m. Røktaríbúðirnar, hóast bygdar saman við ella upp at einum røktarheimi, eru leiguíbúðir, og kunnu tí byggjast og umsitast við støði í tí, men har kommunan tryggjar sær fullan visitatiónsrætt.

Júst hvussu hetta kann gerast ella hvørjir samstarvshættir eru møguligir, eigur henda verkætlanartilgongdin at koma til niðurstøðu um.

Í virkisætlanini er víst á ein endurnýggjanartørv, tvs. antin dagføra ella niðurleggja verandi ótíðarhóskandi pláss. Víst er eitt nú á Ellisheimið, sum krevur umfevnandi dagføringar, ið illa loysa seg fíggjarliga. Verkætlanartilgongdin eigur eisini at fyrihalda seg til henda spurning m.a. við atliti at, hvussu hesi 27 búplássini kunnu endurnýggjast møguliga sum eitt lutfall millum føst røktarbúpláss og røktaríbúðir aftrat tí tørvi, sum røktarheimið annars skal røkka.

Í sambandi við bygging av nýggjum røktarheimi skal vælferðartøkni og snildtøkni (samskiftisútgerð, trygdar- og ávaringarskipanir) integrerast.

Til tess at seta hol á bygging av nýtt røktarheim, verður mett skilabest at seta bygginevnd við støði í mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur tveir nevndarlimir og borgarstjórin tilnevndi eitt umboð fyri ávikavist teknisku fyrisiting, miðfyrisitingin og trivnaðarfyrisitingina.

Bygginevndin skal sum tað fyrsta útvega byggiskrá og definera byggingina nærri í mun til støddir, luftfall røktarbúpláss, harundir eisini demensbúpláss, og røktaríbúðir, eins og at bygginevndin saman við politisku skipanini annars mennir ein samstarvshátt við aðrar áhugapartar í sambandi við bygging og umsiting av røktaríbúðum.

Til endamálið er neyðugt við játtan til fyrireikingar, ráðgeving v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at seta bygginevnd til sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi játta kr. 1 mió til fyrireikingar, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.

**Eldranevndin 02. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:**
Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini og at velja Bjørghild Djurhuus og Bergunn Kass í bygginevndina.

**Ískoyti:**
26 okt. 2017 samtykti býráðið at seta bygginevnd sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi at játta kr. 1. mió til fyrireiking, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.
Bygginevnd bleiv sett fyrst í hesum árinum og hevur havt tveir fundir. Bygginevndin metir, at arbeiðssetningurin er ikki nóg neyvur og ynskir tí at fáa ein greiðari arbeiðssetning, áðrenn nevndin kann fara víðari við arbeiðinum. Serliga verður hugsað um at fáa nágreinað, hvussu nógv húsfólk røktarheimið skal byggjast til.

Sambært nýggjastu framrokningunum hjá Hagstovuni verður mett, at tað vera 1.124 fólk eldri enn 80+ ár í Tórshavnar kommunu í 2025. Í 2018 er hetta tal 811 fólk. Fyri at nøkta vaksandi tørvin á røktarheimsplássum til ta tíð, er neyðugt at økja um búplássini.

Umframt at byggja til vaksandi tørv á búplássum, er – sum lýst í virkisætlanini (j.nr. 17/00586) og málslýsingini frammanfyri- ætlanin, at nýggja røktarheimsbyggingin skal vera við til at endurnýggja verandi pláss, sum eru ótíðarhóskandi, fyrst og fremst Ellisheimið.

Sum kunnugt verður umbyggingin av Tjarnargarði í løtuni projekterað, har pláss verður fyri 7 nýggjum umlættingarplássum til fólk við demenssjúku – arbeiðið verður eftir ætlan boðið út um stutta tíð. Harafturat verður umlættingar- og rehabiliteringsdepil við 28 plássum fyrireikaður. Tá hesar ætlanir eru komnar á mál, verða 9 av verandi plássum umløgd til føst búpláss.

Umframt omanfyri nevndu átøk, so verður mett neyðugt, at nýggja røktarheimið hevur 48 búpláss, t.e. tríggjar deildir við 16 húsfólkum á hvørjari deild eins og Lágargarður, umframt 8 røktaríbúðir. Hetta gevur í alt 56 pláss. Av hesum 56 plássum er ætlanin, at 25 av hesum er endurnýggjan av plássunum á Ellisheiminum, ið soleiðis kann niðurleggjast sum ellisheim.

Hesar ætlarnir tilsamans geva í 2025 eitt dekningsstig á 26,5% , sí talvu niðanfyri, og sum er eitt vet hægri enn dekningsstigið í dag.

| TÓRSHAVNAR KOMMUNA | Ár 2000 | Ár 2010 | Ár 2019 | Ár 2020 | Ár 2025 | Ár 2030 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkatal, 80+ ár | 457 | 669 | 850 | 906 | 1.124 | 1.415 |

**Pláss/Fólkatal 80+ ár (dekningsstig)**

| | Ár 2000 | | Ár 2010 | | Ár 2019 | | Ár 2020 | | Ár 2025 | | Ár 2030 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Pláss/Dekningsstig** | 97 | 21,2% | 155 | 23,2% | 222 | 26,1% | 251 | 27,7% | 298 | 26,5% | 298 | 21,1% |
| *har av røktarbúpláss* | 87 | 19,0% | 145 | 21,7% | 204 | 24,0% | 213 | 23,5% | 252 | 22,4% | 252 | 17,8% |
| *har av stutttíðarpláss* | 10 | 2,2% | 10 | 1,5% | 18 | 2,1% | 38 | 4,2% | 38 | 3,4% | 38 | 2,7% |
| *har av røktaríbúðir* | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 8 | 0,7% | 8 | 0,6% |

**Fólkatalsframrokning 80+ ár pr. 06.06.2018, hagstovan.fo*

**íroknað nýggjum Umlættingar- og rehabiliteringsdepli og útbyggingini av Tjarnargarði til demensdepil*

*Nýtt røktarheimi + endurnýggja plássini á Ellis-heiminum.*
*(+) 48 (-) 25 = 23 nýggj*
*(+) røktaríbúðir = 8 stk.*
*(+) eina lon afturat á 16 stk.*

Eitt nýtt røktarheim við 48 búplássum og 8 røktaríbúðum verður mett at vera skilagóð støðd, eisini sum rakstrareind. Búeindir á 16, sum ofta verður koyrt í 2, tvs. 8 og 8 á somu eind er eisini skilagóð støðd í mun til at fólk búgva saman.

Mett verður harafturat skilabest, at staðseting og byggingin er soleiðis háttað, at til ber at byggja røktarheimið út seinni.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og eindarleiðararnir í H og U mæla til at samtykkja fylgjandi arbeiðssetning fyri ætlanina:

At fáa til vega byggiskrá fyri bygging av nýggjum røktarheimi við 48 búplássum og 8 atknýttum røktaríbúðum, at staðsetingin og byggingin kann skipast soleiðis at tað lættliga ber til at útbyggja røktarheimið við einari ella tveimum deildum eftir tørvi.

**Eldranevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og staðsetingina í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at mæla býráðnum til at broyta byggiskránna fyri bygging av nýggjum røktarheimi til at fevna um 64 búpláss og 16 røktaríbúðir og at beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina viðvíkjandi staðseting.

**Ískoyti:**
Í sambandi við byggiverkætlanina at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum verður mett, at tørvur er á einum bygningi samsvarandi 6600 $m^2$ í byggistigi. Her er sum heild talan um ein bygning í tveimum hæddum, sum tó verður tilevnaður eftir tørvi og ynskjum, sniðgeving, innrætting og ikki minst hvussu bygningurin verður staðsettur í landslagnum. Tørvur er tískil á einum øki á í minsta lagi 11.000 $m^2$. Og verður hugsað um møguligar framtíðar útbyggingar, er talan um eitt samsvarandi størri øki.

Umsitingin hevur umrøtt spurningin um øki til eitt nýtt røktarheim við røktaríbúðum í tráð við býarplanleggingina, og vísir umsitingin á eitt øki úti í Marknagili í Tórshavn, sí kortskjalið "*Nýtt røktarheim við røktaríbúðum_kort*".

Um hugt verður eftir Marknagili sum býarparti, so er økið nógv broytt seinastu tíðina við stórum byggiverkætlanum, sum somuleiðis skapa nógv virksemi í økinum. Sambært kommunuætlanini er Marknagil ein býarpartsdepil, har býarvøkstur verður skipaður við at miðsavna ymiskt virksemi á einum stað. Í býarpartsdeplinum skal fram um alt vera virksemi sum handlar við gerandisvørum, stovnar, skúlar, útbúgving, býlingshús og mentanarligt virksemi.

Økið, sum umsitingin vísir á, er partur av ávegis heildarætlanini fyri økið við og omanfyri býlingin undir Fjalli. Skipanaruppskotið í heildarætlanini fevnir um infrakervi, bústaðarbygging og almennar stovnar, og er økið millum Dánjalstrøð og íbúðarbyggingina MARK lagt út til stovnsbygging. Eitt ellisheim hóskar væl inn í býarskipanina í økinum, og hóast økið liggur upp at einum høvuðsvegi, so verður bygt burtur frá ferðsluni í sera náttúruvøkrum umhvørvi, har byggingin somuleiðis tekur atlit til verandi lendið.

Í sambandi við skipanaruppskotið skal infrakervið í økinum víðkast. Dánjalstrøð gerst høvuðsvegur til nýggja útstykking, og í sambandi við eitt nýtt ellisheim er neyðugt at gera fyrsta strekkið av vegnum, sum er áleið 220 metrar. Ein yvirskipaður kostnaður er kr. 25.000 + mvg pr./m.

Økið er partur av Húsahaga, matr. 1160a, umframt matriklunum 1172a og 1176. Eitt hóskandi øki skal frámatrikulerast til endamálið, og er neyðugt við eini marknaumskipan, sum verður send Umhvørvisstovuni til avgreiðslu.

Økið liggur í økispartunum D1 og D3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum eru øki ætlað til almenning, náttúrufriðingar- og mentanar endamál, umframt stórum almennum stovnum til

umsiting, skúlaskap og heilsurøkt. Neyðugt er sostatt at broyta almennu byggisamtyktini til endamálið, umframt at serstøk byggisamtykt skal gerast fyri nýggju útstykkingina.

**Onnur mál, ið hava týdning fyri málið:**
Skipan av økinum oman fyri Marknagilsvegin og undir Fjalli, journal nr. 18/01811.

**Skjøl:**
Nýtt røktarheim við røktaríbúðum_kort, journal nr. 17/03196-15

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til prinsipielt at góðkenna staðsetingina, at umsitingin arbeiðir víðari við staðsetingini og myndugleikaviðgerð, at beina málið í eldranevndina til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Bjørg Dam, mælir til at finna aðra staðseting nærri sjónum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Eldranevndin 14. februar 2019:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Atkvøtt varð um uppskot frá borgarstjóranum um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ætlanina at staðseta nýtt røktarheim og gera nýggja vegaføring úti í Marknagili, hevur eigarafelagið á Dánjalstrøð sent kommununi mótmæli, har sjónarmiðini í høvuðsheitum eru:

- at neyðugt er at broyta byggisamtyktina til endamálið, tí økið liggur í økispartunum D1 og D3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Í hesum sambandi verður harðliga mælt ímóti, at býráðið ætlar at strika økið sum D1 øki, tí tey seinastu 30 árini hava tey innrættað seg eftir, at økið er lagt út til almenning, náttúrufriðingar- og mentanar endamál.
- at eigarafelagið í áravís hevur mótmælt, at ein av mest trafikeraðu vegum í landinum verður lagdur 2-3 metrar frá sethúsabyggingini á trøðni. At leggja ein somikið trafikeraðan veg á hetta D1 økið er so langt burtur frá hesum endamáli, sum til ber at hugsa sær, sí annars mótmælið.

Yvirskipaða ætlanin fyri økið undir Fjalli er samtykt, og verður mett, at staðsetingin til eitt nýtt røktarheim hóskar seg væl í hesum náttúruvakra økinum. Tá tosað verður um býarskipan, typologi og staðsetingar av hesum, verður í dag stórur dentur lagdur á at staðseta heim til eldri í einum nærumhvørvi við nógvum aktiviteti. Her verður serliga hugsað um dagstovnar, skúlar, handil við gerandisvørum eins og bústaðir. Ynski hevur verið frammi um at staðseta eitt røktarheim nærri sjónum, har dentur verður lagdur á eina hugsan um friðsælu. Í veruleikanum verður eitt heim nærri sjónum meiri avbyrgt, bæði í mun til ta fysisku planleggingina og nærveruna í sambandi við gerandislívið. Granskað hevur somuleiðis verið í einsemi hjá búfólki, og vísir granskingin, at nærveran við onnur menniskju hevur sera stóran týdning.

Talan er framvegis um eitt D1 øki, sum framhaldandi verður fríøki, fyri uttan tað økið, sum verður lagt av til sjálvt røktarheimið. Økið, har røktarheimið verður staðsett, verður í tilgongdini broytt til ásetingina D3, sum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er lagt av til miðstaendamál, umframt skúlar, almennar stovnar og íbúðir.

Arbeitt hevur verið við nýggju vegaføringini, sum er ein liður í eini størri ætlan fyri infrakervið kring Havnina. Leingi hevur ligið í kortunum og tað er somuleiðis av stórum týdningi og neyðugt, at eitt vegasamband millum komandi innkomuveg og Marknagil verður gjørt gjøgnum hetta grøna økið. Her er talan um ein kommunalan veg, og er ætlanin, at niðasti parturin av vegnum verður fyrsta stigið í ætlanini, sum somuleiðis verður atkomuvegur til nýggja røktarheimið. Vegurin verður í størst møguligan mun fluttur yvir ímóti grøna økinum fyri at skapa rúm ímillum veg og verandi bygging, og verða harumframt báðar áirnar varðveittar, sum tær eru í dag. Eftir ætlan leggur vegurin seg niður í lendið, og kemur hann soleiðis ikki at ávirka røktarheimið nakað serligt, umframt at tað verður møguligt at planta á økinum millum veg og útstykkingina, sum eigarafelagið umboðar.

Fyri røktarheims verkætlanina er tað av stórum týdningi, at staðsetingin fyri røktarheimið verður staðfest og samtykt, soleiðis at fyrireikingararbeiðið kann halda áfram. Somuleiðis skal kunnast um, at verður neyðugt at finna aðra staðseting og um hetta dregur út, so kemur hetta at ávirka upprunaligu tíðarætlanina fyri bygging av røktarheiminum. Mælt verður tískil til, at støða verður tikin til um ynski er at halda fast í staðsetingini úti í Marknagili ella um onnur staðseting skal finnast til røktarheimið.

**Skjøl:**
Eigarafelagið á Dánjalstrøð - mótmæli, journal nr. 17/03196-24.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at nevndin tekur støðu til, um ynski er at halda fast í staðsetingini úti í Marknagili ella um onnur staðseting skal finnast til røktarheimið, og um verandi staðseting verður samtykt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at halda fast við verandi staðseting og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, beinir málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina við atliti til at viðgera staðseting og vegatkomu.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt nýtt uppskot til staðseting av bygginini, soleiðis at byggingin verður flutt út í D3 øki, sum í mun til byggisamtyktina er lagt út til almennar stovnar.
Staðsetingin er tillagað vegaprosjekt, sum fyriliggja sum fyribils ætlanir. Tillagingar kunnu koma fyri, og má roknast við at tað verða tillagingar í mun til endaliga verkætlan.
Byggjast skulu uml. 6600 fermetrar, og er tørvur á einum byggiøki á 11000 fermetrar.
Íbindingarvegurin verður umskipaður, og vegaprosjekt skal gerast ísv. fyrireikingar av Røktarheiminum, soleiðis at linjuføringin er so skynsom sum til ber.

**Skjøl:**
17-031196-29 uppskot til staðseting januar 2020

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
at tikið verður undir við uppskotinum til staðseting í D3 økinum

at skipanaruppskot verður gjørt fyri økið,við vegalinjum og byggiøkjum.
at farið verður undir lýsa hvussu vit skulu byggja røktarheim í framtíðini.
at ein byggiskrá til nýtt røktarheim við røktaríbúðum verður gjørd.
at upp til kr. 700.000 verða játtaðar til omanfyri nevnda arbeiði.
Umframt at beina málið í eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Eldranevndin 06. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Hugt hevur verið eftir nýggjum staðsetingum til at byggja nýtt røktarheim og røktaríbúðir í Tórshavn, Hoyvík og Argjum. Tørvur er á einum øki á uml. 20.000 m$^2$ til at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum. Harafturat skal øki leggjast av til møguliga víðkan/útbygging av røktarheiminum og møguliga fleiri røktaríbúðum. Enn er óvist hvussu stórur tørvurin er á til víðkan/útbygging, men skal hetta nágreinast nærri í tilgongdini.

Høvuðsstaðurin er vaksin nógv, og torført er at finna hóskandi stór økir til endamálið. Neyðugt er tí at hyggja eftir økjum í útjaðaranum á býnum, sum eru partur av býartættingini og býarvakstrarøkjum, umframt teimum møguleikum, sum liggja inni í býnum.

Økið við Stórutjørn er sambært Kommunuætlanini fyrsta býarvakstrarøki, sum skal skipast til ein nýggjan býling í Tórshavn. Hoyvíkin er vaksin nógv seinastu árini, og við mongu íbúgvunum hevði eisini verið hóskandi at bygt eitt nýtt røktarheim í Hoyvík, tí einki er í økinum í dag. Kirkjugarður er skipaður í økinum, og við teimum alsamt fleiri vaksandi hentleikunum, hevði eisini ligið væl fyri at skipað bústaðir til eldru borgararnar í økinum.

Arkitektakapping var í vár um skipan av Stórutjørn, og skal endaliga skipanin og projekteringin setast í verk so skjótt játtan er tøk til hetta. Tá arbeiðið verður raðfest, eigur eitt hóskandi øki at verða sett av til nýtt røktarheim við  røktaríbúðum.

Skjal nr. 17/03196-33 lýsir Stórutjørn og hvat krevst fyri at fara inn á økið við einum røktarheimi.

**Skjøl:**
Staðseting_Stóratjørn, journal nr. 17/03196-33

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, Heilsu- og umsorganarstjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á økinum við Stórutjørn, at bygginevndin arbeiðir víðari við at nágreina tørvin á røktarheiminum og møguligum tilhoyrandi útbyggingum, og beina málið í býráðið umvegis eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Eldranevndin 10. september 2020:** Útsett.

**Eldranevndin 15. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Eldranevndini og meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, mælir til at finna aðra hóskandi staðseting nærri miðøkinum.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

# 189/20 Róðrarfelagið Knørrur : Umsókn um høli / grundstykki so felagið kann samla virksemið á einum stað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 278/18 | 17/03551-2 |
| 2 Vinnunevndin | 01.10.2018 | 38/18 | 17/03551-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 254/18 | 17/03551-2 |
| 4 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 272/18 | 17/03551-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 180/20 | 17/03551-2 |
| 6 Vinnunevndin | 29.06.2020 | 58/20 | 17/03551-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 233/20 | 17/03551-2 |
| 8 Vinnunevndin | 07.09.2020 | 68/20 | 17/03551-2 |
| 9 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 42/20 | 17/03551-2 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 180/20 | 17/03551-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 216/20 | 17/03551-2 |
| 12 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 189/20 | 17/03551-2 |

**Upprunin til málið:**
Umsóknir frá Róðrarfelagnum Knørrur (RK).

**Lýsing av málinum – samandráttur**
RK ynskir at fáa greiði á hvørt verkætlanin um livandi bátasavn í Evenens pakkhúsi kann gerast veruleiki og í øðrum lagi at fara undir tilgongd at fáa lendi til ein framtíðar bygning til virksemi felagsins.

Fleiri ferðir seinnu árini hevur kommunan viðgjørt hølisviðurskiftini hjá Róðrarfelagnum Knørri.

Róðarfelagið Knørrur (Knørrafelagið) húsast í verandi støðu við sínum bátum í niðastu hædd í Evensens Pakkhúsi, ið er í Gongin 11 (Ogn hjá Føroya landsstýri), umframt í Neystinum við Lágu Kaj (ogn hjá Tórshavnar kommuna). Harumframt hevur felagið felagshølir við venjingarútgerð í Tollbúðini á Eystaru bryggju (ogn hjá Tórshavnar havn)

Felagið hevur í frágreiðing (sí hjálagt) skrivað uppskot til framtíðar ætlanir í Evensens Pakkhúsi.

Í samskifti við løgmansskrivstovuna skilst at tað eru (ikki endaliga staðfestar) ætlanir um at gera Evensens Pakkhús um til verkstovu- og fundarhøli v.m. hjá Miðfyrisitingini. Hetta sum liður í størru ætlanini um at savna størri partar av Miðfyrisitingini í Tinganesi / Úti á Reyni. Tó ikki er greitt um so verður og hevur henda óvissa verið í fleiri ár uttan nakra niðurstøðu.

RK hevur samstundis í skrivi dagfest 27. oktober 2017 søkt Tórshavnar kommunu um lendið í Álakeri til at byggi nýggj neyst á. Talan er um lendið hjá Tórshavnar havn.

Visjónin um livandi bátasavn í Evensens pakkhúsi er serstøk og vildi havt eitt serligt virði fyri bæði økið har hon ætlandi verður og býin sum heild, umframt tað sermerkta í at okkara felagsmentanararvur kann vera varðveittur á henda hátt. RK mælir samstundis Tórshavnar havn til at umhugsa at arbeitt verður framímóti at føroyskir bátar so vítt tilber framyvir koma at liggja í bátahylinum á Kongabrúnni.

Á fundi við RK hevur TK og Tórshavnar havn spurt inn til um hvat felagið ynskir sær mest - at arbeiða víðari við Evensens pakkhús-verkætlanini ella fara undir tilgongd at finna lendið til nýtt felagshús. Felagið sigur greitt at verkætlanin í Evensens pakkhúsi er tað mest ynskiliga, og ynskir at TK formliga metir um TK sær seg vera partur av verkætlanini og møguliga kunna heita á landsstýrið um at fáa greiðu á um RK kann fáa tilsøgn um verkætlanina.

Um tað ikki ber á mál kann Tórshavnar havn og TK fara undir víðari tilgongd at finna hóskandi staðseting í økinum millum Álaker og Sandágerðisnes, har tað áður hava verið ætlanir um eina komandi frítíðarhavn.Havnameistarin metir ikki at tað er hóskandi at fara undir ta tilgongdina fyrrenn tað er greitt um felagið fær framt ætlanina í Evensens pakkhúsi.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Málið er lutvíst fyrireikað saman við Tórshavnar havn, ið metir at skilagott er at avklára viðurskiftini viðv. Evensens pakkhúsi áðrenn mál um aðra staðseting verður viðgjørt víðari.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál 17/04226 Evensens pakkhús sum livandi báta savn.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ikki viðkomandi.

**Umhvørvisárin**
Avmarkað.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at Tórshavnar kommuna heitir á landstýrið um at lata Róðrarfelagnum Knørri Evensens pakkhús til virksemi felagsins og verkætlanina livandi søgusavn. Málið verður beint í býráðið umvegis Byggi- og býarskipanarnevndina og Vinnunevndina.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og vinnunevndina.

Heðin Mortensen og Turið Horn vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Vinnunevndin 01. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Síðani seinastu samtykt hevur Knørrafelagið roynt at fingið avklarað við Løgmanskrivstovuna um møguleikar í Evensens pakkhúsi fyri verkætlanini. Enn er ógreitt hvørt verkætlanin ber á mál og tykist tað ikki vera eyðsýndur hugur til at geva felagnum tilsøgn um verkætlanina í hølunum.

Tískil metir felagið tað verða hóskandi at taka umsóknina frá felagnum um lendið í Álakeri upp til víðari viðgerð, samstundis um tað verður avklárað um verkætlanina í Evensens pakkhúsi verður veruleiki. M.a. kundi verið talan um lendið á matr. 970a sunnanfyri bygningin hjá Havnar róðrarfelag. Lendið er felags ogn hjá Tórshavnar kommunu og Tórshavnar havn.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heita á vinnunevndina um at farast skal undir samráðingar við Knørrafelagið um møguligan leigusáttmála um lendi til nýtt felagshús í Álakeri á økið sunnanfyri neystini hjá Havnar róðrarfelag ella annað hóskandi stað.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 29. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Umsitingin og Tórshavnar havn hava havt fund við umboð fyri Róðrarfelagið Knørrur (RK) um staðseting og innihald í einum framtíðar felagshúsi í nýggju frítíðarhavnini í Álakeri. Felagið hugsar sær ein bygning við eini ábygging á umleið 574 $m^2$ og lutvíst í tveimum hæddum. Felagið hevur skotið upp staðseting, sum framgongur á hjálagda skjali og ein bygning, ið hevur umleið hetta skapið/geometri.

Økið innanfyri bryggjukantin í frítíðarhavnini er ikki ráðlagt liðugt enn og tí verður uppskotið frá RK at taka við í ta tilgongdina, ið Tórshavnar havn og býarskipanardeildin koma at fyrireika í heyst. Marknaviðurskiftini í økinum er ikki komin heilt uppá pláss og eru ein fyritreyt fyri hesum máli, umframt at endalig ráðlegging av økinum innanfyri bryggjukantin eisini skal gerast.

Ein framtíðar bygging vil innibera, at felagið kemur at søkja um íløgu- og mentanarstuðul frá kommununi til bygging. Hetta verður væntandi í 2021 og meiri sannlíkt í 2022 og tí viðkomandi at taka hædd fyri tí í fíggjarætlanini, alt eftir nær felagið er klárt at fara víðari.

**Tilmæli:**
Havnameistarin, trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla vinnunevndini til at samtykkja at fara í realitetssamráðingar við RK um staðseting av bygningi í frítíðarhavnini í Álakeri og tilhoyrandi leigumál um lendi. Málið verður beint til ummælis í mentamálanevndini, byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd, og síðani í fíggjarnevndina.

**Vinnunevndin 07. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó uttan at verkætlanin hjá Róðrarfelagnum Knørrur í Eventsens pakkhús verður slept.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndni.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

# 190/20 Lopgrøv í Fimi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 88/19 | 19/00719-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 67/20 | 19/00719-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 98/20 | 19/00719-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 14.09.2020 | 243/20 | 19/00719-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 222/20 | 19/00719-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 190/20 | 19/00719-1 |
| 7 Býráðsfundur | | | 19/00719-1 |

**Upprunin til málið:**
Áheitan frá foreldrum at elituíðkarum innan fimleik.

**Samandráttur**
Fimleikahøllin Fimi var tikin í nýtslu í 2011. Høllin er karmur um m.a. 2 hallir til estetiskan fimleik og eina stóra høll til amboðsfimleik. Høllin er sera nógv brúkt bæði av fimleikafeløgum, dagstovnum, skúlum og frítíðarskúlum. Hvønn dag koma hundraðtals fólk í høllina.

Innan fimleikin er stór menning og herundir eru nú tveir fimleikarar, ið eru á danska landsliðnum í amboðsfimleiki. Til tær greinirnar hoyrir lopgrøv, ið skal taka stoytin tá ymisk lop o.a. vera gjørd. Við verandi hentleika er vandi fyri skaðum, meðan ynski er um at fáa eina lopgrøv við skúmkubbum, ið betri tekur stoytin tá lopið verður. Meginavbjóðingin er, at slík loysn vil innibera stóran vanda fyri at børn søkka niður í kubbagrøvina, ið er umleið 2 metur djúp og tá kann vera stórur vandi fyri trygdarhendingum, tí annar persónur kann koma av óvart at leypa omaná persón í grøvini.

**Lýsing av málinum**
Ítróttaanlegg hevur kanna loysnir í dialogi við fimleikaumhvørvið og er komin eftir at besta loysnin er frá týska veitaranum Spieth Gymnastics umboðað í Føroyum av Eikini P/F. Sí hjálagt tekning av loysnini og avrit av tilboðnum, umframt myndir av økinum/høllini.
Uppsetingin sum sýnt í tekningini er mett til umleið 800 tkr. íroknað frakt og uppseting. Harumframt inniheldur tilboðið onnur amboð, ið er uppá tal at fáa endurnýggja komandi 2-3 árini fyri umleið somu upphædd.

Ítróttaanlegg metir at henda loysnin er nøktandi bæði funktionelt og við atliti til rakstur og trygd.

Fíggingin av hesi verkætlan rúmast ikki innanfyri raksturin av konto 5717 Ítróttaanlegg. Annar møguleiki er fígging av kontuni til Smærri ítróttaanlegg, sí mál 19/00144 Játtan í 2019 til smærri ítróttaanlegg.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sí skjøl.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Verður fíggingin játtað yvir kontu 5775 Smærri Ítróttaanlegg, er kontan so at siga uppbrúkt fyri árið.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongir.

**Umhvørvisárin**
Avmarkað.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið er ikki viðgjørt enn við byggideildina.

**Skjøl**
Tilboð frá veitara.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
TK hevur verið í samskifti við Føroya Fimleikasamband umframt Ljósið og Havnar Fimleikafelag um málið, umframt at onnur í umhvørvinum eisini hava gjørt vart við sjónarmið viðv. møguleikunum og trygdini kring fimleik í fremstu røð.

Ljósið og Havnar Fimleikafelag meta, at tað er mest hóskandi at útvega eina samansetta loysn, ið ger tað møguligt at venja amboðsfimleik í fremstu røð, umframt at annað virksemi kann vera í Fimi undir tryggum umstøðum. Hetta er treytað av neyðugari fígging á uml. 800 tkr. Um henda ikki er tøk í ár ella seinni, verður mett mest hóskandi at bíða við broytingum í viðurskiftunum. Hetta primert fyri framhaldandi at geva breiða virkseminum í Fimi hóskandi umstøður.

Fígging er ikki tøk til endamálið í 2020, men kundi verið umhugsað at sett pening av í fíggjarætlanini fyri 2021.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um málið skal fyrireikast víðari og um fígging skal setast av til eina serstaka tekniska loysn til lopgrøvina í Fimi í fíggjarætlanini fyri 2021.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
TK hevur nú fingið skrivligt tilmæli frá Føroya fimleikasamband, ið hevur viðgjørt málið við Havnar fimleikafelag og fimleikafelagið Ljósið.

*"Tilmæli til nýggja grøv í FIMI, Tórshavn.*
*Føroya Fimleikasamband, Fimleikafelagið Ljósið og Havnar Fimleikafelag hava í felag gjørt eitt tilmæli til nýggju grøvina í FIMI.*

*Í samband við, at støðið hjá okkara bestu fimleikarum í Føroyum er hækkað, er tørvurin til fimleikaútgerð í FIMI eisini broyttur. Vit ynskja tí at fáa eina opna skúm grøv við endan á hestinum. Grøvin skal nýtast av kappingaríðkarum í øllum aldursbólkum.*

*Vit meta, at FIMI er fyri fimleikin. Tí er ein rúmlig loysn sjálvandi vælkomin, so at breiddaríðkarar eisini kunnu nýta grøvina, og møguleiki eisini verður at dekka grøvina til í øðrum venjingarhøpi.*

*Í mun til trygdina og viðlíkahald av núverandi og komandi útgerð, ynskja vit at veita frálæru hvussu amboðini verða brúkt. Frálæran er m.a. ætlað til dagstovnar, skúlar og venjarar sum nýta FIMI. Á hendan hátt verður farið betur við amboðnum, samstundis sum tey verða brúkt rætt og trygdin er í lagið.*

*Vit hava eina 10 ára ætlan, har vit ynskja støðugt at lyfta støðið á landsliðnum hjá kvinnum og monnum í amboðsfimleiki. Vónandi verða Oyggjaleikir í Føroyum í 2029, har vit kunnu luttaka við einum framúrskarandi liði, sum hevur fingið íblástur frá okkara núverandi íðkarum, sum í ár til hvørja kapping hava skrivað fimleikasøgu. Somu íðkarar hava í ár møguleika at luttaka til altjóða kappingar umvegis danska landsliðið, og grøvin er ein liður í hesum spennandi málsetningi."*

Sí hjálagt tekning yvir amboðshøllina í Fimi, ið sýnir hvat ymisku amboðini v.m. eru.

Ítróttaanlegg tekur undir við tilmælinum og mælir til at útvega eina loysn, ið kann uppfylla ynskini hjá fimleikaumhvørvinum. Kostnaðarmetingin er framvegis umleið tann sama sum nevnd í málinum.

Ítróttaanlegg fer eisini at leggja eina ætlan saman við fimleikaumhvørvinum, ið betri tryggjar frálæru til dagstovnar og skúlar um munagóða og trygga nýtslu av amboðshøllini í Fimi.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um málið skal fyrireikast víðari og um fígging skal setast av til eina serstaka tekniska loysn til lopgrøvina í Fimi í fíggjarætlanini fyri 2021.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við at arbeiða víðari við at gera eina lopgrøv og at fíggingin verður tikin upp í sambandi við fíggjarætlanina 2021.

**Ískoyti**:
Ljósið og Havnar Fimleikafelag meta, at tað er mest hóskandi at útvega eina samansetta loysn, ið ger tað møguligt at venja amboðsfimleik í fremstu røð, umframt at annað fjølbroytt virksemi kann vera í Fimi undir tryggum umstøðum. Hesum tekur Ítróttaanlegg eisini undir við.

At útvega slíka loysn verður mett at kostað uml. kr. 1 mió.

**Tilmæli**
Kommunustjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at útvega samansetta loysn við nýggjari lopgrøv í FIMI og til endamálið at játta kr. 500.000 av kontu 5310 Mentanartiltøk og kr. 500.000 av kontu 6275 Fríðkan av býnum (projektkontu L62035 vetrarfriðing) til kontu 5717 Ítróttaanlegg.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð. Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 191/20 Tilmæli av limum í Leiklistaráðið 2020 til 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.08.2020 | 168/20 | 20/02637-4 |
| 2 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 191/20 | 20/02637-4 |

**Málslýsing:**
Sbrt. § 2. Í Ll. nr. 68 frá 2. mai 2003 um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m. skal Tórshavnar kommuna tilnevna ein lim til leiklistaráðið. Landsstýrismaðurin í Uttanríkis- og mentamálum setir nevndina, ið hevur 7 limir. Virksemi ráðsins er nærri lýst í § 3 og 4 í lógini.

Víst verður til fundarskipan hjá Tórshavnar býráð **MEIRILUTAVAL § 15,** ið er soljóðandi:

*"1. petti. Tá ið býráðið skal velja 1 umboð ella 1 lim í nevndir, stjórnir ella tílíkt, fer slíkt val fram eftir meirilutavalháttinum.*

*2. petti. Við meirilutavali verður sipað til ein valhátt, har tað valevni, ið fær meir enn helmingin av atkvøðunum, er valt. Fæst tílíkur meiriluti ikki við fyrstu atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt umaftur. Fær heldur eingin meiriluta hesa ferð, verður bundið val ímillum tvey teirra, ið fingu flestar atkvøður. Stendur á jøvnum hjá fleiri enn tveimum valevnum, verður lutakast um, hvørji tey tvey skulu verða, sum endalig atkvøðugreiðsla tá verður um. Fær hvørgin teirra meiriluta hesa ferð, verður lutakast, sum borgarstjórin skipar fyri. Er borgarstjóri ikki valdur, skipar fyrst valdi limurin fyri hesum lutakasti."*

Kommunan er biðin um at tilnevna eina kvinnu og ein mann soleiðis, at landsstýrismaðurin hevur møguleika fyri at seta eina nevnd í tráð við javnstøðulógina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at tilnevna ein persón.

**Býráðsfundur 25. august 2020:** Valdur varð Jóan Petur Hentze.

**Ískoyti:**
Uttanríkis- og mentamálaráðið heitir á kommununa um at tilnevna eina kvinnu og ein mann í Leiklistaráðið soleiðis, at landsstýrismaðurin hevur møguleika fyri at seta eina nevnd í tráð við javnsstøðulógina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at tilnevna eina kvinnu og ein mann.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Tórshavnar býráð tilnevnir Eyðfríð Jacobsen og Jóan Peteur Hentze.

## 192/20 Fyribils avtala um skúlabygningarnar á Frælsinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 179/20 | 20/01843-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 171/20 | 20/01843-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 223/20 | 20/01843-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 221/20 | 20/01843-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 192/20 | 20/01843-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 07.10.2020 | 271/20 | 20/01843-1 |

**Upprunin til málið:**
Skúlin á Fløtum flytur úr bygninginum á Frælsinum

**Lýsing av málinum**
Nú Skúlin á Fløtum flytur úr skúlabygninginum á Frælsinum í heyst, er neyðugt at gera eina ávegis avtalu um viðurskiftini í skúlabygninginum og felagsognina.

Tórshavnar kommuna eigur lon 4, meðan restin av bygninginum er felagsogn millum land og kommunu. Haraftrat er partur av undirvísingaramboðum, útgerð og innbúgvi eisini felagsogn í lutfallinum 60/40.

Samráðingar við landsmyndugleikarnar um framtíðar ognarviðurskiftini eru ikki komnar á mál enn. Verandi avtala um felagsútreiðslur er galdandi og ber í sær, at Tórshavnar kommuna rindar uml. 150 tkr./mánaðin til raksturin av samognini og lon 4. Upphæddin er til el, hita, reingerð og skúlatænarar umframt til amboð, útgerð og innbúgv. Frá 1. september 2020 er eingin fígging sett av til endamálið, tí tá skuldi alt hjá Skúlanum á Fløtum verið riggað av, og roknað var við, at avtala um yvirtøku var gjørd.

Umsitingin hevur verið á fundi við Setrið og Skúlan á Fløtum um ymisk viðurskifti, nú flutt verður, og hvussu farast skal fram, nú felagsognin skal býtast.

Ætlanin er, at skúlarnir gjøgnumganga í felag fimleikahøll, smíð, lívfrøði, og alis- og evnafrøði, aulu, ha/li og finna útav, hvussu býtast skal. Eru ivamál um okkurt innbúgv, útgerð ella amboð verður kannað, um tað er goldið av játtanini til felagsútreiðslur, og sostatt er partur av felagsognini, ella annar parturin hevur goldið 100%.

Bókasavn, tónleikur og køkur eru býtt sundur, so har eru ikki ivamál um, hvør eigur hvat.

Tórshavnar kommuna eigur ein part av listini í bygninginum, og tann parturin er skrásettur, haraftrat er ein partur samogn. Umboð fyri Setrið og umboð fyri Tórshavnar kommunu fara at gjøgnumganga listina í felag, og so verður tann parturin, sum er felags, býttur millum partarnar.

Nøkur av reingerðarfólkunum á Frælsinum, sum eru sett á Setrinum, vilja fegin flyta við út á Fløtur, og í samráð við Setrið ynskir Skúlin á Fløtum at taka tey við.

Sambært avtalu millum Arbeiðskvinnufelagið og Tórshavnar kommunu skulu partarnir samráðast um, hvør samsýningin skal vera, tá arbeiðsøkið veksur ella minkar munandi. Kommunan hevur tikið stig til hesar samráðingar, nú Skúlin á Fløtum flytur í nýggja bygningin, og arbeiðsøkið tí broytist.

Nú Tórshavnar kommuna ikki fer at brúka bygningin, er neyðugt at avmarka útreiðslurnar av honum mest møguligt, og tí verður biðið um heimild at gera ávegis semju við Setrið um bygningin, sum er galdandi til

verandi sáttmáli um býtið av felagsútreiðslunum er farin úr gildi, og endalig semja er gjørd í gerðarbýtismálinum, har samráðingar eru í gongd og væntandi koma á mál seinni í ár.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Sáttmáli um felagsútreiðslur

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Einki at viðmerkja

**Umhvørvisárin**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Sáttmálin um felagsútreiðslur er hjálagdur

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini:

1). at samráðast um fyribils brúksavtalu við setrið til kommunurnar part av samognini, umframt lon 4
2). at samráðast um býtið av leysafæi, list v.m. í samognini
3). at yvirtaka fýra reingerðarfólk

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Viðv. leysafæi, amboðum o.l.
Partarnir hava viðgjørt viðurskiftini og metir umsitingin saman við skúlaleiðsluni at eitt boð uppá virði er ca. 650 tkr., ið so antin kann býtast ella at setrið rindar kommununi umleið 300 tkr. antin við ikki at krevja samognargjald frá umleið heystferiuni ella beinleiðis endurgjald. Avbjóðingin er at setrið ikki hevuri tikið hædd fyri hesum í rakstrinum og ikki hevur fingið avklåring um møguliga eykajáttan við avvarðandi stjórnarráð. Um ikki onnur niðurstøða kemur um fígging verður neyðugt at býta á frægasta vís.

Viðv. list
Partarnir hava gjøgnumgingið listina í bygninginum og eru komin ásamt um hvør list hoyrir til setrið/landið og TK og hvør list er partur av samognini og hvussu hon skal býtast. Sí hjálagt fundarfrágreiðing frá ástaðarfundinum.

Viðv. reingerðarfólki
Sbrt. avtaluni verða hesi yvirtikið av Skúlanum á Fløtum/TK. Tilgongdin er byrjað.

Viðv. brúksrætti hjá setirnum til Ion 4 og TK part av samognini
Partarnir eru principielt samdir um at setrið pr. 15. oktober kann setrið brúka nærum alla samognina og Ion 4 og samstundis ikki krevja KT eftir gjaldi fyri samognarraksturin, men avbjóðingin er at setrið manglar fígging.

Pr. 1. Januar 2021 fer samognaravtalan úr gildi og vil tað krevja at ein avklåring fæst við landið um ognirnar. Ógreitt er nær næsti fundur verður viðv. yvirtøku av samognini.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at gera avtalu um listarbýtið við setrið
b). at heimila umsitingin at antin at gera semju við setrið um endurgjald á 300 tkr. ella at býta leysafæ, amboð.
c). at setrið bert fær atgongd til kommununar part av samognini um hóskandi semja fæst um tað t.d. at setrið rindar allar útreiðslurnar.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla fíggjarnevndini til at taka undir við mentamálanevndini við tí ískoyti, at er eingin avtala fingin við landið innan 1. januar 2021 um framtíðar ognarviðurskiftini av skúlanum, skal rindast marknaðarleiga fyri tann partin av ognini, ið kommunan eigur, sum landið fær atgongd til sambært pkt. C í tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við pkt a og b í tilmælinum og viðv. pkt c, skal semja fáast um samognina áðrenn nakar fær atgongd til kommununnar part av samognini.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutan í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

## 193/20 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 176/16 | 16/01715-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 266/16 | 16/01715-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 405/16 | 16/01715-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 281/16 | 16/01715-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 30.11.2016 | 309/16 | 16/01715-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 29/17 | 16/01715-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 15.03.2017 | 46/17 | 16/01715-2 |
| 8 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 169/17 | 16/01715-2 |
| 9 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 206/17 | 16/01715-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 236/17 | 16/01715-2 |
| 11 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 276/17 | 16/01715-2 |
| 12 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 311/17 | 16/01715-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 83/18 | 16/01715-2 |
| 14 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 189/18 | 16/01715-2 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.08.2018 | 176/18 | 16/01715-2 |
| 16 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 264/18 | 16/01715-2 |
| 17 Mentamálanevndin | 03.10.2018 | 296/18 | 16/01715-2 |
| 18 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 348/18 | 16/01715-2 |
| 19 Mentamálanevndin | 10.12.2018 | 378/18 | 16/01715-2 |
| 20 Fíggjarnevndin | 13.12.2018 | 372/18 | 16/01715-2 |
| 21 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 315/18 | 16/01715-2 |
| 22 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 107/19 | 16/01715-2 |
| 23 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 119/19 | 16/01715-2 |
| 24 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 93/19 | 16/01715-2 |
| 25 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 127/19 | 16/01715-2 |
| 26 Mentamálanevndin | 24.08.2020 | 216/20 | 16/01715-2 |
| 27 Fíggjarnevndin | 25.08.2020 | 200/20 | 16/01715-2 |
| 28 Býráðsfundur | 25.08.2020 | 167/20 | 16/01715-2 |
| 29 Fíggjarnevndin | 23.09.2020 | 242/20 | 16/01715-2 |
| 30 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 193/20 | 16/01715-2 |

**Málslýsing:**
Sum liður í framtíðar gerð av langhyli (50 m.) (sí mál 15/01400 – Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl) við síðuna av Svimjihøllini í Gundadali, hevur umsitingin innleiðandi havt dialog við Ítróttasamband Føroya (ÍSF) um møguliga niðurtøku av ÍSF-húsinum, ið stendur á kommunalum lendi matr. 1268 í Gundadali. Leiguavtalan er frá 1975 (sí hjálagt fylgiskjal 1 á nevndarportalinum).

Gjørt er uppskot til keypsavtalu (sí hjálagt fylgiskjal 2 á nevndarportalinum). Tó viðv. keypsupphædd ella endurgjald fyri niðurtøkuna hevur ikki verið nøkur realitetsviðgerð. Fyri at fáa ásett eina upphædd eru tvinnir møguleikar. Hin fyrri at samráðast til eina semju og hin seinni er sbrt. ásetingum í leiguavtaluni at biðja Sorinskrivarin um at tilnevna tveir metingarmenn sum so áseta eina bindandi upphædd.

Harumframt er gjørt uppskot til ætlanarskriv um staðseting av framtíðar ÍSF-húsi (sí hjálagt fylgiskjal 3 á nevndarportalinum). Her er nevnt viðv. møguleika fyri at byggja nýtt høvuðssæti omaná Fimi í Gundadali,

sbrt. nærri treytum um byggistig, byggisnið, gjald fyri íbindingar vm. Hesin rættur skal vera galdandi í ávíst áramál.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, løgdeildarleiðarin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða spurningin um framtíðar staðseting í Gundadali og at heimila umsitingini at fara undir samráðingar um endurgjaldsupphædd antin við samráðingum ella metingarmonnum.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um samráðing.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur samráðst við ÍSF og er nú komið ásamt um eina keypsavtalu og ætlan um leigu av byggigrund omaná Fimi innan nærri ásett áramál. Alt hetta treytað av at undirtøka var fyri hesum í nevndum og býráðnum og á aðalfundi hjá ÍSF.

Hjálagt eru dagført skjøl við støði í fundinum og teirri semju viðv. endurgjaldi fyri ÍSF-húsini.

Keypið skal fíggjast á løgukarminum fyri 2018.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og løgdeildarleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja uppskot til keypsavtalu og uppskot til ætlanarskriv um leigu av byggigrund omaná Fimi og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 02. november 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 30. november 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson og Sigrún Mohr, tekur undir við at gera keypsavtalu fyri í mesta lagi kr. 4 mió, men tekur ikki undir við at leiga ÍSF byggigrund omaná Fimi.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir til, at málið verður lagt fyri nýggja býráðið til støðutakan.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt at beina málið í mentamálanevndina.

**Ískoyti**
Nú er nakað fráligið síðani samráðingarnar við ÍSF. Mett verður hóskandi at fara undir eina nýggja tilgongd og har kanna nærri um aðrar staðsetingar eru møguligar umframt bygging omaná Fimi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara undir nýggjar samráðingar við ÍSF við atliti til keypsupphædd o.a. fyri verandi ÍSF-hús og møguligar framtíðar staðsetingar av virkseminum hjá ÍSF.

**Mentamálanevndin 15. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Býarskipanardeildin/tekniska fyrisiting hevur gjørt eina sonevnda volumenkanning viðv. í hvønn mun eitt møguligt ÍSF-hús yvirskipað kann rúmast á ymiskum støðum í Gundadali. Dømini eru at síggja í hjáløgdu fílu.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá uppskotunum. Ætlandi halda samráðingarnar við ÍSF fram í september og ætlandi kann ein loysn leggjast til støðutakan í oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðari mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotini við atliti til at umsitingin heldur fram við samráðingunum við ÍSF.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Umrøtt.

Halla Samuelsen ynskir at ÍSF verður boðið á fund við mentamálanevndina at greiða frá sínu støðu.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti 8. november 2017**
Greitt verður frá fyribils status í samráðingunum og fráboðan frá ÍSF um, hvørji støð tey nú ynskja at realitetsforhandla um.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin heldur fram við samráðingunum.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, mælir til at arbeiða víðari við eini loysn frá vestara skýli oman móti niðara vølli sum fyrsta val.

Halla Samuelsen ynskir at ÍSF verður boðið á fund við mentamálanevndina at greiða frá sínu støðu.

**Ískoyti**
Fyri at kunna lýsa eini loysn frá vestara skýli oman móti niðara vølli er neyðugt at gera eitt sonevnt volumenstudie, har kannað verður um økið rúmar einum nærri hugsaðum bygningi. Býarskipanardeildin hevur ikki orku til at gera arbeiðið í løtuni. Fyri at koma víðari er hugsanin at biðja uttanhýsis ráðgeva um at gera arbeiðið. Er mett til ca. 2 dagar. Ætlanin er at at fáa uttanhýsis ráðgeva at gera kanningina og at tað verður fíggjað 50%/50% millum kommununa og ÍSF. Útreiðslurnar hjá kommununi vera fíggjaðar av konto 5365 Stuðul til ítrótt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í mun til tilmæli seinast er tann broyting, at ÍSF sjálvt átók sær at gera eitt uppskot saman við ráðgeva sínum Sp/f MAP ark. Sí hjálagt uppskot frá ÍSF. ÍSF hevur í hyggju innleiðandi at umrøða uppskotið við HB og B36, ið eru tveir høvuðsáhugapartar í mun til ovara vøll og skýlið.

Eftir umrøðuna í mentamálanevndini verður spurningurin um staðseting við ovaravøll í Gundadali beindur til viðgerðar í Bygg- og býarskipanarnevndini. Hareftir verða møguligar samráðingar við ÍSF tiknar uppaftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið og at samtykkja at beina spurningin um staðsetingna til viðgerðar í Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í teknisku nevnd eisini.

**Ískoyti:**
Ítróttarøkið í Gundadali er karmur um fleiri ítróttargreinar og aktivt virksemi, sum støðugt veksur, og ynskini um betri umstøður, ábøtur ella nýggjar funktiónir vaksa somuleiðis alsamt meira. Plásstrot er í Gundadali, men fleiri møguleikar eru at víðka um virksemi, anlegg og útbyggingar/nýbyggingar.

Tá talan er um nógv ymiskt virksemi og bygging innan eitt avmarkað øki, so er neyðugt at hyggja at, hvørjir møguleikar eru at sameina nýbygging við verandi bygging, soleiðis at meira lendi ikki verður tikið til nýbyggingar. Gott er at hava «luft» rundan um og ímillum ymsu bygningarnar, hetta m.a. til gøtusamband, parkering og fríøki.

Nógvar ábøtur eru gjørdar í Gundadali, men enn eru nakrir bygningar, ið kundu verið umvældir. M.a. er tað skýlið á vestursíðuni við ovara vøll, sum í dag er ein baksíða út ímóti býnum. Skýlið er eyðkent við eini langari einsháttaðari framsíðu upp at einum óskipaðum parkeringsplássi. So heldur enn at spjaða meiri bygging í økinum, er eyðsýnt at staðseta og flætta saman nýtt ÍSF við verandi skýlið, soleiðis at alt økið verður skipað og fríðkað um. Hetta er ein leistur, ið átti at verið nýttur í sambandi við framtíðar víðkanir og ábøtur í Gundadali, tí fleiri møguleikar eru at gagnnýta pláss, har tað samstundis verður betra um verandi øki.

Ítróttasamband Føroya er somuleiðis høvuðssætið fyri alla ítróttina, tískil er staðsetingin og nógva plássið í økinum væl egnað til ein miðdepil, sum ÍSF er. Verandi atkoma til økið gerst samstundis til eina greiða høvuðsinngongd til Gundadal, umframt at ÍSF fær útsýnið út yvir alt ítróttarøkið - og ítróttina.

Nýggja staðsetingin er partur av ítróttaøkinum í Gundadali, og er tí fevnt av umráðispartinum D2 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

> *3. Umráðispartarturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka undir við staðsetingina til nýtt ÍSF hús, og at beina málið aftur í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið í samráðingum við ÍSF um málið. Grundarlag tykist nú vera fyri semju við ÍSF um málið, herundir endurgjald fyri ÍSF-húsið og nær húsið verður tikið niður, umframt prinsipsemja um staðseting av nýggjum húsi og treytirnar fyri tí.

Sí hjálagt uppskot til avtalur við ÍSF, ið nú skulu til endaligt samráðingarumfar.

Keypsvtalan inniber at TK skal rinda ÍSF 5.000 tkr. fyri ÍSF-húsið. Í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2019 ella 2020 skal henda upphædd setast av á fíggjarætlanini.

Avtalan um nýggju staðsetingina vil innibera at TK skal fíggja ávísar útreiðslur í sambindingini millum nýggja ÍSF-húsið og Ovara skýlið. Hesar vera neyvari mettar í sambandi við at ÍSF og tess ráðgevi gera disposiónsuppskot. Harumframt ynskir ÍSF at TK avklárar jarðfrøðiliga váðan í sambandi við bygging á økinum ella kompenserar fyri tað. Umsitingin er í holt við at kanna hetta og fyriliggur ein avkláring ætlandi innan 2 vikur. Sostatt eru útlit fyri endaligari semju við ÍSF innan fáar vikur. Fundur er í umboðstinginum hjá ÌSF 9. okt. og er ætlan at tá skal endalig semja fyriliggja.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin kunna um gongdina í samráðingunum.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur.

**Mentamálanevndin 03. oktober 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Viðv. byggiøkinum sunnanfyri skýlið og parkeringsøkið vestanfyri

Umsitingin hevur samskift við P/F LBF, ið eisini stóð fyri projektering og eftirlitið í sambandi við arbeiðið í sjeytiárunum fyri at fáa meiri at vita um ætlaða byggiøkið. Felagið upplýsir, at mastrafundamentini við vestara skýlið eru funderað á hellu og at tá niðari vøllur varð dagførdur fyrst í 90 inum bleiv hella sprongd burtur í útnyrðingshorninum-niðan móti ovara vølli. Felagið heldur harumframt, at tá skýlið og p-plássið vóru gjørd, at alt bleytt tilfar varð grivið burtur niður á fastan botn, fastan leir/ hellu og fylt uppaftur við gróti.

Við støði í hesum tykist vera greitt (við tí fyrivarni slíkar metingar um jarðfrøðilig viðurskifti altíð vilja hava!) at tað skuldi verið rímiliga líkatil at fara undir bygging har.

Viðv. sambyggingini av bygningunum
Sp/f MAP er ráðgevi hjá ÍSF og metir felagið at serligu kostnaðirnir fyri sambyggingina við ovara skýlið eru umleið 3.000 tkr., umframt útreiðslurnar til byggibúning sunnanfyri á 550 tkr.

Hjálagt eru dagførd skjøl t.e. skjeyti og ætlanarskriv um leiguavtalu.

Sbrt. avtaluni flytir ÍSF úr ognini í 2020. Neyva tíðspunktið verður ásett til at vera í seinasta lagi 1. juni 2020. Gjaldið fyri húsið verður at rinda í seinasta lagi við útflytning, meðan kostnaðurin fyri sambyggingina av nýggja ÍSF-húsinum, við skýlið við ovara vøll, fellir tá ÍSF fer undir byggingina. Hetta er enn óvist og helst gongur nakað av tíð, áðrenn tað verður farið undir tað. Í ætlanarskrivinum er ásett, at ÍSF skal vera farið undir bygging innan 2024.

**Tilmæli**:

Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamála-nevndini til at taka undir við at kommunan gerð avtalu við ÍSF um keyp av ÍSF-húsinum og ætlanarskriv um leiguavtalu. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
ÍSF ynskir at skeytið verður treytað av at avtala er inngingin um leigusáttmála um bygning á leigari grund við skýlið við ovara vøll. Hetta gerð at ÍSF skal vera nakað fyrri við sínum fyrireikingum, men annars mett í lagi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at kommunan gerð avtalu við ÍSF um keyp av ÍSF-húsinum og ætlanarskriv um leiguavtalu. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. desember 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Í næstum skal Tórshavnar kommuna, samsvarandi samtyktini í málinum, at skriva undir treytað skeytið um keyp av ÍSF-húsinum, við yvirtøku á sumri 2020. Mett verður hóskandi at játta fíggingini til keypið á 5.000 tkr., umframt tinglýsingargjald á 1% av keypsupphæddini, í inniverandi ári.

Samráðingar fara í næstum í gongd við ÍSF um endaligan leigusáttmála um lendið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 5.050 tkr. av tøkum peningini. Málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Annfinni Brekkstein: Mælt verður til at veita ÍSF stuðul við tí endamáli at taka húsið niður.

Broytingaruppskotið fall við 5 atkvøðum fyri, 7 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Bjørg Dam.

Imóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Samtykt við aðru viðgerð við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jógvan Arge, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Halla Samulsen

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**:
Í fjør samtykti býráðið treytað skeyti og ætlanarskriv við ÍSF. ÍSF er ikki komið á mál við innanhýsis tilgongdini hvørt felagsskapurin byggir nýtt høvuðssæti við Ovara vøll í Gundadali.

Fyri at tryggja at ætlanin um bygging av langhyli kann byrja og fyri at ÍSF kann fáa eitt sindur longri skotbráð til at avgera spurningin um nýtt høvuðssæti, var í juli 2020 var fundur millum ÍSF og TK í sambandi við málið um staðseting av nýggjum ÍSF-húsi.

ÍSF er ikki enn komið á mál við tilgongdini um nýtt ÍSF-hús. Av tí at tað ikki er endaligt, um ÍSF vil byggja við Ovara vøll ynskir felagsskapurin at kunna kapitaliserað tað virði, sum annars lág í virðinum í ætlaðu staðsetingini (byggibúning og sambygging). Hetta var í 2019 mett til 3,55 mio.kr. ÍSF hevur tí ynski um at leingja skotbráðið til at fara undir bygging eitt ár afturat í mun til áður ásetta dato í 2024. T.v.s. at ÍSF skal hava gjørt galdandi hetta endurgjaldið innan 31. desember 2025, tá tað eisini verður evsta freist fyri at felagsskapurin er farin undir at byggja við Ovara vøll.

Sí hjálagt
a). Dagført skeyti
b). Dagført ætlanarskriv
c). Sáttmáli um framtíðar ÍSF-høvuðssæti

Stjórn í ÍSF hevur principielt tikið undir við hesum skjølunum, men skal sbrt. lógunum hjá felagsskapinum leggja tað fyri á eykaaðalfundi til góðkenningar og verður tað ætlandi um umleið 3 vikur.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at innganga hjálagda skeyti, ætlanarskriv og sáttmála. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. august 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. august 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. august 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
ÍSF hevði eykaaðalfund 16. september 2020 til at taka støðu til endaligu skjølini.

Eykaaðalfundurin ynskti og samtykti eina minni broyting í skjalinum 'Sáttmáli um framtíðar ÍSF-høvuðssæti'.

Talan er um umorðingar, sum innibera, at í tann mun, at ÍSF ikki ger álvara av at byggja við Ovara vøll í Gundadali, so skal TK bjóða ÍSF eitt annað hóskandi byggibúgvið grundstykki. Meðan orðingarnar frammanundan ikki innibóru eina skyldu til at royna tað, men at TK kundi velja at gera tað.

Hinvegin so stendur óbroytt við, at um partarnir ikki semjast um tann møguleikan, so fær ÍSF endurgjald á 3,55 mio.kr. fyri útreiðslur, ið TK annars ætlandi hevði havt av byggibúning av øki sunnanfyri og vestanfyri skýlið við Ovara vøll í Gundadali, umframt sambygging við sjálvt skýlið. ÍSF kann gera hetta endurgjald galdandi frá 1. januar 2021 og inntil 31. desember 2025.

Umsitingin metir at henda broytingin ikki broytir grundleggjandi uppá tað, sum er ætlanin yvirfyri ÍSF og tí kann gerast.

Fyri at tað skal vera samsvar millum samtyktina hjá ÍSF og hana hjá kommununi er neyðugt at staðfesta broytingina. Sí hjálagt dagført skjal 'Sáttmáli um framtíðar ÍSF-høvuðssæti 18.09.2020_1'. Hini bæði skjølini (skeyti og ætlanarskriv), ið vóru samtykt á seinasta fundi, standa við óbroytt.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja dagførda skjalið 'Sáttmáli um framtíðar ÍSF-høvuðssæti 18.09.2020_1'. Málið verður beint býráðið.

**Fíggjarnevndin 23. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

## 194/20 Útinna forskeypsrætt til ognina Kurla matr. nr. 1408b, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 189/17 | 17/03061-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.12.2017 | 331/17 | 17/03061-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 07.11.2018 | 323/18 | 17/03061-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 10.12.2018 | 371/18 | 17/03061-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 30/19 | 17/03061-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2019 | 1/19 | 17/03061-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 18/19 | 17/03061-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 159/20 | 17/03061-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 173/20 | 17/03061-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 223/20 | 17/03061-1 |
| 11 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 194/20 | 17/03061-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**
Føroya Tele og Tórshavnar kommuna gjørdu í 2000 samstarvssáttmála um barnaansing. Í stuttum vildi Føroya Tele loysa trupulleikan við barnaansing fult og heilt fyri teirra starvsfólk og lutvíst tørvin hjá kommununi á fleiri ansingarplássum, sum tá var.

Føroya Tele útvegaði í hesum sambandi fastogn, sum Føroya Tele er einsamalt eigari av. Í avtaluni er útreiðslubýtið til íløgurnar soleiðis, at Føroya Tele rindar 80%, Tórshavnar kommuna 20% av samlaða kostnaðinum. Viðlíkahaldsútreiðslurnar innan og uttan hava partarnir síðani borið í tí lutfalli, sum børnini koma frá, tvs. ávikavist Føroya Tele og Tórshavnar kommunu.

Sambært byggiroknskapi frá 2003 kostaði keyp av ognini og byggingin í alt kr. 5.265.656 v/mvg. Luturin hjá Føroya Tele var kr. 4.212.525, luturin hjá Tórshavnar kommunu kr. 1.053.131.

Føroya Tele hevur boðað frá ynski um at selja ognina og harvið siga sáttmálan upp. Sáttmálin inniber ein framíhjárætt til ansingarpláss á stovninum, sum seinni fekk navnið Kurl@, til starvsfólk hjá Føroya Tele. Føroya Tele metir ikki neyðugt við hesum framíhjárætti longur.

Tórshavnar kommuna hevur forkeypsrætt til ognina og hevur áhuga og brúk fyri húsinum, serliga nú barnatalið er vaksandi. Kurla hevur í løtuni um 35 børn á stovninum, har er ein vøggustova og ein barnagarðsstova. Kurla er minsti stovnurin í høvuðsstaðarøkinum, hevur í stóran mun Gundadalsøkið sum upptøkuøki.

Bygningurin er staðsettur beint við Tórsbreyt. Tá nýggjur og størri dagstovnur verður bygdur í miðbýarøkinum, so letur hetta upp fyri møguleikanum at brúka Kurlu til felagshús hjá frælsu ítróttini, sum hevur sítt virksemi á Tórsbreyt, og sum manglar felagsumstøður har.

Í 2016 varð ognin virðismett. Talan er um eini eldri sethús, sum vórðu um- og útbygd í 2002. Í 2014 vóru øll vindeyguni og klædningurin í tí eldra partinum skift. Tilsamans eru húsini 328 m2 til støddar og grundøkið er 807 m2. Søluvirði varð mett til kr. 3,2-3,3 mió við støði í, at húsini ikki eru innrættað sum sethús.

Í grein 3 í sáttmálanum er ásett, at um kommunan ger forkeypsrættin galdandi, so verður keypsprísurin at áseta til metingarprís av metingarfólki, ið partarnir velja.
Vísandi til góða samstarvi við Føroya Tele, ið eisini hevur borið part av íløgum og viðlíkahaldinum, ið kommunan annars fult út skuldi rinda, og at tað eru ávísar óvissur í sáttmálanum um, hvussu ein meting skal fara fram og umfatar, er best at enda samstarvið við eini avtalu um yvirtøkuna.

Samráðing hevur verið um keypsprís áljóðandi kr. 3,5 mió., svarandi til ein fermeturprís á 10.671 kr/m2., samstundis verður samstarvssáttmálin við Føroya Tele settur úr gildi.

Gjørd er støðumeting av ognini.

Húsaumsitingin leggur støðumetingina fram.

**Mentamálanevndin 11. desember 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Føroya Tele rykkir eftir støðutakan frá kommununi soleiðis, at Føroya Tele kann selja bygningin og koma úr sáttmálanum við kommununa skjótast.

Mett verður, at Dagstovnurin Kurla í sjálvum sær er ov lítil rakstrareind. Sbrt. støðumeting og bygningskanning av Kurlu, sí hjálagt, sum løgd varð fram fyri mentamálanevndina á seinasta fundi, skulu gerast ávísar ábøtur á bygningin. Frælsu ítróttarfeløgini sýna ikki áhuga í bygninginum til felagshús v.m.

Nógv talar tí fyri, at kommunan skal ikki brúka forkeypsrættin til bygningin.

Kommunan arbeiðir við at leggja ætlan fyri útbyggingar av samlaða plásskapasitetinum á dagstovnaøkinum. Verður Kurla tikin úr skipanini, mugu hesi uml. 30 plássini takast við í hesar útbyggingar. Ætlan má eisini leggjast fyri, hvussu og hvagar børnini, ið nú eru inni á stovninum, kunnu flytast.

Føroya Tele hevur upplýst, at tað í sambandi við søluna ikki kunnu áleggjast keypara treytir um, at dagstovnavirksemið kann halda fram ávíst langt tíðarskeið. Kommunan hevur tó tørv á, at virksemið kann vera har í minsta lagi til summarið 2019, tó helst alt 2019.

Sbrt. sáttmálanum grein 14 verður søluupphæddin býtt millum Føroya Tele og kommununa við ávikavist 80% og 20%. Upphæddin kann sostatt hugsast sum ískoyti til at endurútvega plássini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til ikki at útinna forkeypsrættin, men at tryggjað verður, at virksemið kann halda fram til onnur pláss eru fingin til vega.

**Mentamálanevndin 07. november 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Í sambandi við mál um heildarætlan fyri Gundadal sum ítróttaøki, sí mál 18/03453, hevur byggi- og býarskipanardeildin heitt á Trivnaðarfyrisitingina um at tryggja, at ognir, liggja uppat ítróttaøkinum, verða kommunal ogn.

Víst verður á, at heildarætlanin arbeiðir við samlaðari loysn fyri ítróttaøkið í Gundadali og við Tórsbreyt, og at tað er týdningarmikið, at økið er nóg stórt og í ávísan mun framtíðartryggjað, so at rúm er fyri neyðugari útbygging, umframt at atkomu- og parkeringsviðurskiftini til virksemi í økinum eisini skulu tryggjast.

Víst verður í hesum sambandi á Kurlu, ið er ogn hjá Føroya Tele, og matrikkul, ið er ogn hjá Betri, har mælt verður til samráðingar um keyp av  hesum ognum.

Vísandi til, at málið hevur stóran týdning í planlegging hjá bæði mentamálanevnd og byggi- og býarskipanarnevnd, verður skotið upp at skipa fyri felags nevndarfundi hesum viðvíkjandi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til felags nevndarfund millum mentamálanevndina og byggi- og býarskipanarnevndina um málið.

**Mentamálanevndin 10. desember 2018:** Samtykt at hava felagsfund millum mentamála-nevndina og byggi- og býarskipanarnevndina um málið.

**Mentamálanevndin og byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Nevndirnar samtyktu at taka upp samráðingar við Føroya Tele um at útinna forkeypsrættin til Kurlu, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Kurla sum dagstovnur verður væntandi niðurlagdur eftir summarfrítíðina. Støðan er, at bygningurin í mun til stødd ikki loyvir at hava fleiri enn 2? pláss, ið ikki er hóskandi sum rakstrarstað. Pláss er fyri børnunum vesturi á Flat og í Miðstovninum, tá hesir eru liðugt bygdir.

Uppskot hevur verið at brúkt Kurlu sum høli til at taka hjá frítíðarskúlanum í Badmintonhøllini, men hetta er ikki í samsvari við avtaluna, sum er millum kommununa og Føroya Tele um barnaansing og framíhjárætt hjá starvsfólkum hjá Føroya Tele tí viðvíkjandi.

Eisini í mun til ítróttaøkið hevur ognin áhuga hjá kommununi, sí eisini samtykt í málinum.

Føroya Tele ynskir framhaldandi at selja bygningin beinanvegin. Kommunan hevur sum kunnugt forkeypsrætt, men hevur ikki útint hann hóast rúm tíð er gingin. Metast má, at Føroya Tele eigur at sleppa úr avtaluni og at selja ognina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til, at Føroya Tele kann selja bygningin.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at umsitingin fær í lag tilgongd, har Føroya Tele og feløgini á Tórsbreyt gera loysn soleiðis, at feløgini kunnu ogna sær bygningin at hýsa felagsvirksemi, áðrenn kommunan sleppur forkeypsrættinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at gera forkeypsrættin hjá Tórshavnar kommunu galdandi og at fara undir tilgongd at gera keypsavtalu við Føroya Tele.

**Ískoyti:**

Gjørt er uppskot til keypsavtalu við Føroya Tele. Keypskostnaðurin er kr. 3.500.000, sum verður goldin í trimum gjøldum, sí avtaluuppskotið.

Fyrsta gjaldið kr. 1.100.000 fellur til gjaldingar í 2021, næsta gjald kr. 1.200.000 fellur í 2022, og síðsta gjaldið kr. 1.200.000 fellur í 2023.

Ætlanin er, at ítróttafeløgini á Tórsbreyt fáa nýtslurætt til bygningin til felagshøli.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at góðkenna uppskotið til keypsavtalu kr. 3.500.000, og at fígging sum omanfyri lýst verður sett av fíggjarætlanini árini 2021, 2022 og 2023.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

## 195/20 Útgerð - Musikkskúlin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 14.09.2020 | 245/20 | 20/03440-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 224/20 | 20/03440-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 195/20 | 20/03440-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 20/03440-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Nýggi Tórshavnar musikkskúli hevur nú virkað í eitt ár. Við støði í royndunum hevur skúlaleiðslan víst á tørv á ávísari útgerð og hentleikum til tess at gera funktiónirnar og upplivingina betri.

Talan eru um viðurskifti, sum ikki vóru við í byggiverkætlanini og tí krevur aðra fígging.

Ætlanin er at útvega lørift (biografstødd) og sjónvørpu til Hátún. Harumframt lørift og sjónvørpu til Tinnuna, ið eisini ætlast broytt, so hølið betur hóskar til framførslur og fundir. Eisini er talan um smærri íløgur í skíggjar, gardinur v.m.

Musikkskúlin kemur saman við umsitingini at standa fyri hesum útveganum, ið mettar eru at kosta uml. 2 mió.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. september 2020 | Blað nr.: 857 |
| | | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta kr. 2 mió av kontu 7710 Ferðavinna til kontu 5510 Tórshavnar musikkskúli.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. september 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til at endalig uppgerð ikki fyriliggur og at biðið er um frágreiðing um verkætlanina.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við Mentamálanevndini, vísandi til at endalig uppgerð ikki fyriliggur og biðið er um frágreiðing um verkætlanina.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, 2 blonkum atkvøðum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson.

Málið soleiðis samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

## 196/20 Landavegur 3. Byggistig, frá Heygsvegnum til Marknagilsvegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.02.2019 | 3/19 | 19/00501-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 43/19 | 19/00501-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 40/19 | 19/00501-1 |
| 4 Býráðsfundur | 14.03.2019 | 52/19 | 19/00501-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 02.04.2019 | 22/19 | 19/00501-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 10.09.2019 | 52/19 | 19/00501-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 246/19 | 19/00501-1 |
| 8 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 210/19 | 19/00501-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 09.06.2020 | 27/20 | 19/00501-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 228/20 | 19/00501-1 |
| 11 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 196/20 | 19/00501-1 |

**Upprunin til málið:**
Sum framhald av kloakkarbeiðinum frá Frælsinum til rundkoyring við Íslandsveg/Heygsveg, er ynski um at fara í gongd við 3. byggistig, sum er vegastrekkið Landavegur frá rundkoyringini við Heygsvegin til Marknagilsvegin.

Av tí at Fjarhitafelagið hevur ætlanir um at fara í gongd við at leggja nýggja fjarhitaleiðing á hesum strekki í vár, hevði tað verið ein fyrimunur at kloakk, regnvatn og vegbreyt verður dagført samstundis. Arbeiðið hjá Fjarhitafelagnum er umfatandi og verður stórt inntriv gjørt á vegbreyt. Sí yvirlitstekning og tvørskurð, j.nr. 19/00501-4.

Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum at dagføra og skilja sundur kloakkir frá felagsleiðingum, dagføra vatnleiðing og dagføra Landavegin við súkklu- og gongubreyt.

Kloakkin í Perskonugøtu er í sera ringum standi og brotin í fleiri støðum, tí er átrokandi at fáa hetta í rættlag, somuleiðis tvídeiling av kloakk- og regnvatn, tá talan er um felags ø500 leiðing at leggja út í Landavegin.

Í sambandi við komandi íbúðarbygging á Fløtum, er neyðugt at leggja eina kloakk til hesa útstykking, og at leggja nýggja regnsvatn til ánna, sum má leggjast í rør.

Í sambandi við skúlabyggningina, eru ferðsluátøk við vegamótið Hans Andriasar gøta og við vegamótið Landavegur/Marknagilsvegur projekterað, og eigur hetta at verða gjørt undir somu arbeiðstøku.

Partur av vatnleiðingini í Landavegnum er gomul ø250 etrenit-leiðing sum skal dagførast.

Somuleiðis skulu SEV og FT leggja leiðingar í vegin.

Sí Fundarfrásøgn frá fundi við allar leiðingsánarar j.nr. 19/00501-2.

Verkætlanin skúli á Fløtum verður liðug til skúlaársbyrjan á sumri 2020, og er tað tí umráðandi at hetta arbeiði verður liðugt áðrenn, tá eitt enn størri ferðslutrýst verður á Landavegnum.

Sjálvur vegurin eigur at verða dagførdur og ferðslutryggjaður samstundis, nú meira enn 3000 næmingar skulu til og frá skúlunum í Marknagili.

Arbeiðið at leggja fjarhitaleiðing, kloakk- og aðrar leiðingar, umframt at ferðslutryggja og dagføra Landavegin, væntast at taka uml. 13-14 mánaðir.

Ætlanin hjá Fjarhitafelagnum er at bjóða arbeiðið út seinast 1. mars 2019.

**Skjøl**
Fíggjartørvur, j.nr. 19/00501-6
Tekningar, j.nr. 19/00501-4
Fundarfrásøgn, j.nr. 19/00501-2

Tilmæli kemur til fundin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at kommunan fer undir at dagføra Landavegin, 3. byggistig og at umsitingin innheintar tvey undirhondsboð at leggja fyri teknisku nevnd til góðkenningar.

Samlaði fíggjartørvurin til verkætlanina er kr. 17,5 mió. við 6,25% mvg. Ætlanin er, at arbeiðið skal byrja í apríl 2019 og verða liðugt á sumri 2020, og mælt verður til:

at í 2019 verða játtaðar kr. 8 mió. soleiðis:
- Kr. 1.067.000 av kt. 8175 – L81024, umskipan av Velbastaðvegnum
- Kr. 1.000.000 av kt. 8112, asfalt rakstur 2019
- Kr. 600.000 av kt. 6875, íløgur – L00001 2018 kloakkir sum ikki eru merktar
- Kr. 2.000.000 av kt. 6875, íløgur – L00001 2019 kloakkir sum ikki eru merktar
- Kr. 727.000 av kt. 8175 – L81003, Glyvursvegur brúgv um Sandá
- Kr. 2.400.000 av kt. 6810, kloakk rakstur í 2019
- Kr. 275.000 av kt. 8175 - L81017, Hóvabrekka

at írestandi fíggjartørvurin verður játtaður sum íløga í 2020.

at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Tekniska nevnd 12. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

**Býráðsfundur 14. mars 2019:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið gjørt útboðstilfar j.nr. 19/00501-11 og bjóðað út í undirhonsboð 21. mars 2019 til tveir arbeiðstakarar, P/F Articon og Sp/f Andrias Berg.

Tilboðsfreistin var 20. mars 2019, kl. 12.

Tilboðini vóru opnað á skrivstovuni hjá P/F SMJ og vóru áljóðandi:

| | | |
|---|---|---|
| Andrias Berg | kr. 17.833.295,- | j.nr. 19/00501-13 |
| Articon | kr. 24.768.867,- | j.nr. 19/00501-14 |
| | | |
| Metingin var | kr. 19.475.068,- | j.nr. 19/00501-15 |

Umsitingin hevur, saman við ráðgevum, gjøgnumgingið tilboðini, sum bæði lúka treytirnar í útboðstilfarinum.

Parturin av tilboðnum sum kemur undir Fjarhitafelagið er uml. kr. 8. mió.

Farið verður undir samráðingar við partarnar, og væntandi verður sáttmáli klárur til undirskrivingar 14. apríl, so arbeiðið kann byrja sambært tíðarætlan 28. apríl.
Víst verður til at í 2019 eru játtaðar kr. 8 mió. og írestandi fíggjartørvurin verður játtaður sum íløga í 2020.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at fyrisitingin saman við Fjarhitafelagnum og ráðgevum fer undir samráðingar við tilboðsgevararnar, at tikið verður av lægsta tilboðnum, og at sáttmáli verður fyrireikaður.

**Tekniska nevnd 02. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er í gongd og gongur eftir ætlan. Væntandi verður arbeiðið liðugt á sumri 2020. Samlaða verkætlanin varð upprunaliga mett at kosta kommununi umleið tkr. 17.600 íroknað 6,25% kommunalt MVG, áðrenn tilboð vórðu innheintað.

Undirhondstilboð blivu hereftir innheintað frá tveimum arbeiðstakarum. Eftir at tilboðini vóru innkomin varð staðfest, at Andrias Berg Sp/f hevði lægsta tilboð áljóðandi 17.833 tkr. uttan MVG. Hereftir eru ávísar tillagingar gjørdar, og sostatt kom sáttmálaupphæddin at ljóða uppá tkr. 18.207 uttan MVG. Afturat hesi upphædd verður mett, at útreiðslur til trygging, SEV, projektering og ráðgeving v.m. eru uppá umleið tkr. 2.350. Uttan MVG verður samlaða verkætlanin mett at kosta tkr. 20.555.

Verkætlanin umfatar bæði arbeiði hjá kommununi og Fjarhitafelagnum. Partarnir hava út frá tilboðstilfarinum gjørt avtalu um, at býtið av kostnaðinum verður 65% til kommununa, og 35% til Fjarhitafelagið.

Kostnaðurin hjá kommununi fyri hesa verkætlan verður sostatt mettur til tkr. 14.200 íroknað 6,25% í kommunalum MVG.

Í 2019 eru játtaðar tkr. 8.069 til verkætlanina. Betri framdrift hevur verið enn upprunaliga mett, og sostatt er arbeiðið komið longri enn væntað d.d. Væntað verður, at játtaða upphæddin fyri 2019 ikki kemur at røkka.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til:
- at geva eykajáttan uppá tkr. 2.500 í 2019 til verkætlanina L81034 á konto 8175 og at tkr. 1.500 verður játtað av konto 8175, L00001, Løgukarmur fyri árið, og tkr. 1.000 verður játtað av konto 8175, L00002, framfluttur løgukarmur.
- at umbønin um eykajáttan verður beind í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Talan er um flyting millum játtanir undir somu høvuðskonto, og krevur hetta tí bert eina viðgerð í býráðnum.
- at írestandi játtan uppá tkr. 3.700, verður játtað á íløgukarminum fyri 2020 á konto 8175 til liðuggerð av verkætlanini L81034, Landavegur 3. byggistig, frá Heygsvegnum til Marknagilsvegin.
  at umbønin um játtan í 2020 verður beind í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 10. september 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein atkvøður blankt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Samtykt við 8 atkvøður fyri, ongari ímóti og 4 blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Í fíggjarætlanini fyri 2020 eru 3.7 mió. kr. avsettar á karminum til liðuggerð av vegastrekkinum við Landavegin.

Arbeiðið hevur gingið væl, og væntað er at alt arbeiðið er liðugt til Jóansøku. Arbeiðið er tó vorðið dýrari, uml. 2.5 mió. kr. m.a. tí at ráðgeving, trygging, broytan av tilfari o.a. er vorðið dýrari enn væntað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at 3.7 mió. kr. verða játtaðar av konto 8175, L00001, Løgukarmur fyri árið, á konto 8175, L81034, Landavegur 3. byggistig
- at eykajáttan verður fingin til vega kr. 2.5 mió. á konto 8175, L81034, Landavegur 3. byggistig
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. juni 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið við at finna fígging til meirkostnaðin til verkætlanina. Ein fyribils uppgerð vísur, at verkætlanin L81018, Miðstaðarøkið við Marknagil, kann fíggja hetta.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At 3,7 mió. verða játtaðar av konto 8175, L00001, Løgukarmur fyri árið, á konto 8175, L81034, Landavegur 3. Byggistig
- At 2,5 mió. verða játtaðar av konto 8175, L81018, Miðstaðarøkið Marknagil, á konto 8175, L81034, Landavegur 3. Byggistig
  At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. september 2020 | Blað nr.: 862 |
| | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

# 197/20 Fyrispurningur um møguliga avtalu á matr. nr. 1245 um breiðkan av vegi og gongubreyt á vegamótinum Varðagøta / Brattabrekka

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.10.2019 | 58/19 | 19/02307-4 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 40/20 | 19/02307-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 233/20 | 19/02307-4 |
| 4 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 197/20 | 19/02307-4 |
| 5 Ferðslunevndin | 02.10.2020 | 18/20 | 19/02307-4 |

**Upprunin til málið:**
Borgari, ið býr í Brøttubrekku 16 (vegamótið Brattabrekka/Varðagøta) vendir sær til kommununa, har tey bjóða kommununi part av ogn teirra móti Varðagøtu, um kommunan er sinnað at gera garð á sama strekki afturfyri.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Nevnda vegamót er eitt x-kross vegamót við sera vánaligum útsýni og vegurin á strekkinum er rættuliga smalur, bert eini 6 m, og her er eingin gongubreyt.

Størsti trupulleikin á vegamótinum er tó Brattabrekka og útsýnið suðureftir Varðagøtu, tí er Brattabrekka gjørd einvegis her.

T.v.s. at broyting av markinum, sum borgarin skjýtur upp, hjálpir sum so ikki uppá hendan trupulleikan.

Kostnaðurin fyri at gera ein nýggjan garð, alt íroknað, liggur um 150.000 kr. og kann fíggjast av konto 8110.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at nevndin tekur støðu til, um umsitingin skal arbeiða víðari við at fáa garðin fluttan og breiðka vegin.

**Tekniska nevnd 08. oktober 2019:** Samtykt ikki at arbeiða víðari við at fáa garðin fluttan.

**Ískoyti:**
Eftir enn eina áheitan frá eigaranum av Brøttubrekku 16, hevur umsitingin viðgjørt málið av nýggjum. Komið er fram til, at tað verða munandi betringar av vegamótinum Varðagøta/Brattabrekka, um áleið 15 $m^2$ verða keyptir, og garðurin fluttur inn. Hartil kann sigast at um ikki tikið verður av nú, kemur neyvan ein so góður møguleiki aftur við bræði.

Kostnaðurin fyri at gera ein nýggjan garð, asfaltera v.m., verður mett at kosta uml. 150.000 kr. og kann fíggjast av konto 8110.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at flyta garðin sambært lýsingini í ískoytinum omanfyri og at beina málið í fíggjarnevndina, at góðkenna keyp av lendinum.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við Teknisk nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

# 198/20 Áheitan frá borgara um at gera vegastrekkið við Dalalíð liðugt (2011-2060)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.04.2015 | 42/15 | 14/02182-8 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 99/15 | 14/02182-8 |
| 3 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 75/15 | 14/02182-8 |
| 4 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 86/15 | 14/02182-8 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 247/15 | 14/02182-8 |
| 6 Býráðsfundur | 29.10.2015 | 192/15 | 14/02182-8 |
| 7 Tekniska nevnd | 09.01.2018 | 1/18 | 14/02182-8 |
| 8 Tekniska nevnd | 26.11.2019 | 81/19 | 14/02182-8 |
| 9 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 39/20 | 14/02182-8 |
| 10 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 232/20 | 14/02182-8 |
| 11 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 198/20 | 14/02182-8 |

**Málslýsing: (sí eisini mál nr. 2011-2060 og 2000-1640)**
Í skrivi til Tórshavnar kommunu, dagf. 6. september 2011, vísir borgari á, at Dalalíð ikki hevur gongubreyt ella gøtuljós, og at íbindingin til Marknagilsvegin er óskipað. Ynski er, at Dalalíð verður gjørd liðug.

Forkvinnan ynskir málið á skrá.

**Tekniska nevnd 22. september 2011:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Borgari hevur aftur gjørt vart við at Dalalíð ikki hevur gongubreyt ella gøtuljós og ynskir at fáa dagført vegin nú. Umsitingin hevur svarað í skrivi til borgaran, at farið verður ikki undir arbeiðið at dagføra vegin fyrr enn fígging fyriliggur.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur eingin ítøkilig kostnaðarmeting av eini dagføring av Dalalíð. Umsitingin hevur latið gera eina fyribils kostnaðarmeting álj. uml. 0,7 mió. kr. sambært skjali nr. 14/02182-10 og 14/02182-11.

Umsitingin greiðir frá.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2015:** Nevndin samtykti, at farast skal undir at gera arbeiðið, fíggjað av kt. 8175, og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevnd 22. apríl 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt ítøkiligt útbjóðingartilfar.
Í sambandi við tilgongdina at fáa bjóðað arbeiðið út, hevur umsitingin havt samskifti við íbúgvar við Dalalíð. Tað varð skjótt staðfest, at umfangið av at dagføra Dalalíð, varð munandi størri og meira umfatandi enn ætlað, og av somu orsøk er lægsta innkomna tilboðið væl hægri enn upprunaliga metingin.

Víst verður til lisitatiónsprotokoll, tillagað tilboð, sum er grundarlagið undir uppskoti til sáttmála við arbeiðstakaran Andrias Berg Sp/f.

**Viðkomandi skjøl:**
TK j. nr. 15/02591-1 : Yvirlitsplanur
TK j. nr. 15/02592-1 : Tilboðslisti
TK j. nr. 15/03386-5 : Lisitatiónsprotokoll
TK j. nr. 15/03386-6 : Tillagað tilboð
TK j. nr. 15/03608-1 : Fíggjarskjal, sum er samlað kostnaðarmeting

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Írestandi fíggjartørvurin er áljóðandi kr. 818.212,- sambært fíggjarskjali, j. nr. 15/03608-1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 820.000,- av íløgukarminum fyri vegir, deild 8175.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**Uppskot nr. 2 fyri byggistig nr. 2**
Ein fundur hevur verið við eigaran av matr. nr. 882a, Tórshavn. Uppskot nr. 2 fyri byggistig nr. 2 er gjørt sambært ynskjum og áheitan frá eigaranum og sum eigarin helt seg hava eina avtalu við Tórshavnar kommunu um. Eftir at hava gjøgnumgingið skjøl og samskifti í málinum er niðurstøðan tann, at eingin skriftlig avtala finst millum partarnar, sum byggir á ynskir eigarans.
Víst verður til uppskot til hesa vegaloysn, sí TK j. nr. 15/02591-2.
Uppskotið frá eigara byggir uppá eina vegaloysn av einum 5 m breiðum vegi við kantsteini í báðum borðum tó uttan gongubreyt frá vesturmarkinum av matr. nr. 880e og vestur í innkoyringina til sethús eigarans.
Í niðara borð er ein regnvatnskloakk til vegristir til vegvatn og gøtuljóssteyrar. Verandi frítíðarskúrur verður tikin niður og burturbeindur.

**Kostnaðarætlan**
Umsitingin hevur gjørt eina kostnaðarmeting fyri HVÚ áljóðandi 970 tús. kr. eina kostnaðarætlan C fyri alt arbeiðið áljóðandi 1,1 mió. kr.
Fyri at gera arbeiðið bíligari er ætlanin, at Tórshavnar kommuna skal veita tilfar sum byggiharraveiting, og arbeiðstakarin veita arbeiðs- og handverkaratímar og maskintímar.

**Uppskot nr. 3 fyri byggistig nr. 2**
Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til vegaføring frá vesturmarkinum á matr. nr. 880e og yvir til eysturmarkið av matr. nr. 882a. Uppskot nr. 3 fyri fyri byggistig nr. 2 er gjørt soleiðis, at tað liggur framvið markinum av matr. nr. 881c og inni á kommunalum øki, matr. nr. 881a.
Víst verður til uppskot til hesa vegaloysn, sí TK j. nr. 15/02591-3.
Uppskotið hjá umsitingini byggir uppá eina vegaloysn av einum 5 m breiðum vegi við kantsteini í báðum borðum tó uttan gongubreyt frá vesturmarkinum av matr. nr. 880e og vestur til eysturmarkið av matr. nr. 880a. Verandi skúrur verður standandi.
Í niðara borð er ein regnvatnskloakk til vegristir til vegvatn og gøtuljóssteyrar.

**Kostnaðarætlan**
Umsitingin hevur gjørt eina kostnaðarmeting fyri HVÚ áljóðandi 650 tús. kr. eina kostnaðarætlan C fyri alt arbeiðið áljóðanadi 870 tús. kr.

Fyri at gera arbeiðið bíligari er ætlanin at Tórshavnar kommuna skal veita tilfar sum byggiharraveiting, og arbeiðstakarin veita arbeiðs- og handverkaratímar og maskintímar.

**Viðkomandi skjøl í málinum**

TK j. nr. 15/02591-2 Dagføring av Dalalíð_Yvirlitsplanur_Uppskot nr. 2

TK j. nr. 15/02591-3 Dagføring av Dalalíð_Yvirlitsplanur_Uppskot nr. 3

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**

| | **Rakstrarjáttan** | **Løgujáttan** |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 870.000,- |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 50.000,- |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato 01.03.2017 | Dato 01.07.2017 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| **Upphædd íalt** | **Á** | | | **Av** | | | **Lokað verkætlan** | **Eykajáttan** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**

Býarverkfrøðingurin mælir til at tikið verður undir við uppskoti nr. 3 til vegaloysn í 2. byggistigi inni á kommunalum øki. Verður tikið undir við hesum, mælir býarverkføðingurin til at gera høvuðsprosjekt av uppskoti til linjuføring av uppskoti nr. 2 í byggistigi nr. 2 frá ognini Dalalíð 7 og yvir til eysturmarkið á matr. nr. 880a, Tórshavn og seta kr. 50.000,- av deild 8175 til innanhýsis prosjektering og bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar og at leggja málið fyri nevndina aftur til støðutakan.

**Tekniska nevnd 09. januar 2018:** Ein meiriluti, Bogi Andreasen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við uppskoti nr. 2, treytað av at tey sjálvi taka skúrin niður, at seta kr. 50.000,- av deild 8175 til innanhýsis prosjektering og bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar og at leggja málið fyri nevndina aftur til støðutakan.

Ein minniluti, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal, tekur undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Umsitingin hevur havt fund við eigaran av matr. nr. 882a. Eigarin bleiv kunnaður um samtyktina í teknisku nevnd, at uppskot nr. 2 bleiv samtykt, um at tey sjálvi skulu taka skúrin niður fyri egna rokning.

Eigarin tekur nú undir við uppskoti nr. 2 til vegaføring, men við teirri treyt, at vegurin fer uttan um skúrin, soleiðis sum uppskot nr. 3 legði upp til.

Umsitingin hevur nú endurskoðað ætlanina, soleiðis sum uppskot 4 vísir. Ætlanin er at dagføra verandi veg og gera marknaðarumskipan. Hetta er ein betri vegaloysn og kemur eisini at kosta minni.

Maknaumskipa umfatar:

- at verandi vegur, sum er uml. 57 fermetrar, ið nú liggur inni á matr 881c, kemur at liggja sum litra, tað er kommunal ogn.

- at makaskifta vegaøkið við at flyta sunnaru markalinjurnar á matr. nr. 881c og 882a, uml. 1,4 m, inn á matr. nr. 881a, sum Tórshavnar kommuna eigur.

**Hjáløgd skjøl**
TK j. nr. 15/02591-4 Dagføring av Dalalíð_Yvirlitsplanur_Uppskot nr. 4

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at varðveita verandi atkomuveg og at dagføra vegin við kantsteinum, vegristum og gøtuljósum, fíggjað av kt. 8110 vegir.
- at maknaumskipa, soleiðis at verandi vegur, ið liggur inni á matr. 881c, kemur at liggja sum kommunalt øki.
- at onki verður gjørt inni á matr. nr. 882a, sum er privat øki, tí hetta fer at gera fordømi og kann hava stórar fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa, um onnur fara at krevja somu sømdir.

**Tekniska nevnd 26. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tann 12. august 2020, varð ástaðarfundur við eigararnar fram við tí partinum av Dalalíð, ið hoyrir undir 2. Byggistig. Trý uppskot vóru umrødd, uppskot 2, 3 og 4, sí ávikavist:
TK j. nr. 15_02591-2_Dagføring av Dalalíð Yvirlitsplanur_Uppskot nr. 2,
TK j. nr. 15_02591-3_Dagføring av Dalalíð_Yvirlitsplanur_Uppskot nr. 3,
TK j. nr. 15_02591-4_Dagføring av Dalalíð _Uppskot nr. 4.

Uppskot 4, við smærri tillagingum fekk best undirtøku.

Arbeiði er mett til at kosta kr. 200.000,00.

Skotið verður upp til at gera 2. byggistig, sambært Uppskot 4, ver. 2, grundað á at:
tað ikki gerst neyðugt at grava í vegkassan á Vestara Ringvegi.
tað er tann bíligasta loysnin.
tað er størst undirtøka fyri hesi loysn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at gera 2. byggistig, sambært Uppskoti 4, ver. 2, og fíggja arbeiðið av rakstri, konto 8110 Vegir, og beina málið í fíggjarnevndina at góðkenna, at makaskifti í nevnda uppskoti kann fremjast.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við Teknsiku nevnd.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

# 199/20 Broytan av svingi í Blómubrekku

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.06.2020 | 28/20 | 20/01731-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 35/20 | 20/01731-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 230/20 | 20/01731-2 |
| 4 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 199/20 | 20/01731-2 |
| 5 Býráðsfundur | | | 20/01731-2 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við at Blómubrekka er knýtt í Villingadalsvegin, er stór ónøgd við krappa svingið miðskeiðis á strekkinum. Hetta sving er gjørt fyri langari tíð síðan, áðrenn ætlanina at knýta í Villingadalsvegin.

Kommunan hevur havt samráðingar við Bústaðir um at sleppa inn á økið hjá teimum, fyri at gera svingið meira lagaligt at koyra ígjøgnum.
Grundin til at tað verður gjørt nú er tann, at Fjarhitafelagið skal leggja leiðingar har nú.

Verkætlanin verður fíggjað av rakstrarkonto fyri vegir 8110. Kostnaðurin er 1 mió. kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/læjttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 09. juni 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Upprunaliga var ætlanin at fíggja arbeiðið, at broyta svingið við Blómubrekku, av rakstarkonto 8110 vegir.

Í veruleikanum er talan um eina verkætlan. Harumframt er talan er um eina upphædd, sum tyngir rakstrarkonto 8110 ov nógv, og tí verður heldur mælt til at fíggja hesa verkætlan av 6875 – L00002, framfluttur løgukarvmur, við kr. 389.000 og av 6875 – L00001, løgukarmur fyri árið, við kr. 611.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at játta kr. 389.000 av konto 6875, L00002 framfluttur løgukarmur fyri árið, til konto 8175, nýggj verkætlan «Broytan av svinginum í Blómubrekku»
- at játta kr. 611.000 av konto 6875, L00001, løgukarmur fyri árið, til konto 8175, nýggj verkætlan «Broytan av svinginum í Blómubrekku»
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð. Málið beint víðari til aðru viðgerð.

## 200/20 Vegur til biogassverkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 37/20 | 20/02256-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 231/20 | 20/02256-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 200/20 | 20/02256-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 20/02256-1 |

**Upprunin til málið:**
Nýtt biogassverk á Skarðshjalla

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við at Biogassverkið hevur keypt øki inni á Skarðshjalla til sítt virksemi, er neyðugt hjá kommununi at fáa veg gjørdan til økið. Talan er um at leinga verandi veg áleið 70 m.

Upprunaliga var ætlanin at fíggja arbeiðið av rakstarkonto 8110 vegir.

Í veruleikanum er talan um eina verkætlan. Harumframt er talan um eina upphædd, sum tyngir rakstrarkonto 8110 ov nógv, og tí verður heldur mælt til at fíggja hesa verkætlan av 6875 – L00001, løgukarmur fyri árið, við kr. 1.300.000.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at játta kr. 1.300.000 av konto 6875, L00001 løgukarmur fyri árið, til konto 8175, nýggj verkætlan «Vegur til Biogassverkið»
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð. Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 201/20 Dagføring av vegnum Argjavegur/Argjaboðagøta

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 26.11.2019 | 83/19 | 19/04645-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 04.02.2020 | 7/20 | 19/04645-1 |
| 3 Ferðslunevndin | 20.02.2020 | 7/20 | 19/04645-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 16/20 | 19/04645-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 36/20 | 19/04645-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 229/20 | 19/04645-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 201/20 | 19/04645-1 |
| 8 Býráðsfundur | | | 19/04645-1 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn er komin um at byggja íbúðarhús við 27 íbúðum umframt felagshús á matr. nr. 43g, á Argjaboða (j.nr. 18/03069).

Býráðið hevur samtykt at gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið, og í tí sambandi eru fleiri kærur komnar inn frá íbúgvum á Argjaboða, sum klaga um at vegurin er ov vánaligur til meira ferðslu, í støðum bert 1 spor og eingin gongubreyt.

Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 11. September 2019, at góðkenna uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt og at kommunan fær vegin út á Argjaboða dagførdan.

Fíggjarnevndin samtykti 13. november 2019 at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið viðvíkjandi byggisamtyktini í býráðið og at beina málið um dagføringina av vegnum út á Argjaboða í teknisku nevnd og stovna nýtt mál hesum viðvíkjandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sunnari partur av Argjavegnum út ímóti Argjaboðagøtu, íalt 160 m, er einans uml. 4 m breiður. Vegirnir báðumegin eru góðar 9 m í breidd.

Skal vegurin breiðkast, so er neyðugt hjá kommununi fyrst at ogna sær lendið og møguliga bygningar. Á niðaru síðu eru 13 privatir eigarar og fleiri neyst og á ovaru síðu eru 9 privatir eigarar og 2 sethús.

Um tann parturin av vegnum, sum bert er 4 m breiður, skal breiðkast, so hann er eins breiður sum restin, verður arbeiðið mett at kosta áleið (20.000 x 160) kr. 3,2 mió., tá er ognartøka, keyp av húsum/neystum o.a. ikki við.

Ein fyribils loysn kundi verið, at sett upp ferðsluljós við radara, fyri at stýra ferðsluni, soleiðis at bilar ikki møtast á tí smala partinum. Kostnaðurin av hesum verður mettur til uml. 300.000,- kr.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Umsókn at byggja á matr. nr. 43g, á Argjaboða, j.nr. 18/03069.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Tað eru ongin frávik, men málið skal viðgerast av ferðslunevndini, áðrenn nakað kann gerast.

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at arbeitt verður víðari við eini loysn, har tað verða sett upp ferðsluljós við radara, fyri at stýra ferðsluni og at leggja málið fyri nevndina aftur, tá eitt liðugt uppskot fyriliggur.

**Tekniska nevnd 26. november 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti og mælir til, at vegurin verður dagførdur.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt eitt meira ítøkiligt uppskot til eina loysn, har ferðslan verður stýrd við ferðsluljósum, og eitt gonguøki á 1 m verður strikað upp á ovara borð. Uppskotið hevur verið til ummælis hjá ferðslugrannskoðara, har hann gevur sítt viðmæli til uppskotið við smærri viðmerkingum so sum uppstriking v.m. Hetta kemur við í endaligu projekteringini av ferðsluloysnini.

Eisini er ein støðulýsing gjørd av vegastrekkinum, sum m.a. sigur at vegastrekkið er í góðum standi, tá hugsað verður um stabilitet av vegnum.

Eisini er umbiðin ein ferðslugrannskoðan av økinum í verandi líki. Hon er ikki tøk enn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at arbeiða víðari við uppskotinum j.nr. 19/04645-5 støðumynd – ferðsluljós, at strika 1 m gongubreyt á ovara borð og beina málið í ferðslunevndina umframt at hava ein ástaðarfund.

**Tekniska nevnd 04. februar 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Tilmæli:**
Ferðslubólkurin mælir til at taka undir við ætlanini.

**Ferðslunevndin 20. februar 2020:**
Uppskot um ferðsluljós er ein brúkbar loysn. Ferðslunevndin mælir tó til at bíða verður fyribils við at gera broytingar á nevnda vegastrekki, vísandi til at ferðslan er sera lítil. Higartil eru ikki skrásett ferðsluóhapp ella líknandi á staðnum.

**Ískoyti:**
Møguleiki er at breiðka vegin í støðum, har økið fram við vegnum er kommunal ogn. Hetta kann gerast beinanvegin. Eisini eigur man at kanna møguleikan um keyp/gerðabýti við ánarar, har hetta kann lata seg gera. Umsitingin hevur gjørt tekning, ið vísir á hesar møguleikar, sí "*Kort – víðkanar økir*" . Kostnaðarmetingin av hesum er mett til 3,65 mill. sí kostnaðarmeting .
Fyrst eigur projekt og nágreinilig kostnaðarmeting av verkætlanini at verða gjørd. Hetta arbeiðið er mett til 200.000 kr. Hetta kann fíggjast av rakstrarkonto fyri vegir 8110.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við at projekt og nágreinilig kostnaðarmeting verður gjørd, og at málið kemur aftur í nevnd, tá hetta er gjørt.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur samráðst við Tummas Rubeksen, ánara av matr. 214 og 39a, Argir, um at kommunan keypir ognir hansara, og at hann fær eitt hóskandi grundstykki hinumegin vegin av matrikul nummar 122k.

Semja varð um at fáa tvær óheftar metingar av ognunum og hesar eru:

Protek sp/f: virðið av húsi kr. 1.800.000 kr.
Skyn: virðið av húsi kr. 2.550.000 kr.

Grundstykkið er mett til 750.000 kr.

Húsini hjá Tummas eru øll umvæld og eru í sera góðum standi, og hann hevur ætlanir um at byggja út í nærmastu framtíð og ynskir tí eina skjóta avgerð í hesum máli. Hann upplýsir, at ognin er skuldarfrí, og um hann skal góðtaka eina semju, so skal hann somuleiðis vera skuldarfríur í nýggju húsunum.

Hann sigur seg hava kannað kostnaðin fyri at byggja nýggj hús, t.v.s. útgrevstur og bygging, og at hetta kemur at kosta honum áleið 3,6 mió. kr. T.v.s. at hann, umframt grundstykkið frá kommununi, skal hava 3.600.000 kr. fyri ognir sínar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At kommunan letur honum hóskandi grundøki av matrikul 122k
- At kommunan keypir ognina frá Tummas Rubeksen fyri kr. 3.600.000
- At keypið av ognini verður flutt á konto 6175, L61020, Keyp av jørð, og verður fíggjað soleiðis:
    - Kr. 350.000 av konto 6875, L68035, Kloakk Tróndargøta
    - Kr. 500.000 av konto 6875, L68027, Kloakk Signabø
    - Kr. 389.000 av konto 6875, L00002, framfluttur karmur
    - Kr. 611.000 av konto 6875, L00001, karmur fyri árið
    - Kr. 1.050.000 av konto 6810, kloakkir o.a.
    - Kr. 700.000 av konto 6811, áir, yvirflatuvatn og veitir

  At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum treytað av góðkenning frá kommununala eftirlitinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Bjørghild Djurhuus, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til at ein heildarloysn verður funnin fyri allar eigararnar á vegastrekkinum og at peningurin heldur verður játtaður av keyp og sølu.

**Ískoyti:**

Í tilmælinum viðvíkjandi mál 19/04645 skal tað ikki standa 389.000 kr. av 6875, L00002, men L00001.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At kommunan letur honum hóskandi grundøki av matrikul 122k
- At kommunan keypir ognina frá Tummas Rubeksen fyri kr. 3.600.000
- At keypið av ognini verður flutt á konto 6175, L61020, Keyp av jørð, og verður fíggjað soleiðis:
  - Kr. 350.000 av konto 6875, L68035, Kloakk Tróndargøta
  - Kr. 500.000 av konto 6875, L68027, Kloakk Signabø
  - Kr. 389.000 av konto 6875, L00001, framfluttur karmur
  - Kr. 611.000 av konto 6875, L00001, karmur fyri árið
  - Kr. 1.050.000 av konto 6810, kloakkir o.a.
  - Kr. 700.000 av konto 6811, áir, yvirflatuvatn og veitir

  At málið verður beint í býráðið sum eykajáttan til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Ein meiriluti**,** Annika OLsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til at ein heildarloysn verður funnin fyri allar eigararnar á vegastrekkinum og at peningurin heldur verður játtaður av keyp og sølu.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 1 atkvøðu ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Karina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus.

# 202/20 Umsókn um broyting av byggisamtyktini matr. nr. 79a, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2020 | 125/20 | 19/03902-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 33/20 | 19/03902-2 |
| 3 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 202/20 | 19/03902-2 |

**Upprunin til málið:**
Í umsókn, dagfest. 21. september 2007, søkja arvingar av ognini matr.nr.79a, Hoyvík, um at byggisamtyktin fyri ein part av ognini verður broytt frá 4. grundumráði til A1 øki.

Byggi- og býarskipanarnevndin viðmælti broytingina, men málið hevur ligið stilt síðani 2008, og í brævi dagfest 18. september 2019 verður biðið um at málið verður tikið upp aftur.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ognin liggur fram við Hvítanesvegnum og niðan ímóti Brekkutúni. Ognin er uml. 12.000 m² til støddar. Harav eru uml. 4.000 m² A1-sethúsaøki og restin 4. grundumráði.

Søgugongd:
26. november 2007 viðgjørdi byggi- og býarskipanarnevndin málið, journal nr. 2007-2924, har søkt varð um at broyta byggisamtyktina soleiðis, at uml. 9.000 m² verða A1-øki og restin, uml. 3.000 m², verður verandi 4. Grundumráði. Nevndin samtykti at ganga umsóknini á møti, treytað av at útstykkingarætlan verður løgd fyri nevndina og íbindingarvegur verður lagdur norðari enn tann núverandi.

20. mai 2008 móttók byggi- og býarskipanardeildin tvey uppskot til skipan av økinum, har íbindingarvegur er lagdur norðanfyri tann núverandi og pláss er fyri ávikavist 10 og 15 grundstykkjum, sí skjølini *Útstykkingarætlan 400 m$^2$ og Útstykkingarætlan 500 m$^2$.*

Á fundi 21. mai 2008 viðger tekniska deild uppskotið, har m.a. greitt verður frá, at av tí at útstykkingin kemur at hava íbinding í landsveg, krevst eisini at Landsverk góðkennir ætlan fyri vegaíbinding, og at byggingin virðir kravda frástøðu frá landsvegi, áðrenn nakað útstykkingarloyvi verður latið frá kommununi. Á fundinum verður eisini greitt frá, at ynskiligt er at øll útkoyring á landsvegin á leiðini verður samskipað, soleiðis at verandi sethús framvið Hvítanesvegi og á Mýrini koma at hava felags innkoyring.

Í skrivi 14. novembur 2008 greiðir Landsverk frá, at tey eru samd við teknisku deild og kunnu ikki góðtaka íbinding til landsvegin, sum tað fyriliggur í uppskotinum frá 20. mai 2008. Tvær loysnir vórðu viðmældar: 1) at Mannbrekka verður avskorin frá Hvítanesvegnum og tað verður bygt eitt vendipláss við endan, ella at Mannbrekka verður førd javnfjart eftir Hvítanesvegnum til eina nýggja samlaða íbindingarleið, sí skjølini *Mannbrekka endar og Mannbrekka parallel.*

Málið endar fyribils her og 27. mars 2019, spyr umsøkjarin, vísandi til mál 2007-2924, um nakrar broytingar eru framdar ella onnur gongd er í málinum, nú ætlan er at trøðin verður send til skiftirættarviðgerð.

Fyri at fáa gongd í málið, dagførdi býarskipanardeildin eitt uppskot um broyting av byggisamtyktini, ið fyriheldur seg til umsøkjarans útstykkingarætlan frá 2008, umframt at umleið 2000 m$^2$ á grannaognini hjá Skógrøkt Landsins verður broytt frá A1 til 4. Grundumráðið, sí skjøl *Áðrenn broyting* og *Aftaná broyting*.

Býarskipanardeildin sendi Landsverki korttilfarið, útstykkingarætlanina frá 2008 og eitt nýtt uppskot sum dømi uppá íbinding til landsvegin, sí skjal *Mynd1.*
9. oktober 2020 móttekur Tórshavnar kommuna svar frá Landsverk um, at tey prinsipielt taka undir við uppskotinum, har verandi innkoyring verður stongd og nýggj felags íbinding gjørd.

Viðmerkjast skal, at øll dømini um nýggjar íbindingar í Hvítanesvegin ganga ígjøgnum grannaognir, og hesir grannar ikki eru vorðnir hoyrdir/kunnaðir um uppskotini.

Av tí at matr.nr.79a liggur uppat skógfriðaðum øki, varð málið eisini sent til hoyring hjá viðkomandi friðingarmyndugleikum.

30. oktober 2019 fekk kommunan viðmerkingar frá Náttúrufriðingarnevndini, sí skjal *Viðmerkingar frá Náttúrufriðingarnevndini,* sum er sinnað at geva undantaksloyvi til útstykkingarætlanina.

3. januar fekk kommunan loyvi frá Yvirfriðingarnevndini, ið somuleiðis varð sinnað at geva undantaksloyvi til nevndu bygging, sí skjal *Loyvi frá Yvirfriðingarnevndini 79a, Hoyvík*, við kravi um hoyringssvar frá Skógfriðingarnevndini.

Málið varð sent til Skógfriðingarnevndina, sum ikki tekur undir við broytingini av byggisamtyktini, men mælir ístaðin til, at Tórshavnar kommuna fer undir at kanna møguleikan fyri at ogna sær lendið, soleiðis at nevnda økið kann gerast ein partur av verandi viðarlund norðanfyri og at ein frílendisætlan verður gjørd fyri alt økið, sí skjal *2019-73 – høring.*

Endaligt svar er ikki komið frá Yvirfriðingarnevndini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 eru m.a.:

- *Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tilíkar bústaðir fyri eitt húski.*

Ásetingar fyri 4. grundumráði eru m.a.:

- *4. grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tilíkt.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mett verður, at økið, sum uppskot er um at broyta til A1 øki, hóskar seg væl sum bústaðarøki. Tey fýra sethúsini norðanfyri liggja heldur avbyrgd frá býlinginum sunnanfyri matr. nr. 79a, Hoyvík, og um umsóknin verður gingin á møti, er tað við til at knýta báðar býlingarnar saman.

Í uppskotinum um broyting av byggisamtyktini liggur tann parturin av matr. nr. 79a, har tað er skrái, framvegis uttanfyri byggiøki, og mett verður, at hetta er ein natúrlig leinging av viðarlundini. Mett verður somuleiðis, at tað er hóskandi at brúka hendan partin av matriklinum til at skapa eitt grønt samband frá viðarlundini og niðan til grøna økið við Dalin Langa, sum liggur norðan fyri Hoyvíkshøllina.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- 2007-2924 *Tóri í Hoyvík : Umsókn um broyting av ásetingum í byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 79a, Hoyvík*

- 19/01472 *Fyrispurningur um nakrar broytingar eru framdar ella onnur gongd er í málinum, nú ætlan er at trøðin matr. nr. 79a, Hoyvík verður send skiftirættarviðgerð*

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Viðmerkingar frá Náttúrufriðingarnevndini,* journal nr. 19/03902-4.
- *Mynd1,* journal nr. 19/03902-8.
- *Loyvi frá Yvirfriðingarnevndini 79a, Hoyvík,* journal nr. 19/03902-9.
- *2019-73 – høring,* journal nr. 19/03902-10.
- *Útstykkingarætlan 400 m2,* journal nr. 19/03902-19.
- *Útstykkingarætlan 500m2,* journal nr. 19/03902-19.
- *Mannbrekka endar,* journal nr. 19/03902-20.
- *Mannbrekka parallel,* journal nr. 19/03902-20.
- *Áðrenn broyting,* journal nr. 19/03902-21.
- *Aftaná broyting,* journal nr. 19/03902-21.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at samtykkja broytingina av almennu byggisamtyktini sambært kortskjølunum *Aftaná broyting*, treytað av játtandi svari frá Yvirfriðingarnevndini og at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2020:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum, fyri hana luttók Gunvør Balle.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum, fyri hana luttók Turið Horn.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

Marin Katrina Frýdal boðaði frá, at hon metti seg vera ógegniga at luttaka í viðgerðini at málinum.
Býráðið tók hetta til eftirtektar. Í hennara tað luttók Jógvan Arge í viðgerðini av málinum.

# 203/20 Nýggj serstøk byggisamtykt Yviri við Strond, matr. nr. 619, 620o, 651g, 651b, 651l, 651k og651i, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 172/20 | 20/01012-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 203/20 | 20/01012-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna er farin undir at endurskoða almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, og varð endurskoðanin løgd til almenna hoyring 25. juni 2020.

Í verandi almennu byggisamtykt eru rættiliga nógv ymisk øki, serliga vinnuøki. Hetta kann tykjast fløkjut og hevur eisini fleiri broytingar við sær, av tí at munirnir teirra millum eru avmarkaðir. Ynskið er at fækka um hesi økini, soleiðis at ásetingarnar í Almennu byggisamtyktini verða heldur breiðari, meðan man, um neyðugt, kann gera neyvari ásetingar fyri ymisk øki í serstakari byggisamtykt. Hetta við tí fyri eyga, at færri broytingar verða í tí almennu byggisamtyktini, meðan man í teimum serstøku byggisamtyktunum kann taka atlit til ítøkiligar verkætlanir, politikkir, ætlanir o.s.fr.

Økið, sum uppskotið til serstaka byggisamtykt Yviri við Strond er galdandi fyri, liggur sum B6-vinnuøki í almennu byggisamtyktini. Í uppskotinum til endurskoðan av almennu byggisamtyktini verður mælt til, at verandi B6 øki verður koyrt úr almennu byggisamtyktini, og at økið verður broytt til 2. grundrumráði. Tískil verður neyðugt við einari serstakari byggisamtykt fyri økið, ið inniheldur tær somu ásetingarnar, sum í verandi B6 øki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B6 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu – áðrenn endurskoðan:
*§ 13. Ásetingar fyri umráðispart B6 í 3. Grundumráði*

1. *Loyvt er einans at gera virki og byggja hús ætlað til miðstaðarbygging, skrivstovur, goymslur og tænastuvirki, ið hava samband við hetta.*
2. *Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.*
3. *Bygging má einans fara fram, eftir loyvi er fingið frá friðingarnevndini, samanber lógtingslóg um náttúrufriðing frá 9. Juli 1970 §2, stk. 2.*
4. *Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 1000 $m^2$.*
5. *Útstykking verður einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri hvønn einstakan umráðispart.*
6. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,5.*
7. *Eingi hús og eingin húsalutur má vera hægri enn 8 m.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- 17/02748 – Endurskoðan av byggisamtyktum – almenna- og serstakar byggisamtyktir.

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
- Málið um endurskoðan av almennu byggisamtyktini er gjørt í arbeiðsbólki, umboðaður av býarskipanardeildini, teknisku deild og byggideildini.

**Skjøl**

- *Serstøk byggisamtykt Yviri við Strond,* journal nr. 20/01012-2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina Yviri við Strond og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

## 204/20 Nýggj serstøk byggisamtykt á Kirkjustræti, matr. nr. 135gv og 135gx, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 173/20 | 20/01014-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 204/20 | 20/01014-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna er farin undir at endurskoða almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, og varð endurskoðanin løgd til almenna hoyring 25. juni 2020.

Í verandi almennu byggisamtykt eru rættiliga nógv ymisk øki. Hetta kann tykjast fløkjut og hevur eisini fleiri broytingar við sær, av tí at munirnir teirra millum eru avmarkaðir. Ynskið er at fækka um hesi økini, soleiðis at ásetingarnar í Almennu byggisamtyktini verða heldur breiðari, meðan man, um neyðugt, kann gera neyvari ásetingar fyri ymisk øki í serstakari byggisamtykt. Hetta við tí fyri eyga, at færri broytingar verða í tí almennu byggisamtyktini, meðan man í teimum serstøku byggisamtyktunum kann taka atlit til ítøkiligar verkætlanir, politikkir, ætlanir o.s.fr.

Økið, sum uppskotið til serstaka byggisamtykt á Kirkjustræti er galdandi fyri, liggur sum C1A vinnuøki í almennu byggisamtyktini. Í uppskotinum til endurskoðan av almennu byggisamtyktini verður mælt til, at verandi C1A verður koyrt úr almennu byggisamtyktini, og at økið verður broytt til A3 øki. Tískil verður neyðugt við einari serstakari byggisamtykt fyri økið, ið inniheldur tær somu ásetingarnar, sum í verandi C1A øki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri C1A øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu – áðrenn endurskoðan:

*§ 20. Ásetingar fyri umráðispartarnar C1A í 3. Grundumráði*

1. *Umráðispartarnir verða í síni heild lagdir til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, heilsubótarhøli, samkomuhús og tílíkt.*
2. *Mest loyvda hædd á bygningum er 9 m.*
   *Í sambandi við bygging á hvørjum einstøkum grundtykki, verður álagt eigaranum at planta runnar/trø í 5 m breiðan geira millum bygning og Vegin Langa/Løgmannabreyt.*
3. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,5.*
   *Ikki er loyvt at hava bingjur standandi á grundstykkinum uttan so, at talan er um av- og áskipan.*
4. *Nýtslustigið má ikki fara upp um 1,0.*
5. *2 p-pláss skulu vera fyri hvørjar 50 $m^2$ av nýtslustignum í húsunum.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- 17/02748 – Endurskoðan av byggisamtyktum – almenna- og serstakar byggisamtyktir.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

- Málið um endurskoðan av almennu byggisamtyktini er gjørt í arbeiðsbólki, umboðaður av býarskipanardeildini, teknisku deild og byggideildini.

**Skjøl**

- *Serstøk byggisamtykt á Kirkjustræti*, journal nr. 20/01014-1.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina á Kirkustræti og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

# 205/20 Nýggj serstøk byggisamtykt á Sundi, matr. nr. 1c, 1f, 1e, 1c, 3a, 3b og 4c, Sund

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 174/20 | 20/01015-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 205/20 | 20/01015-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna er farin undir at endurskoða almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, og varð endurskoðanin løgd til almenna hoyring 25. juni 2020.

Í verandi almennu byggisamtykt eru rættiliga nógv ymisk øki, serliga vinnuøki. Hetta kann tykjast fløkjut og hevur eisini fleiri broytingar við sær, av tí at munirnir teirra millum eru so avmarkaðir. Ynskið er at fækka um hesi økini, soleiðis at ásetingarnar í Almennu byggisamtyktini verða heldur breiðari, meðan man, um neyðugt, kann gera neyvari ásetingar fyri ymisk øki í serstakari byggisamtykt. Hetta við tí fyri eyga, at færri broytingar verða í tí almennu byggisamtyktini, meðan man í teimum serstøku byggisamtyktunum kann taka atlit til ítøkiligar verkætlanir, politikkir, ætlanir o.s.fr.

Økið, sum uppskotið til serstaka byggisamtykt á Sundi er galdandi fyri, liggur sum B9-vinnuøki í almennu byggisamtyktini. Í uppskotinum til endurskoðan av almennu byggisamtyktini verður mælt til, at verandi B9 øki verður koyrt úr almennu byggisamtyktini, og at økið verður broytt til B6 øki. Tískil verður neyðugt við einari serstakari byggisamtykt fyri økið, ið inniheldur tær somu ásetingarnar, sum í verandi B9 øki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B9 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu – áðrenn endurskoðan:

§ 16. Ásetingar fyri umráðispart B9 í 3. Grundumráði

1. Umráðisparturin B9 verður lagdur til vinnu, ið beinleiðis ella óbeinleiðis er útflutningsfremjandi og til virksemi, ið hevur samband við hesar vinnur. Harumframt verður øki tryggjað til verandi elverk og seinni útbygging av verkinum.
2. Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 5 til 7 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
3. Byggistigið fyri umráðispartin sum heild og fyri tær einstøku deildirnar má ikki fara upp um 0,5.
4. Hæddir á húsum skulu verða settar í hvørjum einstøkum føri út frá heildarmeting av nýtslu og skapi.
5. Bygging má ikki verða sett nærri bryggjutromum enn 20 m.
6. Øll bygging skal annars verða sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt náttúrligt avmarkað øki.
7. Í einari serstakari byggisamtykt, kann frávik frá pkt. 2 og 3 verða gjørd fyri bygging, ið er ætlað at hýsa tí tænastuvirksemi, ið er loyvt sambært pkt. 1.
8. Serstakar byggisamtyktir skulu virða avgerð friðingarmyndugleikanna um, at bóndahúsini verða varðveidd við einum hóskandi grundstykki, strikumerkt á fylgikortinum.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- 17/02748 – Endurskoðan av byggisamtyktum – almenna- og serstakar byggisamtyktir.

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Serstøk byggisamtykt fyri Sund,* journal nr. 20/01015-2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina á Sundi og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

## 206/20 Fíggjarætlan 2021, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.09.2020 | 243/20 | 20/03416-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 206/20 | 20/03416-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 05.10.2020 | 256/20 | 20/03416-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 08.10.2020 | 34/20 | 20/03416-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Býráðið hevur fyrstu viðgerð 29. oktober og aðru viðgerð 26. november.

**Onnur mál, sum kunnu hava týdning fyri málið**
20/03322 Fíggjarætlan 2021 [Tórshavnar havn]

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Tøknilig framskriving**
Í juni mánaða bleiv gjørd ein tøknilig framskriving av fíggjarætlanini 2021. Kunnað varð um hesa framskrivingina í fíggjarnevndini 17. juni 2020.

Fortreytirnar fyri tøkniligu framskrivingini vóru varisligar vísandi til corona-óvissu, og avlopið til íløgur, frároknað Tórshavnar havn, varð tá mett til 133 mió.kr.

**Fíggjarætlan 2021, fortreytir**
Eftir kunning um tøkniligu framskrivingina í fíggjarnevndini hevur verið arbeitt víðari við uppskotinum til fíggjarætlan 2021 at leggja fyri fíggjar- og faknevndir og býráðið.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2021 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 19,00% og 8.000 kr.

Tiknar eru eisini við allar kendar framskrivingar og virksemisbroytingar. Í talvuni niðanfyri síggjast høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| 1.000 kr. | | Roknskapur 2019 | Ætlan 2020 | Ætlan 2021 | Broyting 2020/2021 pct. | kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 846.629 | 846.694 | 873.135 | 3,1% | *26.441* |
| 20601 | Felagsskattur | 49.230 | 35.000 | 28.000 | -20,0% | *-7.000* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 1.293 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 150.072 | 145.397 | 149.032 | 2,5% | *3.635* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 37.616 | 35.353 | 35.353 | 0,0% | *0* |
| 20803 | Tíðaravmarkað flyting til eldraøkið | 0 | | | | |
| | **Inntøkur íalt** | **1.084.839** | **1.064.444** | **1.087.520** | **2,2%** | ***23.076*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 91.172 | 92.991 | 95.895 | 3,1% | *2.904* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 245.626 | 256.490 | 282.668 | 10,2% | *26.178* |
| §3 | Børn og ung | 191.563 | 193.131 | 200.198 | 3,7% | *7.067* |
| §4 | Undirvísing | 40.807 | 43.946 | 44.713 | 1,7% | *767* |
| §5 | Mentan og frítíð | 54.691 | 58.679 | 61.810 | 5,3% | *3.131* |
| §6 | Teknisk mál | 133.087 | 141.892 | 144.852 | 2,1% | *2.960* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 77.731 | 77.485 | 79.064 | 2,0% | *1.579* |
| §7 | Kommunal virkir TH | -46.216 | -36.318 | -32.858 | -9,5% | *3.460* |
| | **Rakstur íalt** | **788.462** | **828.296** | **876.343** | **5,8%** | ***48.047*** |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.344 | 18.000 | 18.000 | 0,0% | *0* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 1.523 | 2.500 | 2.000 | -20,0% | *-500* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **19.867** | **20.500** | **20.000** | **-2,4%** | ***-500*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **276.510** | **215.648** | **191.177** | **-6,3%** | ***-13.621*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 477 | 1.200 | 800 | -33,3% | *-400* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 5.500 | 5.500 | 0,0% | *0* |
| 20401 | Rentuinntøkur | -348 | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| | **Rentur íalt** | **826** | **6.700** | **6.300** | **6,6%** | ***440*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **275.685** | **208.948** | **184.877** | **-11,5%** | **-24.071** |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir** | **46.456** | **19.607** | **17.107** | -12,8% | *-2.500* |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **229.229** | **189.341** | **167.770** | **-11,4%** | **-21.571** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **183.013** | **176.896** | **156.285** | **-11,7%** | **-20.611** |
| | | | | | | |

Búskaparráðið hevur júst lagt sína heystfrágreiðing framm. Ráðið væntar búskaparliga afturgongd í BTÚ í ár upp á -6,9% og ein vøkstur aftur komandi ár upp á 5,5%.

**INNTØKURNAR**
Partar av vinnuni hava merkt ein stoyt av corona. Hóast hetta ikki sæst so væl aftur í inntøkunum hjá kommununi higartil, er inntøkumetingin nú nakað varligari og lægri.

Kommunuskatturin er framroknaður við støði í inntøkunum fyrstu átta mánaðirnar í 2020 við einum mettum vøkstri í skattagrundarlagnum á 2,00% løgdum aftrat.

Inntøkurnar frá kommunuskattinum vaksa tá 3,1% ella 26,4 mió.kr upp í 873,1 mió.kr í mun til 846,7 mió.kr í fíggjarætlanini 2020.

Skattainntøkurnar av eftirlønargjøldum eru mettar til 149 mió.kr, sum er ein vøkstur á 2,5%.

Felagsskatturin er mettur til 28,0 mió.kr, sum er 7,0 mió.kr ella 20% lægri enn metingin í fjør. Orsøkin er, at summi rakstraravlop fara at verða lægri orsakað av corona.

Samlaðu inntøkurnar vaksa sostatt 23,1 mió.kr ella 2,2% upp í 1.087,5 mió.kr í mun til 1.064,4 mió.kr í fíggjarætlanini 2020.

Til samanberingar vuksu inntøkurnar íalt í fíggjarætlanini 2020 við 60,5 mió.kr ella 6,0% í mun til fíggjarætlanina 2019.

**RAKSTRARÚTREIÐSLURNAR**
Kommunan er enn sum áður í stórum vøkstri, og hevur hetta við sær munandi øking í virksmeminum, tænastunum og rakstrarútreiðslunum.

Rakstrarútreiðslurnar hjá kommununi íalt vaksa netto 48,0 mió.kr upp í 876,3 mió.kr úr 828,3 mió.kr. Hetta er ein vøkstur upp á 5,8% í mun til fíggjarætlanina 2020.

**Útbyggingarnar á eldraøkinum økja raksturin 2,00%-stig**
Vøksturin í kommununi sæst serliga aftur í vøkstrinum í útreiðslunum á eldraøkinum, har ið tveir nýggir deplar - tvey stór rakstrarstøð - verða tiknir í nýtslu fyrsta dagin.

Talan er um nýggja umlættingar- og rehabiliteringsdepilin URD upp í Hoyvík og nýggja demensdepilin á Tjarnargarði uppi í Stoffalág.

Út av nettovøkstrinum í rakstrarútreiðslunum á 48,0 mió.kr eru 43,8 mió.kr hækking í lønum, harav 17,4 mió.kr er hækking á eldraøkinum; fyrst og fremst frá nýggju deplunum.

Hækkingin á 17,4 mió.kr svarar til góð 2,00-%-stig í hækking í rakstrarútreiðslunum. Frároknað hesa lønarhækkingina var útreiðsluvøksturin 3,8% í mun til nú 5,8%.

**Lønirnar eru munandi partur av rakstrinum**
Lønirnar hjá kommununi, sum eru 60% av samlaðu bruttokostnaðunum og 75% av nettokostnaðunum, vaksa sum nevnt omanfyri 43,8 mió.kr í mun til fíggjarætlan 2020.

Av hesum er 15,2 mió.kr ella 35% av vøkstrinum lønardagføring fyri 2021 og so ein øking á 28,6 mió.kr, har ið størsti parturin er ísv nýggj størv á nýggju deplunum. Sí talvu niðanfyri.

Lønirnar eru dagførdar við kendum sáttmálabroytingum, og lagt er harumframt upp fyri, at onkrar sáttmálasamráðingar draga út.

| | Lønar-reguleing | Lønar-vøkstur | Íalt |
|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyrisiting | 2.254 | 471 | 2.725 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 5.792 | 17.410 | 23.202 |
| §3 Børn og ung | 3.317 | 4.870 | 8.187 |
| §4 Undirvísing | 233 | 2.443 | 2.676 |
| §5 Mentan og frítíð | 766 | -133 | 633 |
| §6 Teknisk mál | 2.059 | 1.136 | 3.195 |
| §7 Kommunal virkir | 783 | 2.363 | 3.146 |
| | **15.204** | **28.560** | **43.764** |

Hædd er tikið fyri lógarbroytingum, býráðssamtyktum og virksemisbroytingum, ið fylgja av nýggjum íløgum, sáttmálabroytingum og líknandi.

Fólkavøksturin hevur týðandi ávirkan á rakstrararútreiðslurnar, og gongdin í fólkatalinum ávirkar bæði inntøkur og útreiðslur.

Miðskeiðís í 2020 vóru 22.216 fólk skrásett í kommununi, sum er ein vøkstur upp á 472 fólk ella 2,2% í mun til árið fyri.

**Høvuðsútreiðslutøl á greinunum**
Á **§ 1** Kommunual fyrisiting økjast nettoúreiðslurnar 3,1% ella 2,9 mió.kr, sum fer til sáttmálabundnar lønarhækkingar, býráðið og tænastumannaeftirlønir.

Nettoútreiðslurnar á **§ 2** Almanna- og heilsumál økjast íalt við 10,2% ella 26,2 mió.kr, herav 23,2 mió.kr er hækking í lønum.

Barnavernd hevur ein samlaðan vøkstur upp á 6%, ið er 2,2 mió.kr. Børn í fosturfamiljum hækkar 9,7% ella 1,5 mió.kr, og brúkaragjøld til børn á serstovni økjast við 0,9 mió.kr.

Á eldraøkinum er serliga talan um hækking í konto 2721 Røktartænastur 11,1 mió.kr (8,0%). Harav eru 3 mió.kr uppraðfesting av røktarøkinum umframt fígging til 9 nýggj búpláss.

Konta 2722 Tilboð hækkar við 8,7 mió.kr (30,3%) ísv umlættingar- og rehabiliterings-depilin og demensdepilin á Tjarnargarð, sum báðir standa klárir um ársskiftið.

Kontan fyri lógarbundna ansingarsamsýning økist 632 tkr, tí fleiri ansarar eru í skipanini.

Játtanin til Heilsuhúsið økist 3,8 mió.kr til rakstur av nýggju deplunum og av reingerðar-tænastuni, sum nú er fast tilboð.

Nettoútreiðslurnar á **§ 3** Børn og ung fylgja í høvuðsheitum barnatalinum, og økjast útreiðslurnar 3,7% ella 7,1 mió.kr.

Sum liður í at umskipa og styrkja tilboð og tænastur til børn við serligum tørvi á dagstovnunum og dagstovnum við serstovu, verður skipað serlig normering og fígging á 4 mió.kr. Talan er her um eina meirnormering upp á 4,0 mió.kr á § 3.

Eisini er nú meirnormeringin frá í fjør upp á 4,5 mió.kr skrásett og fíggjað varandi á hesum rakstrarstað. Útreiðslur til systkinaavsláttur vaksa 900 tkr.

Nettoútreiðslurnar á **§ 4** Undirvísing hækka 1,7%, ið er 0,8 mió.kr. Játtanin fylgir metta nemingatalinum. Størsti vøksturin er í samband við nýggja Skúlan á Fløtum.

Nettoútreiðslurnar á **§ 5** Mentan og frítíð hækka 5,3% svarandi til 3,1 mió.kr samsvarandi øktum virksemi. Av hesum eru 600 tkr øking í lønum.

Stuðul til ítrótt økist 550 tkr, nú ítróttarhøll í Skúlanum á Fløtum legst aftrat, og kontan Ítróttaranlegg økist 588 tkr í høvuðsheitum av somu orsøk.

Nettoútreiðslurnar á **§ 6** Teknisk mál økjast við 2,1% ella 3,0 mió.kr. Av hesum eru 1,1 mió.kr. lønir ísv økt virksemi.

Fleiri bygnings-fermetrar eru at viðlíkahalda, m.a Umlættingardepilin, Býlingshúsið vesturi á Flat, Finsen-hallirnar og Skúlin á Fløtum,

Nettoútreiðslurnar á **§ 7** Kommunal virkir økjast við 12,2%, sum er 5 mió.kr. Umframt játtnina til Tórshavnar havn er tað serliga vøkstur í játtan til renovatión á knappar 2,4 mió.kr og 1 mió.kr fyri Bussleiðina.

-----

Í fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður úrslit áðrenn

rentur 191,2 mió.kr.

Úrslit áðrenn avdráttir og íløgur verður 184,9 mió.kr. Avlop til skattafíggjaðar íløgur verður 156,3 mió.kr.

Er avlopið til skattafíggjaðar íløgur lægri enn samlaðar íløgur, má munurin fíggjast við antin meiri inntøku, tøkum peningi ella lántøku.

Býráðið ásetir skattaprosent og barnafrádrátt og kann umvegis hesi bæði broyta fortreytirnar fyri fíggjarætlanina.

**Tilmæli:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

**Fíggjarnevndin 23. september 2020:** Framlagt og beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Framlagt.

## 207/20 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.02.2020 | 64/20 | 20/00203-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 48/20 | 20/00203-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 83/20 | 20/00203-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 106/20 | 20/00203-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 86/20 | 20/00203-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 138/20 | 20/00203-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 110/20 | 20/00203-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 181/20 | 20/00203-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 160/20 | 20/00203-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 235/20 | 20/00203-1 |
| 11 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 207/20 | 20/00203-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 27. februar 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar og mars at góðkenna.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**

Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

## 208/20 Listprýði skúlin á Fløtum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 208/20 | 20/03503-1 |

**Upprunin til málið:**
Skriv dagfest 4 september 2020 frá Helenu D. á Neystabø, býráðslimi vegna Javnaðarflokkin í býráðnum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**1.**

Skrivið er soljóðandi:

**"Málið um uppsøgnina av listakvinnuni Hansinu Iversen sum skuldi listprýða júst skúlan á Fløtum**

Harafturat krevur minnilutin (Javnaðarflokkurin í Tórshavnar Býráði), at málið um uppsøgn av Hansinu Iversen sum listprýðara av Skúlanum á Fløtum verður tikið upp við møguleika fyri at atkvøða um, at Býráðið skal finna írestandi peningin, so at avtalan millum Býráðið og Hansinu Iversen kann verða hildin, og at hon kann fara til verka.
Hon var ein av trimum vinnarum av kappingni sum býráðið skrivaði út, og tí skal Býráðið standa við hesa avtalu. At sáttmáli ikki er skrivaður er ábyrgd Býráðsins og ikki ábyrgd listafólksins.
Vegna Javnaðarflokkin í Tórshavnar Býráði
Helena Dam á Neystabø
30 . august 2020

**Lýsing av málinum um Listafólkafelagsskapin ListGraFo og Tórshavnar Kommunu.**
Á seinasta regluliga býráðsfundi í juli mánaði umrøddu vit málið um hølisviðurskiftini hjá felagsskapinum Føroyskir Listgrafikarar, ListGraFo, sum í mong ár hevur bíðað eftir, at avtala, sum varð gjørd um gomlu evnisstovuna í Kommunuskúlanum (nú Finsen), skuldi verða sett í verk.

Longu í 2015 varð avtala gjørd við ListGrafo um, at tey skuldu sleppa inn í hesi høli við øllum teirra sera tungu og virðismiklu útgerð, av tí at tey máttu fara út hølunum í Kongagøtu, tá húsið varð selt.

Hølini í Kommunuskúlanum/nú Finsen vórðu innrættað til endamálið. Neyðugir hentleikar eru har, og ikki minst umstøður til at seta stór og sera tung amboð upp. Hølini egna seg í allar máta væl til endamálið, eins og stóri sýnisgluggin tryggjar at listaverkini kunnu koma almennninginum til gleði og gagn. Nú ið listafólkaklivar eru skipaðir í fimleikahøllini í Finsen, er tað uppaftur meira sjálvsagt at grafiski verkstaðurin verður júst har.

Í 2016 gjørdi býráðsmeirilutin av, at hølini skuldu brúkast til fyribils skúlastovu til tey yngru skúlabørnini, meðan Skúlin á Fløtum verður bygdur. Vit royndu at fáa í lag, at listafólkafelagsskapurin kundi sleppa inn beinan vegin, og at onnur loys varð funnin til fyribils skúlastovu. Men tað fekk ikki undirtøku í meirilutanum, og vit viðurkendu eisini, at tað hevði týdning, at næmingarnir í Skúlanum á Fløtum fingu hóskandi undirvísingarhøli.

Tað var týðiliga og greitt avtalað, at tá ið Skúlin flytir inn á Fløtum, skuldi listafólkafelagsskapurin so aftur sleppa inn í evningsstovuna. Og í 2018 varð uppskot til leigusáttmála viðgjørt og góðkent í bæði mentamálanevd og fíggjarnevnd. Og felagsskapurin Listgrafo boðaði frá, at eisini tey góðtóku uppskotið til leigusáttmála. Men knappliga broyttist støðan. Og býraðsmeirilutin vildi eftir øllum at døma ikki standa við leigusáttmálan longur.

Maskinur og útgerð teirra er í stórum vanda fyri at forfarast í vánaligum umstøðum í bingjum uppi á Sandvíkarhjalla. Og tað má sigast at hesin felagsskapur av framstandandi og dugnaligum listafólkum hevur verið tolin og bíðað nú í nógv nógv ár, tí júst hesi høli eru tey best egnaðu í allar mátar.

Nú í 2020, nakrar mánaðir áðrenn skúlin flytir út á Fløtir,  hevur meirilutin í Býráðnum avgjørt, at listafólkafelagsskapurin kortini ikki sleppur inn í evningsstovuna, sum tað hevur verið meiningin í nógv ár. Nú er tað Tavfelagið sum skal leiga hesi høli – og harafturat til ein nógv nógv lægri leigukostnað, enn Mentamálaumsiting Býráðsins kravdi frá listafólkabólkinum Listgrafo.

Vit í Javnaðarflokkinum ivast nógv í, um tað er farið rætt fram, tá ið avtala um leigusáttmála verður undirskrivað, hóast vit á Býráðsfundi hava kravt málið fyri næsta býráðsfund, og vit mótmæla teirri viðferð, sum Listafólkabólkurin ListGrafo hevur fingið frá býráðssamgonguni.
Tey eru nú enn einaferð heimleys, vandi er fyri at útgerðin forferst, og tey verða send runt í býnum at hyggja at hølum, sum øll vita, at tey kortini ikki fáa hendur á. Sjálvsagt skulu vit eisini hýsa Talvfelagnum, og eingin ivi er um, at har eru hópin av møguleikum til tess. Men nú verða hesir báðir felagsskapir spældir út móti hvørjum øðrum, sum hvørgin teirra ynskir. Ein loysn skal finnast á báðum.

Men vit mótmæla mannagongd og viðferð, sum kommunan hevur víst ListGrafo, og krevja málið fyri Býráðsfund  tann 24. September 2020, við møguleika fyri at atkvøða um Býráðið er sinnað at halda gjørdar avtalur viðListGrafo, og at finna aðra loysn á leigumáli við Talvsambandið.

Vegna
Javnaðarflokkin í Tórshavnar Býráði"

---

24. August 2020 var henda frágreiðging um málið løgd á torshavn.fo

"FRÁGREIÐING UM TILGONGDINA AT LISTPRÝÐA SKÚLAN Á FLØTUM
Í sambandi við at orðaskifti hevur tikið seg upp um arbeiðið at útvega list til byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum, er henda frágreiðing skrivað.

23. mai 2016 var hakin settur í at byggja nýggjan skúlabygning á Fløtum til skúla-, frítíðarskúla og annað ítrótta- og frítíðarvirksemi. Skúlin verður væntandi tikin í nýtslu í okt. 2020.

Sambært galdandi reglugerð, sum býráðið hevur samtykt, fyri útvegan av list til byggiverkætlanir av slíkum slag, er ásett, at setast skulu av 1,5% av byggikostnaðinum (handverkaraútreiðslunum) til útvegan av list. Til hesa verkætlan var sett av 2.5 mio.kr. umframt møguligt meirvirðisgjald. Eitt stevnumið í sambandi við listina sbrt. byggiskránni fyri skúlabyggingina var, at listin skuldi taka støði í hugtakinum um sjónliga læring ella læring í listini og sum skuldi ganga hond í hond við byggilistina. Útvegan av list til slíkar byggiverkætlanir er løgd til listabólkin í Tórshavnar kommunu.

Listabólkurin virkar við støði í sonevndu armlongdarmeginregluni frá politisku skipanini, t.v.s. bólkurin virkar og tekur avgerðir einsæris, tó so at umsitingin hevur verið til hjálpar í hesum máli.

Í listabólkinum eru: Listaábyrgdarhavandi í kommununi, býararkitekturin, listafakligur ráðgevi á Listasavni Føroya. Í hesum málinum hevur býararkitekturin verður umboðaður av arkitekti frá Býarskipanardeildini og mentamálaleiðarin verið umboður av skúlastjóranum fyri Skúlan á Fløtum. Listasavn Føroya trekti seg úr bólkinum á heystið 2019, tí tey sóu sína uppgávu at geva listafaklig ráð og ikki innganga í slíkar tilgongdir viðv. búskaparligum viðurskiftum.

Í mars 2018 var lýst við møguleikanum til listafólk at bjóða seg fram til at listprýða nýggja skúlabygningin á Fløtum.

Í almennu kunningini/fráboðanini var m.a. sagt:

“4. Listabólkurin metir um innkomnu uppskotini og skilar sær rætt til frítt at velja millum uppskotini og lata einum ella fleiri listafólkum uppgávuna ella ikki at taka av nøkrum uppskoti.

5. Tá ið listabólkurin hevur tikið avgerð um, hvør ella hvørji listafólk verða biðin um at gera listaverkið/listaverkini, verður sáttmáli gjørdur við viðkomandi listafólk, har m.a. treytir fyri avhending, uppseting, kostnað og annað verða ásettar.

...

Við støði í eini heildarmeting av uppskotunum tekur Listabólkurin endaliga støðu til, hvørji listafólk fáa uppgávuna at listprýða Skúlan á Fløtum. Avgerðin verður m.a. grundað á dygdina í uppskotunum og samanspælið við staðið, byggilistina, skúlan og brúkararnar.

Listabólkurin tilskilar sær rættin at fylgja gongdini í arbeiðinum og til eina og hvørja tíð at siga upp avtaluna, verður mett, at gongdin ikki er nøktandi.
Listabólkurin tilskilar sær eisini rættin at heita á listafólk um at koma við uppskotum til listprýðingina.”

Freistin fyri at lata inn uppskot var á sumri 2018. Inn komu 14 uppskot frá 18 persónum.

Listabólkurin valdi at fara víðari í samskifti við Edward Fuglø, Hansinu Iversen og Jón Sonna Jensen.

Síðani tá hevur verið ein stigvíst tilgongd við hesum listafólkunum og ráðgevum v.m. yvir eitt longri tíðarskeið.

Á heystið 2019 fekk listabólkurin meiri nágreinaði upplegg frá listafólkunum og gjørdist skjótt greitt, at uppleggini frá listafólkunum til list og kostnað, umframt aðrar atknýttar kostnaðir, ikki kundi rúmast innanfyri ásettu játtanina. Her serliga tí eitt listaverk kravdi útrokningar og atgerðir, av tí at talan er um eitt stórt verk, ið er tungt og hongur niður úr loftinum í miðøkinum í høgari hædd. Samlaði kostnaðin var tá samanlagt yvir 3,1 mio.kr. Talan var sostatt um eina upphædd, sum var munandi størri enn ásetta upphæddin. Neyðugt var tí at gera tillagingar í ætlanunum.

Í okt. 2019 kom Listabólkurin til ta niðurstøðu, at tað var rættast at arbeiða víðari við verkætlanum hjá tveimum listafólkum. Hesi vóru ávikavist Edward Fuglø og Jón Sonni Jensen, tí teirra upplegg á bestan hátt livdu upp til ynskini við listini. Harumframt avgjørdi Listabólkurin at veita eina samsýning fyri innleiðandi arbeiðið til listafólkið, ið ikki fekk sáttmála í hesum umfari.

Í dialogi við listafólkini og advokat vegna LISA og Føroysk Myndlistafólk, vóru gjørdar tillagingar bæði í vavi og kostnaði soleiðis, at tað bar til at fáa nøkur spennandi listaverk til bygningin og samstundis halda givnu játtanina. Harumframt var tá eisini rúm fyri at veita 100 túsund kr. í samsýning til listafólkið, ið ikki fekk sáttmála, umframt at kunna dekka aðrar kostnaðir knýttir at verkætlanini. Í feb. 2020 vóru sáttmálar gjørdir við Edward Fuglø og Jón Sonna Jensen. Ætlandi verða øll verkini liðugt avhendaði í september 2020.

Útvegan av list í hesum máli er at meta sum ein stigvís útboðstilgongd og har mett verður, at tað eina listafólkið greitt ikki hevur fingið sáttmála ella bindandi lyfti um sáttmála við Tórshavnar kommunu, men har kommunan vil veita eina sámiliga samsýning fyri innleiðandi arbeiðið, sum listafólkið hevur gjørt. Listafólkið hevur ikki tikið av møguleikanum enn.

Tórshavnar kommuna sær fram til í heyst at kunna sýna forvitnisligu listaverkini í Skúlanum á Fløtum fram fyri almenninginum.

Listabólkurin
Tórshavnar kommuna”

**Lógir, ásetingar o.a.**
Mál 18/03747 Stovnsetan av listaráðið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
-

**Umhvørvisárin**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Málið umrøtt og einmælt samtykt at beina málið til realitetsviðgerð.

Síðani varð atkvøtt um uppskot frá Gunvør Balle at beina málið í mentamálanevndina, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

## 209/20 Listaverkstøð í Finsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 106/17 | 17/01361-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 173/17 | 17/01361-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 279/17 | 17/01361-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 324/17 | 17/01361-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 294/17 | 17/01361-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 6/18 | 17/01361-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 53/18 | 17/01361-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 107/18 | 17/01361-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 69/18 | 17/01361-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 146/18 | 17/01361-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 23.04.2018 | 152/18 | 17/01361-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 137/18 | 17/01361-1 |
| 13 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 120/18 | 17/01361-1 |
| 14 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 164/18 | 17/01361-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 234/18 | 17/01361-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 213/18 | 17/01361-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 4/19 | 17/01361-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 39/19 | 17/01361-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 94/19 | 17/01361-1 |
| 20 Mentamálanevndin | 03.04.2019 | 118/19 | 17/01361-1 |
| 21 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 208/19 | 17/01361-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 191/19 | 17/01361-1 |
| 23 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 139/19 | 17/01361-1 |
| 24 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 319/19 | 17/01361-1 |
| 25 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 69/20 | 17/01361-1 |
| 26 Mentamálanevndin | 15.04.2020 | 116/20 | 17/01361-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 99/20 | 17/01361-1 |
| 28 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 209/20 | 17/01361-1 |

**Málslýsing:**
Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu er m.a. orðað viðv. skapandi list:

**"Skapandi list, mentan og siðsøga í kommununi**
Íløgur í mentan og list, eru íløgur í okkara egna samleika. At kenna og vera partur av søguni, er ein virðismikil førningur og tí eiga søvn at verða sjónligir partar av høvuðsstaðnum.
...
Listahús eigur at útvegast, har listafólk í kveikjandi umhvørvi kunnu fáa frið at skapa. “

**Myndlistaverkstað í Finsen**
Slíkt verkstað kundi verið hugsað í ovaru høllini í Finsen (fyrrv. fimleikahallunum í fyrrv. kommunuskúlanum). (sí hjálagdar myndir og tekning).
Høllin er partur av høvuðsumvælingin av Finsen til lestrarbústaðir hvat viðvíkur útveggum, vindeygum og taki, men er annars ogn hjá kommununi. Høllin fer at fáa hita frá Finsen.

Ynski er hjá myndlistafólki um at fáa betri møguleikar fyri verkstøðum. Ein fyrimynd er t.d. listaverkstað í Tróndheimi. Sí [www.lkv.no](http://www.lkv.no)

Høllin kundi verið avsett til verkstað hjá myndlistafólki og umsitin av myndlistafelagnum sbrt. nærri avtalu við kommununa viðv. upptøku, skipan, gjaldi v.m. Hugsanin er at rindast skal leiga fyri hølini og at tey so vítt til ber hvíla í sær sjálvum fíggjarliga.

Tað er hugsandi at har kundi verið einir 10-12 básar til listafólk.

Samskift hevur verið við teknisku fyrisiting/Húsaumsitingina um standin av høllini v.m. Ætlanin er at halda fram við greiningunum og fáa endaliga avklároing í mai 2017. Hugsanin er at minimalt skal gerast við hølini.

Ætlandi verður farið í samskifti við felagið hjá Myndlistafólki at gera uppskot til avtalu um, hvussu virksemi kann skipast har.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá fyribils metingum viðv. uppstartskostnaðum og rakstri av hølunum, umframt tíðarætlan.

Henda verkætlan vil innibera at verkætlanin um innandura spæliland í hallunum í Finsen (mál 16/02253) verður slept í hesum umfari.

Býarskipanardeildin vísir á, at í heildarætlanini fyri Finsen hevur málið verið at ymisku hølini, sum eru afturat sjálvum lestrarbústøðunum skulu vera útatvend og bjóða býnum og borgarum inn o.s.fr. Ovara høllin er serstøk m.a. við góðum ljósi og útsýni til garðin í Finsen. Ein vandi við at gera myndlistaverkstað er, at virksemi verður ov innatvent og ikki uppnær endamálinum m.a. um at fáa lív í umhvørvi kring Finsen.

Tí er neyðugt, um avgjørt verður at fara víðari við hesi verkætlan, at umsitingin í dialoginum við listafólkini fær greinað, hvørt virksemi kann skipast soleiðis, at tað kann innganga í visjónina um útatvent virksemi, sjónliggera list, framsýningar o.a.
Hartil er hóskandi at verkætlanin verður gjørt tíðaravmarkað og eftirmett t.d. innan 1 ár.

**Grafiska listaverkstaðið í Finsen (listgrafo)**
Er longu lutvíst staðsett og íverksett í hæddini undir auluni. Er ætlað til verkstað hjá listafólki innan grafikk (sí mynd og tekning). Hølini tilhoyra Bústaðir, men eru ætlaði til mentanarligt endamál, har tað verður rindað fyri rakstur og bygningsviðlíkahald, men ikki beinleiðis leiga.

Ætlanin er at gera avtalu við felagið fyri listagrafikarar. Hugsanin er áhugaði søkja um upptøku til at brúka hølini hjá felagnum sbrt. upptøkureglugerð sbrt. avtalu við kommununa um upptøku, skipan og gjald. Hugsanin er at rindast skal fyri hølini.
Samskift hevur verið við teknisku fyrisiting/Húsaumsitingina um standin av hølunum v.m. Ætlanin er at halda fram við greiningunum og fáa endaliga avkláring í mai 2017. Áðrenn verkætlan kann fremjast er neyðugt at endalig avtala kemur við Bústaðir um bygningsviðlíkahald o.a.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá fyribils metingum viðv. uppstartskostnaðum og rakstri av hølunum, umframt tíðarætlan.

Eins og fyri møguliga myndlistaverkstaðið, er hóskandi at skipa verkætlanina sum eina tíðaravmarkaða roynd og við eftirmeting.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a) at viðgera um farast skal víðari við fyrireiking av verkætlan um listagrafiskan verkstað og herundir samráðingar við avvarðandi felag um treytir v.m. fyri virkseminum
b) at viðgera um farast skal víðari við fyrireiking av verkætlan um myndlistaverkstað og herundir samráðingar við avvarðandi felag um treytir v.m. fyri virkseminum.

**Mentamálanevndin 3. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum a og b.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið á fundi við umboð fyri Føroysk myndlistafólk og ListGraFo. Hesi hava latið inn uppskot/frágreiðing um, hvussu tey kundu hugsað sær at virka í hølunum í Finsen. Sí hjáløgdu skjøl.

Ein avbjóðing, sum serliga tykist gera seg galdandi fyri listgrafiska verkstaðin, er húsaleigan. Enn er ikki endaliga greitt, hvør fermetrakostnaðurin verður fyri raksturin av í listgrafisku hølunum og myndlistaverkstaðnum, men fyri tað fyrra helst nakrar túsund kr. um mánaðin og tað seinna nakað hægri.

Í tí sambandi hevur samband eisini verið við Tórshavnar Kvøldskúla um til ber at kombinera skeiðvirksemi hjá skúlanum við virksemið hjá listgrafiska felagnum. Skúlin er sum útgangsstøði jaligur um hetta, og letur tað upp fyri virksemi, ið kann vera ymiskar tíðir á degnum gjøgnum alla vikuna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til, at umsitingin kemur við endaligum tilmæli til fundin í september.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti 8. november 2017:**
Viðv. listgrafiska verkstaðnum

Samskifti hevur verið við felagið Listgrafo og Kvøldskúlan um møguleikarnar. Felagið ynskir at hava hølini burturav og sigur seg vera til reiðar at rinda fyri kostnaðin av hølunum. Endaligi kostnaðurin er treytaður av brúksavtaluni millum Bústaðir og kommununa. Hesin kemur til viðgerðar í fíggjarnevndini 15. november 2017. Hølini vera ætlandi tøk seinni í november. Ávíst ivamál er um tørv á útsúgving til arbeiðið við vandamiklum løgi. Hetta er ikki kostnaðarmett.

Fyrivarni hjá umsitingini fyri hesi loysnini er mest um nýtslan av hesum serstaka høli verður nóg nógv til at felagið burturav skal hava tey.

Viðv. Myndlistaverkstaðnum

Samskifti hevur verið við Føroysk myndlistafólk um møguleikarnar. Umrøtt hevur verið antin at skipa tað sum verkstøð fyri tey sum eru at rokna sum yrkislistafólk. Hin møguleikin er at skipa virksemi meiri sum ein verkstað fyri yngri listafólk, ið ikki eru at rokna sum yrkislistafólk ella eina samanseting av báðum. Um fyrra loysnin verður valt metir umsitingin at tað er best um felagið sjálvt gerð avtalu við kommununa um virksemi og tekur sær av umsitingini av hølunum, upptøku v.m. Sum er eru hølini ikki klár at taka í nýtslu. Ymiskar ábøtur eru neyðugar. Herundir serliga viðv. brunaviðurskiftum, umframt aðrar ábøtur innan HVS, el v.m. Mett verður hóskandi at fáa ráðgeva at gera eina lýsing av viðurskiftunum. Umsitingin greiðir nærri frá hesum á fundinum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin kemur við tilmæli til komandi fund.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti**

**Viðv. Listgrafiska verkstaðnum**
Samráðingarnar við Bústaðir um brúksavtalu fyri Listatornið í Finsen eru lidnar og kemur málið ætlandi fyri í fíggjarnevndini í desember. Í rundum tølum fevnir fyrrv. Evningsstovan, um umleið 1/3 av fermetrunum í Listatorninum og skal felagið tá rinda umleið 5.000 kr. / mánaðin íroknað el&hita fyri hølini.

Samstundis verður mett, at tað hevði verið ynskiligt, um listgrafiska undirvísingin hjá Kvøldskúlanum var í somu hølum. Umsitingin og Kvøldskúlin meta at tað hevði verið ein fyrimunur og hevði kunna økt um nýtslustigið, umframt at Kvøldskúlin so kann nýta verandi listgrafiska hølið til onnur undirvísingarendamál. Eisini verður mett, at ein møgulig avtala eigur at vera tíðaravmarkað t.d. til 2 ár ella at hava møguleika fyri uppsøgn við rímiligum skotbráði.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til og gera tilmæli til fíggjarnevndina um:
a). hvørt Listgrafo skal fáa í boði leigusáttmála
b). hvørt Listgrafo og listgrafiska virksemi hjá Kvøldskúlanum eigur at vera í felag í hølunum

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Samtykt at taka undir við loysn b og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva fyrireikað arbeiðsætlan og kostnaðarætlan fyri Myndlistaverkstaðið í Finsen. Sí hjálagt kostnaðarmeting v.m. Talan er um metingar, ið skulu takast við ávísum fyrivarni. Eisini hevur verið samskift við Byggi- og umhvørvisdeildina viðv. fyritreytum og krøvum um í mun reglurnar í byggikunngerðini fyri Føroyar.

Samanlagt er samlaða metingin fyri hondverkaraútreiðslur (HVÚ) 524,7 tkr., umframt ráðgeving (ca. 6% av HVÚ) og ókent (ca. 15% av HVÚ) og MVG (6,25% av øllum postum). Møguliga kunnu einstakir postar takast út.

Støða er ikki tikin til fígging av verkætlanini.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla mentamálanevndini til at viðgera metingina og taka støðu til um um farast skal víðari við ætlanini.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur spurt ráðgevan um hvat kostnaðurin vildi verið um ovara høllin verður umvæld, men ikki niðara. T.v.s. hvat krevst av umvælingum v.m. í trappuøkinum upp til ovaru høllina. Metingin er at 496 tkr. koma aftur í hondverkaraútreiðslum, umframt kostnaðurin til ráðgeving, ókent og mvg. T.v.s. uml. 631 tkr. Sí hjálagt tilfar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin lata hervið nevndini hesar upplýsingar til umrøðu við atliti til møguligt tilmæli á komandi fundi.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Umrøtt.

Ískoyti
Vísandi til samtyktina í mentamálanevndini 29. november 2017 hevur samskifti verið við Listgrafo um samhýsing í hølunum í Finsen saman við Kvøldskúlanum. Sí hjálagt uppskot til avtalu.

Fyri at fáa hølini klár til endamálið hjá Listgrafo og Kvøldskúlanum er neyðugt við ymiskum ábótum o.a. Hetta er mett til umleið 100 tkr. og verður ætlandi framt innan raksturin hjá Kvøldskúlanum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka undir við uppskotinum til avtalu og beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Ískoyti**
Málið er nú gjøgnumgingið av nýggjum saman við Húsaumsitingini, umframt at ráðgevin hevur samskift við byggivaldið um fyritreytirnar í verkætlanini. Byggivaldið boðar frá, at arbeiðast kann víðari við verkætlanini, tó so, at endaligt byggiloyvi skal fáast til vega, áðrenn farið verður í gongd.

Um ynski er at fara í gongd við at gera myndlistaverkstað í ovaru høllini, eru hondverkaraútreiðslurnar (HVÚ) mettar til 524,7 tkr. umframt ráðgeving (ca. 6% av HVÚ), ókent (ca. 15% av HVÚ) og kommunalt MVG (6,25% av øllum postum). Um farið verður undir arbeiðið í ovaru høllini og ikki samstundis undir arbeiðið í niðaru høllini, er neyðugt at gera trappuuppgongdina millum báðar hallirnar. Metingin fyri tað arbeiðið er 496 tkr., umframt somu postar til ráðgeving, ókent og kommunalt mvg. Samanlagt gevur tað umleið 1,3 mkr.

Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión. Arbeiðið kann hóskandi verða boðið út í mai/juni til at verða útint tíðliga í heyst.

Við atliti til at fáa góðar prísir verður mett best, um arbeiðið í ovaru høllini var gjørt samstundis sum arbeiðið í niðaru høllini t.e. virknishøllini í Finsen – sí mál 17/01362, men er tað ikki alneyðug trey og krevur meirfígging uppá uml. 1,5 mkr.

Á løgukonto 5775 eru tøkar 921 tkr. fluttar frá verkætlan L57027 frá 2017 – sí mál 16/03404. Restin av fíggingini til verkætlanina, uml. 400 tkr., verður skotið upp at fíggjað av løgukonto 5775, smærri ítróttaanlegg, har 1,5 mkr. eru tøkar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðari á Húsaumsitingini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir útboð av arbeiðinum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen og Halla Samuelsen atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og játta kr. 921 tkr., ið eru tøkar fluttar frá verkætlani L57027 frá 2017 umframt 400 tkr. av løgukonto 5775, smærri ítróttaranlegg, sum eykajáttan til arbeiðið. Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mæla til at fara aftur til upprunaætlanina at nýta hølini til alment innandura spælipláss.

**Ískoyti:**
Í skrivið dagfest 17. mai 2018 hava býráðslimir fyri Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin ynski um at fáa málið um hølisviðurskifti hjá Listgrafo á skrá til fyrst komandi býráðsfund.

**Viðv.sáttmála við Listagrafo um leigumál í Finsen, sum er góðkendur í bæði mentamálanevnd og fíggjarnevnd**.
Undirritaða fer vegna Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin í Tórshavnar Býráði at biðja um at fáa eitt mál á skrá á næsta býráðsfundi. Tað snýr seg um leigusáttmálan, sum er gjørdur við felagsskapin Listagrafo um leigumál í Finsen.

Og sum eisini fevnir um, at Kvøldskúlin skal arbeiða har ávís avtalaði tíðspunkt. Hesin sáttmálin er sum skilst góðkendur tann 24. Apríl í ár.

Sum skilst hava tey nú fingið boð um, at tey ikki sleppa inn har kortini.

Hesum kunnu vit í andstøðuni ikki taka undir við. Tí hetta er ein tilgongd, sum hevur staðið uppá í nógv ár. Og tey hava bíðað í tolni eftir avtaluni, sum er staðfest í einum av bæði Mentamálanevndini og fíggjarnevndini góðkendum sáttmála – og sum listabólkurin eisini hevur góðtikið.

Soleiðis kann mann ikki fara við fólki, felagsskapum og skúlum – og tað kunnu vit í andstøðuni ikki góðtaka.

Tað verður víst til, at Skúlin á Fløtum skal disponera yvir hølunum. Vit hava sum andstøða ferð eftir ferð víst á, at sjálvandi skulu vit gera alt vit eru ment til tess at Skúlin á Fløtum kann húsast á so fáum matriklum sum møguligt, meðan bygt verður. Og júst tú skutu vit upp, at Skúlin á Fløtum fekk Gamla realskúla at húsast í, inntil byggjaríið verður liðugt. Tá ber so til at gera Gamla realskúla um til ein dagstovn. Tørvurin á dagstovnaplássum eigur at verða loystur á annan hátt beint nú – til dømis við at brúka allan brúna Skúla til endamálið.

Vit fara tí at krevja málið á næsta býráðsfund, soleiðis at vit kunnu samtykkja, at Býráðið heldur gjørdar avtalur og sáttmálar við Listabólkin Listagrafo og við Kvøldskúlan.

Vinarliga
Vegna Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin í Tórshavnar Býráði
Helena Dam á Neystabø
Heðin Mortensen
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bjørghild Djurhuus og
Annfinn Brekkstein

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Síðani viðgerðina seinast hevur samskifti verið millum Tórshavnar kommunu og Listgrafo um viðurskiftini og hvør onnur møgulig hølisloysn kundi verið hóskandi til virksemi felagsins. Felagið metir, at niðara høllin í Finsen og hjárúmið norðanfyri eru meiri áhugaverd enn ovara høllin og hjárúmini har. Felagið ynskir ein leigusáttmála um hølini skjótast tilber. Í máli 17/01362 Virknishøll í Finsen er innleiðandi viðgjørt at gera eina virknishøll í niðaru høllini í Finsen.

Í sambandi við fyrireiking av málunum eru ávegis tekniskar greiningar og kostnaðarmetingar gjørdar av ráðgeva og Húsaumsiting fyri bæði niðaru høllina sum virknishøll og í sambandi við hetta málið um listaverkstøð. Mett verður, at tað lutfalsliga skjótt ber til at fáa greinað viðurskiftini viðv. við atliti til at broyta endamál og ístaðin gera listaverkstøði í niðaru høllini ístaðin teirri ovaru høllini.

Í næstum kann farast í samráðingar við Listgrafo um innrætting og krøv til hølini, soleiðis at neyðug teknisk fyrireiking og byggimálsviðgerð kann fremjast, sum so síðani kann vera grundarlag fyri einum leigusáttmála.

Harumframt kann eisini eftirfylgjandi farast í samráðingar við Myndlistafelagið um møguleikan fyri myndlistaverkstaði í parti av niðaru høllini í Finsen.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til:

a) um farast skal í samráðingar við Listgrafo við tí endamáli at gera leigusáttmála og fyrireika listgrafiskan verkstað í parti av niðaru høllini í Finsen,

b). um farast skal í samráðingar við Myndlistafelagið um at gera leigusáttmála og fyrireika myndlistaverkstað í parti av niðaru høllini í Finsen.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir a) og b).

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, mæla til at halda fast í uppskot í skrivi, dagfest 17. mai 2018, sum gongur út uppá at Býráðið heldur gjørdar avtalur og sáttmálar við Listabólkin Listagrafo og við Kvøldskúlan .

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn tekur undir við Mentamálanevndini.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Helenu Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam:

Mælt verður til at halda fast í uppskoti í skrivi 17. mai 2018, sum gongur út uppá, at býráðið heldur gjørdar avtalur og sáttmálar við Listabólkin, Listagrafo og við Kvøldskúlan.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti:

Fyri atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini 20. juni 2018, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**
Listaverkstøð
Umsitingin hevur verið í samskifti við Listgrafo um málið. Felagið er nú sinnað til at viðgera møguleikan fyri at gera listaverkstøð í ovaru høllini og ynskir at fara í samráðingar um tað.

Ovara høllin er nakað størri enn niðara av tí at fleiri hjárúm eru. Tí er møguliga møguligt at kombinera listagrafisk virksemi við annað listaverkstaðarvirksemi. Hetta verður ætlandi kannað nærri í komandi tilgongdini.

Betri møguleikar fyri framsýning/gallarívirksemi fyri yrkislist í býnum
Listgrafo hevði upprunaliga ætlanir um at hava samansett verkstað og framsýningarhøli, men av tí at talan nú er um ovaru høllina setur felagið fram ynski um at kommunan betrar um møguleikarnar hjá yrkislistafólki til at framsýna og eisini selja sína list. Til komandi fund kemur tilmæli um, hvussu hetta kann fremjast, bæði uppá stytri og longri sikt og soleiðis styrkja um møguleikarnar fyri at yrkislistafólk kunnu virka og annars geva borgarum og vitjani høvi til at síggja nútíðarlist í góðum umstøðum.

Henda ætlanin hongur í stóran mun saman við ætlanunum um virknishøll í hinari høllini í Finsen, sí tilmæli um tað. Neyðugt verður við eyka fígging til endamálið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini til at gera uppskot til leiguavtalu við Listgrafo um leigumál um listaverkstøð í meginpartinum av ovaru høllini, møguliga samansett við annað listavirksemi.
b). at heimila umsitingini at fara undir útboð av umvælingararbeiðinum av ovaru høllini.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við b.

**Ískoyti**
Umsitingin er í holt við tilgongdina at bjóða umvælingina av ovaru høllini út. Hetta við endamálinum at hava listaverkstøð har.

Listgrafo hevur 1. februar 2019 fráboðað, at tey ynskja niðaru høllina til listaverkstøð.

Mett verður ikki hóskandi at býta virksemi um millum ovaru og niðaru høllina í Finsen. Fyrst og fremst vegna atkomuviðurskiftini, ið mugu vera sera høgligt til virknishøllina um hon skal kunnu brúkast til skúla, dagstovnar, frítíðarskúlar og virkni hjá borgarum v.m. Umframt at endaliga byggiloyvið til ovaru høllina vil hava avmarkingar viðv. tali av fólki í høllini, ið kann vera torført at hondhevja við eini virknishølll í teirri ovaru høllini.

Helst er betri at kanna víðari um onnur staðseting kann finnast til listgrafiskt virksemi. Verkætlanin viðv. listaverkstøðum verður síðani fyrireikað víðari, men til annað listaverkstaðarendamál enn listgrafiskt virksemi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at halda fast við samtyktina um at listaverkstøð í ovaru høllini og at farið verður undir víðari kanningar um listagrafiskavirksemi hjá Listgrafo kann hýsast aðrastaðni.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Samtykt at halda fast við samtyktina um listaverkstøð í ovaru høllini í Finsen.

**Ískoyti**
Viðv. útboði av umvælingararbeiðinum
Tilgongdin er ávegis og væntast klárt til næsta fund. Sí eisini mál 17/01362 Virknishøll í Finsen.

Viðv. listverkstaði í ovaru høllini í Finsen
Listgrafo hevur nú boðað frá, at tey taka av møguleikanum fyri at brúka ovaru høllina í Finsen og at tey ynskja samráðingar um avtalu uppá rímiligar treytir. Umsitingin metir, at tað er hóskandi at virksemi verður kombinerað við listgrafisk virksemi hjá Tórshavnar Kvøldskúla. Hetta verður fyri tað mesta avmarkað til stutt skeið og burdi væl kunna virka saman við virkseminum annars har. Eisini verður mett hóskandi at partur av hølunum verður gjørt tøkt til annað listarligt virksemi og at farið verður í dialog við Myndlistafelagið um menning av tí konseptinum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara í samráðingar:
a). við Listgrafo um brúksavtalu um listagrafiskan verkstað í ovaru høllini og
b). við Myndlistafelagið um listaverkstøð í ovaru høllini.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið á fundi við Listgrafo og Myndlistafelagið um listaverkstøð í ovaru høllini í Finsen.

**Viðv. Listgrafo**
Felagið vísir á ymiskar vansar viðv. hølunum og vísir harumframt á, at vánirnar fyri kunna koma inn í hølini er væl út í 2019. Tí ynskir felagið heldur sum fremsta ynskir at bíða eftir at sleppa inn í hølið tey

upprunaliga høvdu fingið uppskot til leigusáttmála um – nevniliga evningstovnuna undir Auluni í Finsen. Tey hølini eru í løtuni ein 3. fl. hjá Skúlanum á Fløtum og verða tøk aftur á sumri 2020. Onnur alternativ vildu verið í kjallarahæddini í Skansastovu, men er har avbjóðingin at Tøkum lætt hevur brúksavtalu um hølini einaferð um vikuna, umframt at felagið eisini nevnir høli í norðara bygninginum á Bacalao.

**Viðv. Myndlistafelagnum**
Dialogurin er nógv tengdur at viðurskiftunum hjá Listgrafo, ið fevnir um fleiri av somu fólkunum. Felagið arbeiðir samstundis saman við LISA viðv. møguleika fyri at fáa listaligt virksemi í Hoydølum, umframt at felagið nevnir møguleika fyri listaverkstøðum í norðara bygninginum á Bacalao. Felagið ynskir fegin at halda fram við dialoginum í næstum.

**Viðv. útboði av umvælingararbeiðinum av ovaru høllini**
Umsitingin greiðir frá kostnaðarmetingunum v.m.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja at lata Listgrafo sama leigusáttmála um evningstovnuna, sum felagið hevði í boði 2017, men galdandi frá sumri 2020, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 03. apríl 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Víst verður til ískoyti í máli 17/01362 Virknishøll í Finsen.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Ein meiniluti Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

Ein minniluti Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Ein meiriluti, annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í Mentalamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við málinum og mælir til at halda fast við upprunaligu ætlanina at brúka báðar hallirnar til innandura spælipláss.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Trónda Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helenu Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinni Brekkstein um, at hallirnar í Finsen verða brúktar til innandura spælipláss sum uppruna ætlanin var, og at peningurin verður játtaður til tað endamálið, ið fall við 6 atkvøðum fyri, 7 atkvøðum ímóti og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen,  og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, sum varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen, og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**
**Skipan av listaverkstaðnum**
Arbeiðið við at umvæla ovaru høllina í Finsen gongur sína gongd og verður ætlandi liðugt í mars 2020. Umsitingin hevur havt fund við Føroysk Myndlistafólk um, hvussu tey meta verkstaðið skal skipast. Felagið hevur áður sýnt áhuga at standa fyri virkseminum, men metir, at um talan skal vera um eitt konsept fyri bæði yrkislistafólki og onnur, so meta tey tað betri at virksemi er skipað undir kommununi, men at tey vilja viðvirka til at menna konseptið og síggja eisini áhugaverdar møguleikar í at yrkislistafólk og onnur t.d. lesandi og spírar húsast í somu hølum. Fyri at fáa eitt slíkt konsept at virka, er hóskandi at royna seg stigvíst fram og gera hóskandi tillagingar so hvørt

**Rakstur**
Hølini í ovaru høllini, íroknað hjárúm eru umleið 350m² og verður roknað við at árligu útreiðslurnar til el, hita, samskipan og ávísa reingerð eru uml. 150 tkr./árið. Hetta inniber at hølini helst skulu hava eina nøkulunda tilsvarandi inntøkur, umframt at roknast má við ávísum útreiðslum til at byrja virksemi. Mett verður at umleið 10 básar kunnu vera í listaverkstaðnum.

Innan mentamálaøkið er rakstrarøkið nevnt Mentanarhølir í miðbýnum. Mett verður hóskandi at hetta økið fær listaverkstøðini at umsita.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at fyrireika endaligt konsept við reglugerð, gjaldskrá v.m. fyri einum listaverkstaði, ið bæði bjóðar fram at hýsa yrkislistafólki og øðrum listafólki

b). at listaverkstaðið verður skipað undir Mentanarhølum í miðbýnum

og at venda aftur til nevndina í 2020 við málinum til endaliga støðutakan.

**Mentamálanevndin 27. november 2019:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, atkvøða blankt.

**Ískoyti:**
Umvælingararbeiðið í hallunum í Finsen gongur sína gongd, og ovara høllin verður væntandi klár at taka í nýtslu í apríl/mai 2020.

Mentanarhølir í miðbýnum og umsitingin eru í holt við at fyrireika nýtslutøkuna og herundir gera uppskot til, hvussu hølini vera skipaði og innrættaði. Sí hjálagt uppskot til reglugerð. Hugsanin er, at reglugerðin verður send til ummælis hjá Føroyskum myndlistafólkum og øðrum viðkomandi pørtum. Til at gera hóskandi uppbýti í básar v.m. í listaverkstaðnum, umframt ymiskar útreiðslur ísv. uppstart av hølunum er neyðugt við uml. 110 tkr.

Hugsanin er, at inntøkurnar frá brúksleigumálunum fara til rakstur av tilboðnum (t.e. el&hita, reingerð og umsiting o.a.)

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at senda hjálagda uppskot til reglugerð til ummælis.
b). at játta 110 tkr. av kontu 5366 Stuðul annars til kontu 5312 Mentanarhølir í miðbýnum.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Uppskotið til reglugerð hevur verið til hoyringar hjá Føroyskum myndlistafólkum og LISA, ið eisini var biðið um at senda til viðkomandi limafeløg.

TK hevur fingið hesar viðmerkingar frá Føroyskum myndlistafólkum:
*"Vit hava bert eina viðmerking, tað er til orðið listasøgufrøðing í §3, stk. 2.*
*Kanska tað er betur at tað stendur listakønur í staðin, so ber til at eitt listafólk kann sita har, og ikki einans "akademikari"."*

Umsitingin metir at henda viðmerking kann takast til eftirtektar.

Meting:
Við støði í tí er gjørd dagføring í reglugerðini, sí dagført uppskot hjálagt.

Nýtslutøkan av hølunum verður nú fyrireikað, og í endanum av apríl verður ætlandi lýst við møguleikanum at søkja um at leiga bás í hølunum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja dagførdu reglugerðina.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2020**: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Minnilutin (Javnaðarflokkurin í Tórshavnar Býráði) krevur, at málið um leigusáttmálan við ListGrafo um Evnishølini í Finsen kemur til viðgerðar á næsta Býráðsfundi tann 24. September við møguleika fyri at atkvøða, um at leigusáttmáli verður gjørdur við ListGrafo um evnishølini í Finsen. Ein nátúrlig avleiðing av hesum er, at nýggj høli verða útvegað til Talvsambandið.

**Lýsing av málinum um Listafólkafelagsskapin ListGraFo og Tórshavnar Kommunu.**
Á seinasta regluliga býráðsfundi í juli mánaði umrøddu vit málið um hølisviðurskiftini hjá felagsskapinum Føroyskir Listgrafikarar, ListGraFo, sum í mong ár hevur bíðað eftir, at avtala, sum varð gjørd um gomlu evnisstovuna í Kommunuskúlanum (nú Finsen), skuldi verða sett í verk.

Longu í 2015 varð avtala gjørd við ListGrafo um, at tey skuldu sleppa inn í hesi høli við øllum teirra sera tungu og virðismiklu útgerð, av tí at tey máttu fara út hølunum í Kongagøtu, tá húsið varð selt.
Hølini í Kommunuskúlanum/nú Finsen vórðu innrættað til endamálið. Neyðugir hentleikar eru har, og ikki minst umstøður til at seta stór og sera tung amboð upp. Hølini egna seg í allar máta væl til endamálið, eins og stóri sýnisgluggin tryggjar at listaverkini kunnu koma almennninginum til gleði og gagn. Nú ið listafólkaklivar eru skipaðir í fimleikahøllini í Finsen, er tað uppaftur meira sjálvsagt at grafiski verkstaðurin verður júst har.

Í 2016 gjørdi býráðsmeirilutin av, at hølini skuldu brúkast til fyribils skúlastovu til tey yngru skúlabørnini, meðan Skúlin á Fløtum verður bygdur. Vit royndu at fáa í lag, at listafólkafelagsskapurin kundi sleppa inn beinan vegin, og at onnur loys varð funnin til fyribils skúlastovu. Men tað fekk ikki undirtøku í meirilutanum, og vit viðurkendu eisini, at tað hevði týdning, at næmingarnir í Skúlanum á Fløtum fingu hóskandi undirvísingarhøli.

Tað var týðiliga og greitt avtalað, at tá ið Skúlin flytir inn á Fløtum, skuldi listafólkafelagsskapurin so aftur sleppa inn í evningsstovuna. Og í 2018 varð uppskot til leigusáttmála viðgjørt og góðkent í bæði mentamálanevd og fíggjarnevnd. Og felagsskapurin Listgrafo boðaði frá, at eisini tey góðtóku uppskotið til leigusáttmála. Men knappliga broyttist støðan. Og býraðsmeirilutin vildi eftir øllum at døma ikki standa við leigusáttmálan longur.

Maskinur og útgerð teirra er í stórum vanda fyri at forfarast í vánaligum umstøðum í bingjum uppi á Sandvíkarhjalla. Og tað má sigast at hesin felagsskapur av framstandandi og dugnaligum listafólkum hevur verið tolin og bíðað nú í nógv nógv ár, tí júst hesi høli eru tey best egnaðu í allar mátar.

Nú í 2020, nakrar mánaðir áðrenn skúlin flytir út á Fløtir,  hevur meirilutin í Býráðnum avgjørt, at listafólkafelagsskapurin kortini ikki sleppur inn í evningsstovuna, sum tað hevur verið meiningin í nógv ár. Nú er tað Tavfelagið sum skal leiga hesi høli – og harafturat til ein nógv nógv lægri leigukostnað, enn Mentamálaumsiting Býráðsins kravdi frá listafólkabólkinum Listgrafo.

Vit í Javnaðarflokkinum ivast nógv í, um tað er farið rætt fram, tá ið avtala um leigusáttmála verður undirskrivað, hóast vit á Býráðsfundi hava kravt málið fyri næsta býráðsfund, og vit mótmæla teirri viðferð, sum Listafólkabólkurin ListGrafo hevur fingið frá býráðssamgonguni.

Tey eru nú enn einaferð heimleys, vandi er fyri at útgerðin forferst, og tey verða send runt í býnum at hyggja at hølum, sum øll vita, at tey kortini ikki fáa hendur á. Sjálvsagt skulu vit eisini hýsa Talvfelagnum, og eingin ivi er um, at har eru hópin av møguleikum til tess. Men nú verða hesir báðir felagsskapir spældir út móti hvørjum øðrum, sum hvørgin teirra ynskir. Ein loysn skal finnast á báðum.

Men vit mótmæla mannagongd og viðferð, sum kommunan hevur víst ListGrafo, og krevja málið fyri Býráðsfund  tann 24. September 2020, við møguleika fyri at atkvøða um Býráðið er sinnað at halda gjørdar avtalur viðListGrafo, og at finna aðra loysn á leigumáli við Talvsambandið.
Vegna
Javnaðarflokkin í Tórshavnar Býráði

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Málið umrøtt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. september 2020 | Blað nr.: 911<br>Formansins merki: |

## 210/20 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Kaldbak og Kaldbaksbotn til býráðsvalið 10. november 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.08.2020 | 177/20 | 20/03094-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 210/20 | 20/03094-1 |

**Málslýsing:**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Kaldbak og Kaldbaksbotn til býráðsvalið 10. november 2020, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

Víst verður til fundarskipan fyri Tórshavnar býráð **§ 16 Lutfalsval**, ið er soljóðandi:

*"1. petti. Tá ið býráðið skal velja 2 ella fleiri limir í nevndir, stjórnir ella tílíkt, fer slíkt val fram eftir lutfalsvalháttinum.*

*2. petti. Við lutfalsvali verður sipað til ein valhátt, har býráðslimir frammanundan boða borgar-stjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.*

*3. petti. Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3, o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.*

*4. petti. Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgartjórin skipar fyri.*

*5. petti. Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør umboðar hvønn bólkin.*

*6. petti. Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir pettunum 1-3."*

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja valstýrið fyri Kaldbak og Kaldbaksbotn.

**Býráðsfundur 25. august 2020:** Vald vórðu, Jórun Petersen, Johannis Petersen, Petur Skeel Nolsøe og Finnbjørn Simonsen.

**Ískoyti:**
Neyðugt er at velja nýtt umboð fyri Johannis Petersen.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til av velja nýtt umboð í valstýrið fyri Kaldbak og Kaldbaksbotn.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Útsett.

**FUNDURIN LOKIN KL. 22:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Heðin Mortensen | |
| | Jógvan Arge | |